

# RÚTMISKUR TÓNLEIKUR Í FØROYUM

Februar 2005

Vinnuframagrunnurin

Mentamálaráðið

Menningarstovan
Faroe Islands Trade Council

# Innihaldsyvirlit

**síða**


**Fororð** 1
**Inngangur** 2
**Meginsjónarmið** 4
**Framferðarháttur** 5
**1. Altjóða tónleikapallurin** 7
- Núverandi støða 7
- Framtíðarútlit 9
- Samandráttur 11

**2. Norðurlendski tónleikapallurin** 12
- Svøríki skarar framúr 12
- Stuðul til tónleik í Svøríki, Danmørk og Íslandi 17
- Samandráttur 19

**3. Føroyski tónleikapallurin** 20
- Tónlistaligt virksemi 21
- Venjingarumstøður 24
- Spælistøð 26
- Konsertferðir 29
- Festivalar og afturvendandi konserttiltøk 31
- Fløguútgávur 34
- Upptøkuhølir 36
- Plátu- og útgávufeløg 37
- Feløg 39
- Marknaðarførsla 39
- Inntøkumøguleikar 43
- Upphavsrættur í Føroyum 46
- Fíggjarligur stuðul 48
- Samandráttur 53

**4. SWOT** 54
**5. Niðurstøða** 55
**6. Møguligar tilráðingar** 57
**7. Tilráðingar** 58
**8. Almenni leikluturin** 68

**Hjárit**
I. Yvirlit yvir greinar, lýsingar og kjak í sambandi við tónleikaráðstevnu 4. oktobur 2004
II. Yvirlit yvir samrøður við lyklapersónar
III. Ljóðmenningin
IV. Spírin
V. Festivalar, kappingar og árlig tiltøk
VI. Feløg
VII. Tónleikaheimurin

**Keldulisti**

**Myndatilfar:** **síða**


| | |
|---|---|
| Mynd 1: Tónleikaarbeiðsmarknaðurin | 13 |
| Mynd 2: Fløgusøla og retail-virði | 14 |
| Mynd 3: Prosentvøkstur í tíðarskeiðinum 1991-2000 | 14 |
| Mynd 4: Tónleikaútflutningur úr DK, SE og NO | 15 |
| Mynd 5: Útflutningsvirðið av royalties | 15 |
| Mynd 6: Tænastuútflutningsvirði í 2002 | 16 |
| Mynd 7: Býtið í prosentum og milliónum DKK av útflutninginum í 2002 | 16 |
| Mynd 8: Onnur spælistøð í landinum | 28 |
| Mynd 9: Fløguframleiðsla | 35 |
| Mynd 10: Meirvirðisketan | 44 |
| Mynd 11: Inntøkur úr útlondum | 45 |
| Mynd 12: Útgjald frá Koda til føroyskar limir | 47 |
| Mynd 13: Útvarp Føroya | 47 |
| Mynd 14: Sjónvarp Føroya | 48 |
| Mynd 15: Stuðul úr Mentanargrunni Landsins | 49 |
| Mynd 16: Stuðul úr norðurlendsku grunnunum | 51 |
| Mynd 17: Almenni leikluturin í tónleikamenningini | 68 |

# Fororð

**Tora vit?**

Tað prutlar undir lokinum. Tað yður í tónlistarligum virksemi her heima. Onnur hava langt síðan sæð tað og sagt tað. Her er okkurt serligt. Nógv ber til, men einki ber seg. Næstan eingin klárar av liva av tónleikinum. Línan er stutt; og tað er ov skjótt at koma runt. Gleðin við at spæla og skapa okkurt druknar í umsiting og umsóknum. Ein fellur í fátt. Alt, sum stingur seg upp, verður køvt niðuraftur. Køkan er lítil, og bitarnir eru ov smáir, til at nakar veruliga verður mettur. Svangir magar blíva ofta súrir inn á magan, ið er eitt sindur mettari enn teir sjálvir, heldur enn at venda sær til føðikelduna og skaffa meira. Til allan flokkin.

Føroyski tónleikapallurin hevur lítlan og ongan bygnað. Tað er eingin meining við honum, hóast tað er nógv meining í honum. Uttan bygnað hendir einki, tí eingin tekur ábyrgd av at fylla í tóma karmin. Spírarnir hava vánalig gróðrarlíkindi, og teir fáu spírarnir, ið hava vaksið seg út um mark, hava bert sær sjálvum fyri at takka.

So stutt kunnu vit lýsa rútmiska tónleikin í Føroyum. Er lýsingin døpur ella lívs-játtandi? Tað veldst um eyguni, sum síggja. Men hon broytist ikki, uttan at vit tora at síggja sannleikan í eyguni og virka út frá hesum.

Vit mugu fyrst og fremst tora at viðganga, at umstøðurnar ikki eru nóg góðar. At nógv kann gerast betur. Men hvat vilja vit við tónleikinum? Skulu føroyskir tónleikarar gerast yrkistónleikarar her heima? Ella skulu føroyskir tónleikarar eggjast og stuðlast til at fara út um Føroyar við sínum tónleiki? Skal tónleikavinnan geva eitt gott íkast til landsbúskapin? Tá ið hesir spurningar eru svaraðir ber til at arbeiða málrættað og miðvíst frameftir. Saman og hvør sær.

Tora vit tað?

# Inngangur

Seint á heysti 2003 tóku Vinnuframagrunnurin og Mentamálaráðið stig til leingi ætlaða útgreining av umstøðum, møguleikum og forðingum hjá rútmiskum tónleiki í Føroyum. Hvør í sínum lagi stuðla stovnarnir menning av tónleikavirksemi, men teir halda ikki, at stuðulskipanir teirra eru grundfestar í greiðari fatan av, hvar almennur peningur munar mest.

Dentur varð lagdur á, at greiningin varð gjørd í samstarvi við fólk innan fyri tónleikin. Fekst eitt umfatandi samstarv við hesi, kundi arbeiðið stuðla undir fruktagott samstarv við og innan fyri tónleikavinnuna frameftir.

At skipa fyri verkætlanini varð stýrisbólkur settur, og Urd Johannesen varð biðin at standa fyri verkætlanini. Í stýrisbólkinum vóru hesi umboð:

Fróði Vestergaard
Gissur Patursson, Vinnuframagrunnurin
Jákup Zachariassen
Jóan Petur Hentze, Mentamálaráðið
Kjartan Kristiansen, Menningarstovan, formaður í stýrisbólkinum
Kristian Blak, LISA

Arbeiðssetningurin var hesin:

*Tit skulu gera*

a) *almenna lýsing av støðuni hjá tónleikinum og tónleikaligu framtíðarmøguleikunum og undir hesum lýsa tónleikaligar, yrkisligar og vinnuligar menningarmøguleikar*
b) *lýsing av tónleikavinnuni lið fyri lið, frá skapandi virksemi og upptøku til marknaðarførslu, turnévirksemi, útflutning o.m. og undir hesum vísa á veikar liðir og menningarmøguleikar*
c) *lýsing av uppgávum, ið tað almenna eigur at leggja seg eftir at loysa, og undir hesum lýsa hvørjar stuðulsskipanir kunnu fremja menningina, og hvørjar upphæddir eru ynskiligar*
d) *lýsing av møguligum nýggjum skipanum, ið mælt verður til at seta í verk; t.d. konsertpallur og økisspælistøð.*

Í verkætlanararbeiðinum er rútmiskur tónleikur allýstur soleiðis:

*"Øll sløg av yrkis- og áhugatónleiki uttan klassiskur tónleikur, nútímans partiturtónleikur, kórtónleikur, kirkjutónleikur og etniskur tónleikur."*

Tíðin fram til august 2004 varð sum heild nýtt til fyrireikingar; eitt nú at gera arbeiðs-ætlan og fíggjarætlan fyri verkætlanina og at savna inn tilfar og at samskifta við persónar og feløg í Føroyum og uttanlands, ið kanska skuldu vera við. Í august varð farið at gjøgnumganga og samansjóða innsavnaða tilfarið. Byrjað varð at skipa álitið; serliga teir fyrstu partarnar; og hildið varð fram at tosa við tónleikarar og umboð fyri áhugabólkar og vinnufeløg heima og í grannalondunum.

Fyri sum frægast at fáa sjónarmiðini hjá fólki innan fyri tónleikin við í útgreiningina og at stuðla undir fruktagott samstarv við og innan fyri tónleikavinnuna frameftir, varð skipað fyri tónleikaráðstevnu undir heitinum ”What does it take”. Ráðstevnan varð hildin í Norðurlandahúsinum 4. oktobur 2004 við umleið 120 luttakarum. Fyrilestrahaldarar vóru fingnir at koma úr Svøríki, Íslandi, Danmørk og Føroyum, og framløgurnar lýstu væl ymiskar partar av karmum, samstørvum og avbjóðingum hjá vinnuligum tónleiki. Ráðstevnan hevur sett ferð á almenna kjakið um, hvussu rútmiski tónleikurin verður mentur og kemur longri út.

Tað er ikki av tilvild, at umboð vórðu fingin úr júst hesum trimum londunum (Svøríki, Íslandi og Danmørk) at leggja fyri. Hvør á sín hátt eru tey kend, og sum fyrimyndir kunnu tey geva tann íblástur og lærdóm uttanífrá, sum hevur týdning, tá ið ein skal skapa karmar og umstøður hjá einari vinnu, sum hjá okkum enn má sigast at vera í sínari fyrstu byrjan. At vit tó eru komin í gongd, vístu føroysku framløgurnar og kjakið aftaná.

Nú ið arbeiðið er komið at enda, vilja verkætlanarleiðari og stýrisbólkur nýta høvið at takka øllum teimum mongu persónum, stovnum, feløgum og fyritøkum, sum hava verið einastandandi fyrikomandi og hjálpsom við at geva álitinum teirra serkunnleika. Okkara vón er, at tey kenna, at teirra rødd er hoyrd. Tað er somuleiðis okkara vón, at tey, sum álitið ikki hevur verið beinleiðis í sambandi við, kunnu taka undir við tí, sum stendur í álitinum.

*Tórshavn, 23. februar 2005*

Kjartan Kristiansen
*formaður*

Urd Johannesen
*verkætlanarleiðari*

Fróði Vestergaard

Gissur Patursson

Jákup Zachariassen

Jóan Petur Hentze

Kristian Blak

# Meginsjónarmið

Hvønn veg gongur rákið, og hvussu kunnu vit skipa okkum fyri at fylgja við rákinum og verða dagførd? Alt meðan leitað verður eftir svarinum til hesar spurningar, er 'veruleikin' broyttur, fortreytirnar aðrar, vøran ov gomul ella peningurin uppi.
Í slíkari støðu kemur almenni myndugleikin altíð at renna aftaná og brúka orku sína skeivt.

Innan fyri tónleikamenning síggja vit leiklutin hjá Mentamálaráðnum (MMR) sum tann, ið skal skapa lógarligar og fíggjarligar karmar til tónleikafrálæru í sínari heild og geva stovnum og fyrisiting, sum ráðið varðar av, so góð gróðrarlíkindi sum gjørligt. MMR eigur harumframt at vera tann proaktivi parturin í føroyskum mentanarpolitikki, sum stingur út í kortið og setur átøk í verk út frá einari miðvísari strategi og visjón.

Sum er hevur MMR aðrar kontur, sum tónleikaverkætlanir og tiltøk kunnu søkja stuðul av. Hendan reaktiva leiklutin hevur Mentanargrunnur Landsins eisini, og tí er vert at umhugsa at endurmeta leiklutin hjá MMR í mun til Mentanargrunn Landsins og í mun til tey tiltøk og verkætlanir, ráðið eigur at stuðla.

Mentamálaráðið eigur at endurskoða sína almennu stuðulsskipan við tí fyri eyga at fáa meira orku til ta grundleggjandi tónleikamenningina; m.a. til

a) frálæruna í tónleiki (og øðrum skapandi lærugreinum) í fólkaskúlanum
b) at menna skapandi útbúgving; undir hesum tónleikalinju í miðnámsskúlunum
c) at byggja út og menna rútmisku deild Musikkskúlans.

Leikluturin hjá kommununum er at røkja ymisk sløg av virksemi og áhugamálum, sum borgararnir í teirra øki hava í felag. Við øðrum orðum hava kommunurnar ábyrgdina av at skapa trivnað fyri borgararnar. Hetta snýr seg millum annað um at skapa karmar fyri tað frítíðarvirksemi og tey ítriv, sum borgararnir hava tørv á. Innan fyri tónleikamenning eigur kommunali myndugleikin sostatt at skapa meiri ítøkiligar karmar fyri tónlistaliga virksemið í økinum.

Kommunurnar; einsæris ella helst í samstarvi; eiga at skapa umstøður fyri, at teirra ungdómur fær ment seg tónleikaliga á heim- og útbúgvingarstaðnum ella tætt við. Hesir karmar snúgva seg um venjingarhøli, spælistøð og/ella festivalar og annað virksemi, sum gevur tónleikaranum møguleika at royna seg á palli.

Almennu fjølmiðlarnir hava eina almenna tænastuskyldu, sum eigur at verða endurskoðað. Almennu fjølmiðlarnir mugu nú seta út í kortið, hvussu teir skulu viðgera og skjalprógva tónleikaligar hendingar, og í hvønn mun føroyskur tónleikur eigur at verða varpaður út.

Vinnuframagrunnurin (VFG) virkar í hæddini og stuðlar einstakar verkætlanir, ið eru tengdar at vinnuligum útlitum uttan fyri Føroyar. Sostatt kann ein siga, at Vinnuframagrunnurin stuðlar úrslitið av tí, sum Mentamálaráðið, kommunurnar og heimliga vinnan hava taðað og dygdarment við sínum karmum.

Sum er nýtist Vinnuframagrunninum ikki at broyta sína stuðulsskipan til tónleikavirksemi grundleggjandi, men freistirnar eiga at verða longdar, ávegis útgjald kann verða goldið, minstuupphæddirnar kunnu verða hækkaðar og stuðulsparturin kann verða størri.

# Framferðarháttur

Tá ið farið var undir at skriva hetta álit, var arbeiðssetningurin sjálvsagt grundarlagið undir allari tilgongdini. Tað gjørdist tó skjótt greitt, at ikki bar til bara at hyggja at føroyska tónleikapallinum. Hann má síggjast út frá eini størri heild og sum partur av altjóða tónleikapallinum. Neyðugt er eisini at meta um hann við atliti til norðurlendska tónleikapallin, sum hann er ávirkaður av og hevur størsta handilsliga og samskiftisliga sambandið við.

Menningin í tónleikaheiminum er skjót og áhaldandi. Skulu vit finna nýggjar leiðir í at menna føroyska tónleikapallin, er alneyðugt, at vit alla tíðina taka atlit til tað, sum fer fram uttan um okkum. Tað nyttar ikki at koma við uppskotum um nýggjar skipanir ella nýggj átøk í Føroyum, sum ikki hava riggað aðrastaðni ella ikki eru tíðarhóskandi í mun til menningina aðrastaðni.

Tað er kortini ikki sum at siga tað at samanbera Føroyar í altjóða og norðurlendskum høpi. Meðan onnur lond hava mátiskipanir og hagtøl um sítt tónleikavirksemi og síni ársverk, hava vit í Føroyum einki líknandi at samanbera við. Í sjálvum sær sigur hetta ikki bert nakað um støddina av tónleikavinnuni her heima. Tað sigur eisini okkurt um ta raðfesting, vinnan hevur politiskt. Í roynd og veru var telefonbókin tann einasta almenna keldan, sum kundi siga eitt sindur um tónleikavinnuna her heima, hóast hon ikki kundi vísa so nógv. Í sambandi við hagtølini skulu vit tó viðganga, at heldur ikki øll útlendsk tøl, og serliga tøl úr hinum norðurlondunum, eru heilt nýggj. Men roynt hevur verið at nýta tey nýggjastu tølini, sum hava verið atkomilig, við tí fyrivarni, at tey ikki beinleiðis kunnu samanberast, tí keldurnar eru ymiskar.

Hóast vantandi hagtøl hevur verið roynt at lýsa føroyska tónleikavirksemið og tær umstøður, sum leik og lærd hava her heima. Hartil hevur endamálið eisini verið at kanna nærri, hvussu umstøðurnar eru hjá teimum, sum vilja sleppa út í onnur lond við sínum tónleiki. Í hesum sambandi hava samrøðurnar við mongu ymisku einstaklingarnar (serliga tónleikararnar) feløgini og fyritøkurnar havt ein sera stóran og týðandi leiklut.

Niðurstøðurnar her hava verið brúktar at gera eina sokallaða SWOT-lýsing, har hugt verður nærri at styrki, veikleikum, møguleikum og hóttanum. Lýsingin og niðurstøðurnar eru grundarlagið undir tilráðingunum, sum verða lagdar fram seinast í álitinum.

At føroysk tónleikavinna er lítil, sæst tíverri eisini í málburðinum. Stórir partar av vinnuni hava sín málsliga uppruna í enskum, og tað hevur tí ofta verið torført at finna hóskandi orð á føroyskum. Dømi um hetta eru styttingarnar ’majors’ (tey fimm stóru altjóða plátufeløgini) og ’indies’ (óheft plátufeløg; orðið stavar frá enska ’independant’) sum verða brúktar í næstan øllum tí tilfari, sum hevur verið nýtt til hetta álitið. Eitt annað orð, ið verður nýtt, er ’gig’, sum í høvuðsheitinum merkir

framførsla, ið goldið verður fyri[1]. At fáa eitt gig merkir, at ein er biðin at spæla/framføra. Hetta er bert eitt av fleiri dømum um navnorð/styttingar, sum onkursvegna hava fingið pláss í málburðinum, og sum øll brúka á øllum málum uttan at geva sær stórvegis far um týdningin.

Fyri at gera álitið so lætt sum gjørligt at lesa, er nógv tilfar (serliga myndlýsingarnar) tikið við sum ískoyti aftast í álitinum heldur enn at hava tað beinleiðis í tekstinum.

[1] "Gig," var frá byrjan brúkt millum djass-tónleikarar í 1920'unum. Upprunaliga merkir orðið 'gig' okkurt, ið melur, men er eisini knýtt at orðinum 'joke' og 'dance'.

# 1. Altjóða tónleikapallurin

*"We don't like their sound, and guitar music is on the way out."*
Decca Recording Co. vrakar The Beatles í 1962.

Omanfyristandandi endurgeving er tikin við fyri at vísa, hvussu torført tað er, sjálvt fyri fólk í tónleikavinnuni, at spáa um framtíðina hjá eini vinnu, sum áhaldandi mennist.

## Núverandi støða

Tónleikavinnan er ein vinna í stórari broyting, nú ið hetta álitið verður skrivað. Tað er torført at spáa um, hvussu vinnan veruliga fer at megna ta avbjóðing, sum nýggja tøknin (við serligum atliti til talgildan tónleik ígjøgnum alnetið) hevur tveitt tónleikavinnuna út í.

Hyggja vit at tølunum fyri altjóða fløgusøluna í 2003, so síggja tey alt annað enn góð út. Fløgusølan minkaði við 7,6 prosentum í mun til 2002, og hetta er fjórða árið á rað við afturgongd (kelda: BBC News, UK edition, 25. mei 2004). Tað er serliga sølan av stakfløgum, ið er minkað. Sjálvt útgávuvirksemið í sambandi við stakfløgur er minkað við 33 prosentum (apríl 2004). Høvuðsorsøkin til, at júst stakfløgurnar hava verið fyri bakkasti, er, at kundin velur at taka niður løg av netinum ókeypis heldur enn at fara í ein fløguhandil og keypa sama lagið lutfalsliga dýrt.

Tað er ikki bert vegna altnetið og møguleikarnar har at taka niður tónleik ókeypis, at afturgond er. Ungdómurin, sum er tann bólkurin, ið brúkar mestan pening til tónleik/fløgur, hevur nógva aðra undirhaldsvøru at brúka pening til, og sostatt er kappingin um lummapeningin hørð. M.a. er marknaðurin fyri fartelefonir og sjónbandaspøl vaksin 12% í sama tíðarskeiði. Hetta er tekin um, at ungdómurin hevur broytt nýtsluatburð og tikið tey nýggju tilboðini á marknaðinum til sín. Afturgongdin í fløgusøluni er eisini galdandi fyri foreldrini, sum annars vanliga hoyra til tann aldursbólk, ið brúkar stórar nøgdir upp á fløgugávur til onnur (m.a. børnini). Millum annað eru fløgurnar í harðari kapping við DVD í hesum aldursbólki. (kelda: *Overall Music Sales Declining Among Teens – And Their Parents*", www.mi2n.com, 2. oktobur 2004).

Ein hin størsti trupulleikin við alnetinum hevur verið og er framvegis, at brúkarin (serliga ungdómurin) tekur niður tónleikin ólógliga og harumframt tekur lut í einum sokallaðum 'file-sharing', sum er, at tónleikurin fer úr hond í hond uttan peningaligan vinning. Henda skeiva gongdin er torfør at venda, tí tað vísir seg, at tann bólkurin, ið keypti flestu fløgurnar, eisini er tann bólkurin, sum tekur niður ólógligt. Ólóglig niðurtøka ella file-sharing gongur hart út yvir fløgumarknaðin og í síðsta enda eisini tónleikaran. Heili 61% av øllum ungum í aldrinum 12-17 ár í USA hava brent onkra fløgu, sum tey hava lænt frá vinfólkum. Seinastu tølini frá IFPI (International Federation of the Phonographic Industry) vísa, at 35% av øllum seldum fløgum á altjóða marknaðinum eru ólógligt margfaldað. Virðið av hesi sølu er 26,5 milliardir DKK, siga tær seinastu útrokningarnar fyri 2003 (kelda: IFPI report).

Við nýggju lógligu tónleikaportalunum sum til dømis Napster, iTunes og Rhapsody verður roynt at gera alnetið til lógligan miðil og at fáa peningaligt virði av tónleikinum førdan til vinnuna. iTunes selur í miðal eina millión niðurtøkur av netinum um mánaðin, og hvør skering kostar 99 amerikanskar sentar.

Sambært nýggjastu tølunum úr USA fyri 2004 eru útlitini kanska ikki so døpur kortini. Eftir teimum at døma hevur nevniliga verið ein framgongd í fløgusøluni fyrstu 6 mánaðirnar í 2004 upp á 5% (kelda: Pladebranchen.NU, 14. oktobur 2004). Hetta er úrslit av einari anti-pirat-herferð og nýggjum lógligum niðurtøkutænastum/portalum á netinum. At tær ágangandi anti-pirat-herferðirnar hava givið úrslit sæst aftur í hugburðinum hjá teimum, sum taka niður tónleik av netinum. Í mei 2003 hildu 50% av amerikanarum í aldrinum 12-44 ár, at tað er moralskt skeivt at taka niður tónleik ókeypis av alnetinum, og hetta er ein stórur vøkstur í mun til tey 39 prosentini sama tíðarskeið í 2002 (kelda: PEW Internet Project, mei 2004).

Tølini fyri fløgusølu higartil í ár (2004) á altjóða marknaðinum vísa eisini eina positiva gongd í mun til tey seinastu árini, tá ið altjóða marknaðurin hevur verið í kreppu. Fyrstu seks mánaðirnir í ár vísa ein vøkstur á 1,7%. Hartil er vert at nevna, at 60% av øllum fløguútgávum vanliga eru seinnu helvt av árinum. Í 2004 vóru tað fleiri kend nøvn sum til dømis Robbie Williams, Kylie Minogue, Eminem, U2 og Britney Spears, sum komu út við nýggjum fløgum, ið fara at hava góða ávirkan á søluna á altjóða marknaðinum (kelda: Pladebranchen.NU, 14. oktobur 2004).

Eitt, sum kanska er áhugavert fyri føroyskar bólkar, sum spæla andaligan tónleik, er, at CCM-(Contemporary Christian Music)marknaðurin er vaksin munandi hesi seinnu árini. Í 2004 hevur framgongdin í søluni av CCM-fløgum verið 15%. Tað tykist sum, at hetta slagið av tónleiki hóskar til tað rákið í løtuni, sum er, at ung leita eftir einum innihaldsríkum boðskapi fyri at vinna á ruðuleika og ótryggleika. CCM-tónleikur er tó ikki ‚bert' tað, ið vit her heima skilja sum andaligan tónleik, tí hann fevnir eisini um eitt nú rapp, hipp-hopp og tekno, sum hava fingið eitt andaligt innihald í tekstin (kelda: Børsens Nyhedsmagasin, 16. novembur 2004).

Í mong ár hevur tónleikavinnan verið merkt av, at tað eru fleiri risastór plátu- og útgávufeløg, sum mynda og stýra altjóða tónleikavinnuni. Tey stóru altjóða plátufeløgini (kallað "The Big 5", sum eru Universal, EMI, Sony, Warner Music og BMG[2]) hava sitið á umleið 80 prosentum av altjóða marknaðinum ( kelda: CNN.com, Michael Coren, 23. august 2004) men soleiðis tykist ikki vera longur. Av tí at tað hevur verið næstan ógjørligt hjá flestu tónleikarunum at sleppa ígjøgnum nálareygað hjá hesum stóru plátufeløgunum, hava teir funnið aðrar vegir og onnur minni feløg, kallað 'indies' (independents) ella hava valt at geva út tónleik sín á egnum forlagi.

Alnetið hevur eisini skapt nýggjar karmar og givið nýggjar møguleikar at breiða út tónleikin, soleiðis at hann ikki nýtist at vera ítøkiliga tøkur í einum fløguhandli fyri at røkka brúkaranum. Nú eru online-útgávufeløg, sum fyri eitt lítið byrjanargjald hjálpa einum og hvørjum sáttmálaleysum ('indie') tónleikara at selja sína fløgu online hjá felagnum.

[2] The Big 5 er vorðið til The Big 4, síðan Sony og BMG løgdu saman 5. august 2004.

Eitt av hesum vælumtóktu feløgunum er CD Baby. Medio 2004 seldu 47.000 tónleikarar sínar fløgur ígjøgnum felagið. Harafturat bjóðar felagið, at fløgurnar verða tøkar á øðrum stórum og lógligum tónleikaportalum, sum annars bert hava viljað selt tónleik hjá sáttmálabundnum tónleikarum. CD Baby samráðist sostatt við aðrar online-fyritøkur vegna tónleikararnar. Stóri munurin (og fyrimunurin) við CD Baby í mun til tey 'vanligu' plátufeløgini er, at CD Baby sjálvt bert tekur 9% av gjaldinum fyri skeringarnar. Tónleikarin fær sostatt 91%. Hetta er nógv meiri, enn tónleikarin hevði fingið frá einum stórum plátufelagi. Í mun til hinar online-portalarnar sum t.d. iTunes hevur CD Baby gjørt tað til sítt vørumerki at veita tónleikarunum beinleiðis tænastu og hjálp (kelda: grein eftir Kristin Thomson, 8/10/2003).

Onnur rák í tónleikavinnuni eru m.a. hesi (úr USA):

- Bert 5.000 av teimum 27.000 útgávunum í 2002 vórðu seldar í fleiri enn 1.000 eintøkum.
- Tað er hvørki í útvarpi ella á fløguspælara, at mest verður lurtað eftir tónleiki, men í sjónbandaspølum.

Hinvegin nýtist tað ikki at síggja so dapurt út, tí:

- sjónbandaspøl selja eisini tónleik. Átta % av teimum 12 til 17 ára gomlu og 10% av teimum 18 til 24 ára gomlu í USA siga, at sangir í sjónbandaspølunum hava fingið tey at keypa fløgur.

## Framtíðarútlit

Tónleikavinnan er farin at rakna við og tykist so smátt at hava góðtikið, at alnetið og talgildur tónleikur er vegurin fram.

Tónleikavinnan hevur annars ígjøgnum tíðina fingið nógvar deyðadómar; fyrst við at útvarpið, plátan og fløgan komu, og nú seinast alnetið. Men onkursvegna hevur tónleikavinnan lagað seg til nýggju tøknina. Soleiðis fer tað eisini at verða, tá ið tað snýr seg um altnetið.

Í mong ár hevur tónleikur snúð seg um skap, snið og hvussu tónleikurin er ílatin (Hjárit II). Vinnan gjørdist tó skjótt varug við, at tað lønar seg betur eisini at selja ílatið heldur enn bert innihaldið/tónleikin.

Í flestu førum hevur tónleikur verið ein ítøkilig vøra, men í dag er tónleikur vorðin ein talgild tænasta á alnetinum og í sjónvarpinum og fartelefonum. Fartelefonin, sum fyri einans 10 árum síðan ikki var hvørs mans ogn, hevur nú fingið ein alsamt størri týdning fyri tónleikavinnuna. Øll hava fartelefonina uppi á sær og brúka hana til nógv annað enn bert til at samskifta við, og hetta hevur tónleikavinnan tikið til sín við t.d. at selja ringitónar. Í 2003 hevði sølan av ringitónum til fartelefonir í Bretlandi eitt virði á 90 milliónir pund, og eftir øllum at døma var hon í 2004 verd 120 milliónir pund (kelda: Musikerens e-nyt, 29. oktobur 2004). Men tað nýggjasta á skránni er at selja 'memorycard' sum kunnu spælast á fartelefonini. Nýggja fløgan hjá Robbie Williams, sum plátufelagið EMI gevur út, kann bæði keypast sum vanlig fløga og sum memorycard til fartelefonina. Plátufeløgini royna sostatt at nýta øll tey amboð, teimum stendur í boði, fyri at breiða út tónleikin á nýggjan hátt.

Um stutta tíð slepst til allan tónleik, sum er tikin upp á fløgu, band, teldu o.s.fr. við at fara inn á ein fjarskotnan telduservara; eina sokallaða Celestial Jukebox. Fyri brúkaran verður tónleikur tá ein spurningur um atgongd heldur enn um ogn. Endaliga úrslitið verður, at ein kann fáa 'alt, altíð, allastaðni'.

Menningin í tónleikavinnuni tykist sostatt liggja í hondunum á brúkaranum heldur enn í stóru altjóða plátu- og útgávufeløgunum. Men sannlíkt er ikki, at fløgurnar hvørva heilt av marknaðinum í bræði. Upp á seg er talgildur tónleikur eitt rættiliga nýtt fyribrigdi, ið hongur neyvt saman við menningini í tøkni- og telduheiminum sum heild; og ikki minst munar tað, at breiðbandið breiðir seg.

Leikluturin hjá stóru plátu- og útgávufeløgnum broytist í løtuni. Hann fer at broytast enn meira í framtíðini, men feløgini fara framvegis at hava ein avgerandi leiklut í útbreiðsluni av tónleiki. Men fleiri og fleiri tónleikarar fara uttan iva at breiða út sín tónleik sjálvir, og sostatt fara plátufeløgini at missa sín at kalla einkarrætt í tónleikavinnuni, sum teir annars hava havt í fleiri áratíggju.

Útbreiðslan av tónleiki í framtíðini fer at snúgva seg um talgilda *útvegan* heldur enn *útbreiðslu* soleiðis at skilja, at tað verður brúkarin, sum togar út tað, hann ynskir, heldur enn at eitt felag trýstir nakað út á marknaðin. Tað verður neyvan talan um nakra hópframleiðslu av einari vøru, sum vit kenna hana í dag, tí alnetið ger tað møguligt hjá brúkaranum at fáa beinleiðis atgongd til upprunalagið.

Brúkarin fær í framtíðini størri ræði yvir tónleikaútbreiðsluni, og sostatt fer tað at hava alstóran týdning at hava gott/neyvt samband við brúkaran. Brúkarin/kundin er sum oftast sera trúgvur mótvegis tónleikaranum, og tann serliga tignarstøða, sum tónleikarin í dag hevur, fer eisini at mynda tónleikavinnuna í framtíðini, tí henda tignarstøðan røkkur longri og stingur djúpari enn bert til tónleikin. Tónleikarin kann við alnetinum hava beinleiðis samband við brúkaran/fjepparan. Tí verður mett, at tað um nøkur ár ikki verður talað um 'the music industry' men um 'the musicians business'.

Samstundis fer høvuðsinntøkan hjá online-plátusølunum/feløgunum at verða vinningurin av søluni av vitanini, sum tey hava um brúkaran á alnetinum. Megna hesi feløg at staðfesta nýtslu- og rørslumynstrið hjá brúkaranum á netinum og byggja upp dátugrunnar við fjepparaskráseting, kunnu tey selja øðrum feløgum hesa vitan.

Hinvegin er meiri torført at síggja, hvussu tónleikarin í framtíðini skal vinna sær pening úr einari vøru, sum jú í flestu førum verður breidd út uttan stórvegis kostnað. Tær mongu nýggju talgildu tónleikafyritøkurnar tykjast skipa seg eftir hesum trimum nýggju skipanunum:

1. Equity-skipanini (break-even-and-profit) ið gevur møguleika at taka niður tónleik ókeypis. Best umtókti bólkurin (ein um mánaðin) fær plátusáttmála. Eftir hetta verða vanligir søluhættir nýttir; t.e. antin sum fløgur í fløguhandlum ella sum talgildur tónleikur á netinum. Eitt dømi um hetta slagið av fyritøku er www.garageband.com
2. Haldara-skipanini, ið ein kann tekna seg at halda á heimasíðuni og síðan rinda fyri tænasturnar. Henda skipan tykist vera tann, ið stóru plátufeløgunum dámar best.

3. Hybrid-skipanini, ið hevur ymiskar inntøkumøguleikar. Hon er eitt bland av ókeypis og ikki-ókeypis talgildum tónleiki og harumframt av lýsingainntøkum og sølu av brúkaraprofilum. Dømi um hetta slagið av fyritøku er www.cdnow.com

## Samandráttur

Samanum tikið kann sigast, at rákið í altjóða tónleikavinnuni er hetta:

- tónleikur gerst meiri og meiri ein tænasta heldur enn ein ítøkilig vøra
- tónleikur er ein spurningur um atgongd, ikki ogn
- hópframleiðsla er ikki neyðug, tí øll hava atgongd til upprunalagið
- brúkarin útvegar sær tónleikin sjálvur; feløgini breiða hann ikki út
- brúkarin fær størri ræði, meðan stóru feløgini missa ræði
- tónleikarin hevur beinleiðis atgongd til fjepparan
- vitanin um brúkaran/fjepparan er ein stór inntøkukelda
- „the music industry“ fer at broytast til „the musicians business“.

# 2. Norðurlendski tónleikapallurin

## Svøríki skarar framúr

Samanborið við norðurlendsku grannalond okkara skarar Svøríki framúr í altjóða tónleiki. Í mong ár hevur Svøríki verið millum fremstu lond í heiminum, tá ið tað snýr seg um at flyta út tónleik og sjálvsagt eisini, tá ið tað snýr seg um útflutningsinntøkur í hesari vinnu. Sjálvir siga sviar orsakirnar til góðu úrslitini vera, at landið hevur eina vælvirkandi og útbygda útbúgvingarskipan. Ikki bara gevur hon tónleikarunum góðan førleika, men hon mennir eisini áhoyraran og ger hann meiri krevjandi og krittiskan. Hetta hevur so aftur góða ávirkan á tónleikamenningina, tí áhoyrarin krevur meira.

Serliga mundi tað vera tónleikabólkurin ABBA, sum av álvara setti ferð á tónleikaútflutningin í Svøríki. Hesin bólkur læt útlendskt eygu upp fyri svenskum tónleiki og opnaði dyrnar fyri øðrum tónleikabólkum. Eisini verður hildið, at tað liggur í svenska lyndinum og gomlu vísusangtraditiónini at royna at gera góðar sangir.

Svøríki hevur seinastu 30 árini bygt upp eina góða altjóða tónleikaskrá, ið er á høgum listaligum og yrkisligum støði. Hetta hevur givið Svøríki eina aðra støðu, enn hini norðurlondini hava. Eitt nú hava flestu majors-plátufeløgini lagt sína skandinávisku deild í Svøríki. Hava t.d. finskir, norskir ella danskir tónleikarar ein sáttmála við eitt av ‘the majors’, verða inntøkur teirra goldnar ígjøgnum svensku deildina og skrásettar sum ‘svenskur’ útflutningur. Við hesum tykjast svensku tølini enn hægri.

Men í dag hevur Svøríki ein hóp av sangskrivarum á altjóða støði, sum skriva løg fyri stóru sangstjørnurnar. Tað verður hildið, at tað eru umleið 300 sangskrivarar í Svøríki, sum megna at liva av at skriva løg antin til sín sjálvs ella til onnur. Hetta, at skriva løg til onnur, er so við og við vorðið ein stórur partur av útflutningsinntøkuni.

Svøríki hevur eisini verið skjótt at taka undir við sonevnda mainstream-rákinum og hevur torað at gjørt nakað burtur úr popp-tónleikinum og stuðla honum. Afturímóti hava hini norðurlondini í størri mun hildið seg til at stuðla tónleiki, sum vendir sær til ein smalan kundaskara, og sum tí ikki gevur so stórar útflutningsinntøkur sum poppurin.

Samanberandi tølini um gongdina í tónleikavinnuni í Norðurlondum eru ikki nógv og í flestu førum gomul. Í útgreining, sum norðurlendski ídnaðargrunnurin hevur gjørt um møguleikarnar í norðurlendskum tónleikaídnaði og um tørvin at orða ein politikk á hesum vinnuøkinum, er ein roynd gjørd at savna ymisk hagtøl. Vit hava valt at tikið nøkur av hesum hagtølum við her, hóast tey eru í eldra lagi og kanska ikki nóg væl lýsa støðuna og gongdina í dag.

Til at lýsa týdningin av tónleikavinnuni eru tøl um fyritøkur, ársverk og gongdina frá 1995-1999. Hesi tøl vísa ein vøkstur í talinum av ársverkum í tíðarskeiðinum 1995-1999 í øllum norðurlondum uttan Danmørk, har ið gongdin hevur verið negativ.

**Mynd 1: Tónleikaarbeiðsmarknaðurin**

| 1999[3] | Tal á fyritøkum | Tal á ársverkum | %-vøkstur 95-99 | %-vøkstur í ársverkum |
|---|---|---|---|---|
| Danmørk | 1.918 | 3.057 | 11 | -5 |
| Finnland | 2.143 | 3.108 | 50 | 10 |
| Ísland | 107 | 948 | 16 | 9 |
| Noreg | 1.177 | 9.125 | 14 | 35 |
| Svøríki | 3.839 | 8.292 | 20 | 9 |

Kelda: (Power, D. "Behind the Music", Profiting from Sound: A system approach to the dynamics of the Nordic Music Industry, March 2003, Nordic Industrial Fund)

Vøksturin í ársverkum hevur serliga verið í smáum, óheftum fyritøkum og í fyritøkum, sum fáast við framleiðsluvirksemi. Í Finnlandi og Svøríki hevur tó eisini verið stór framgongd í talinum av útgávufeløgum og tilhoyrandi virksemi. Harafturímóti er einki útgávufelag (publishing) í Íslandi, men talið av fyritøkum har er (sjálvt við avmarkaða marknaðinum) upp á seg hægri enn í Danmørk og Noregi. Øll londini hava eisini havt ein vøkstur í talinum av óheftum plátufeløgum. Stóru 'major' plátufeløgini hava hinvegin skert ella umskipað virksemið í øllum londunum uttan Finnlandi.

Tað eru nógv feløg, sum í hesum døgum umskipa virksemið fyri at styrkja profilin og fyri at verða betur fyri at standa ímóti tí kreppu, sum altjóða tónleikamarknaðurin er í. Tey royna at spjaða virksemið yvir fleiri økir, og sostatt eru mørkini eitt sindur kám, tí plátufeløg, útgávufeløg og promotionfeløg hava felags arbeiðsøkir. Størru plátufeløgini, serliga majors, taka alsamt meiri lut í at marknaðarføra, selja, breiða út og at nýta skrá-tilfeingið (catalogue material). Óheftu feløgini gera seg hinvegin meira galdandi innan fyri A&R (Artist & Repertoire) og at finna nýggj talentir og taka størri lut í tí skapandi menningartilgongdini. Tey óheftu feløgini spæla ein alsamt størri leiklut, tá ið tað snýr seg um at finna nýggj nøvn, men teirra søluinntøkur spæla ikki ein samsvarandi stóran leiklut í tjóðarbúskapinum.

Hvussu væl tað gongur hjá nýggjum lokalum tónleikarum at koma framat og víðari út á aðrar marknaðir veldst í stóran mun um støðuna hjá majors-plátufeløgunum. Tað vísir seg, at tá ið tað, sum nú, gongur illa at selja fløgur á altjóða marknaðinum, verður virksemið hjá tónleikafeløgunum í Norðurlondum avmarkað, og minni orka verður sett av til at marknaðarføra og promovera nýggjar lokalar tónleikarar.

Mynd 2 vísir fløgusøluna í teimum fimm londunum og virðið, ið hon hevur. Harumframt sæst eisini, hvussu nógvan pening tann einstaki brúkar til fløgur. Tað er áhugavert at leggja til merkis, at nýtslan fyri hvørt fólkið í Svøríki ikki er serliga høg

[3] Tølini eru bert fram til 1999, og tí ber illa til at fáa eina betri heildarmynd av gongdini, sum hon er nú. Hóast nýggjari tøl finnast, ber ikki til at samanbera tey, tí keldurnar eru ikki tær somu, og tískil er torført at samanbera yvirhøvur. Tó siga tey nýggjastu tølini fyri Svøríki, at tað eru umleið 7.000 ársverk í tónleikavinnuni (2003). Hetta er sostatt ein minking í mun til 1999.

sammett við hini londini. Tíverri siga tølini einki um, um nýtslan fer til útlendskar fløgur (innflutning) ella til svenskar fløgur. Hóast nýtslan í Íslandi er tann størsta í Norðurlondum, vita vit (frá tónleikaráðstevnuni 4. oktobur 2004) at størsti parturin verður nýttur til íslendskar fløgur, og hetta er bert mennandi fyri lokala marknaðin/tónleikin.

**Mynd 2: Fløgusøla og retail-virði**

| Ár 2000 | Fløgusøla (milliónir eindir) | Retail-virði milliónir DKK | Seldar eindir fyri hvønn íbúgva | Nýtsla í DKK fyri hvønn íbúgva |
|---|---|---|---|---|
| Danmørk | 19.5 | 1.316 | 3.7 | 258 |
| Finnland | 11.4 | 682 | 2.2 | 132 |
| Ísland | 0.8 | 86 | 2.7 | 322 |
| Noreg | 15.0 | 1.368 | 3.3 | 306 |
| Svøríki | 28.2 | 1.903 | 3.2 | 215 |

Kelda: IFPI (International Federation of the Phonographic Industry) 2001

Tað er sjálvandi áhugavert at hyggja at, hvussu tað hevur gingist at selja fløgur seinnu árini, og á mynd 3 sæst, hvussu nógv sølan er vaksin í teimum fimm londunum.

**Mynd 3: Prosentvøkstur í tíðarskeiðinum 1991-2000**

| Prosentvøkstur 1991-2000 | Seldar eindir | Retail-virði | Seldar eindir fyri hvønn íbúgva | Nýtsla fyri hvønn íbúgva |
|---|---|---|---|---|
| Danmørk | 74.1 | 27.8 | 68.1 | 23.4 |
| Finnland | -19.2 | 14.8 | -20.7 | 11.5 |
| Ísland | 5.7 | 49.3 | -2.5 | 37.7 |
| Noreg | 29.1 | 96.9 | 21.9 | 85.8 |
| Svøríki | 24.7 | 69.2 | 21.0 | 64.2 |

Kelda: (Power, D. "Behind the Music", Profiting from Sound: A system approach to the dynamics of the Nordic Music Industry, March 2003, Nordic Industrial Fund)

Sum tað sæst, er fløgusølan í Finnlandi minkað rættiliga nógv (stívliga 20%). Í Íslandi er hon minkað eitt sindur, men í hinum trimum londunum er hon vaksin. Størsti vøksturin er í Danmørk (stívliga 68%). Í Noregi er sølan vaksin næstan 100%, tá ið tað snýr seg um retail-virðið í fløgusøluni.

Tølini omanfyri eru ikki nóg nýggj at staðfesta, um altjóða kreppan á fløgumarknaðinum hevur rakt Norðurlond, men hyggja vit at nýggjari tølum fyri tónleikaútflutning (vørur) á mynd 4, sæst, at vøruútflutningurin (fløgur) úr Danmørk er minkaður, meðan hann er vaksin í Noregi og serstakliga í Svøríki.

Tónleikaútflutningurin (vørur) sigur tó einki beinleiðis um fløgusøluna í hesum londunum. Tónleikaútflutningurin av vørum (fløgum) sigur heldur ikki alt um tær inntøkur, sum eitt land fær úr útlondum av tónleiki. Løg og tekstir geva eisini royalties og tænastuinntøkur.

**Mynd 4: Tónleikaútflutningur (vørur) úr Danmørk, Svøríki og Noregi (milliónir DKK)**




Kelda: Analyse af dansk musikeksport 2002, Cowi, Kunststyrelsen

Verður hugt at útflutningsvirðinum av royalties hjá teimum trimum londunum, sær gongdin soleiðis út:

**Mynd 5: Útflutningsvirðið av royalties (milliónir DKK)**




Kelda: Analyse af dansk musikeksport 2002, Cowi, Kunststyrelsen

Útflutningsvirðið av royalties er tann upphæddin, sum upphavsrættarfeløg; t.d. Koda, NCB og Gramex; krevja inn vegna sangskrivarar, tónaskøld, tekstsmiðir, sangarar og tónleikarar, tá ið hesir framføra, ella verk teirra verða framførd í øðrum londum.

Henda upphæddin er sostatt rættiliga ávirkað av, um ein tónleikabólkur fær gjøgnumbrot á altjóða hittlistunum. T.d. tá ið danski bólkurin Aqua fekk altjóða gjøgnumbrot, sást hetta beinleiðis aftur í royalty-inntøkutølunum í Danmørk.

Hagtølini snúgva seg ikki um tænastuútflutningsvirðið. Hetta virðið er bert ein meting og tískil ikki heilt eftirfarandi. Harumframt er bert mett um virðið í 2002, so einki samanberingargrundarlag sigur nakað um gongdina frá ári til annað.

**Mynd 6: Tænastuútflutningsvirðið í 2002 (milliónir DKK)**




Kelda: Analyse af dansk musikeksport 2002, Cowi, Kunststyrelsen

Taka vit Danmørk sum dømi, fevna tænastuinntøkur um loyvisinntøkur hjá donskum plátufeløgum, framførslur hjá donskum tónleikarum í útlondum, inntøkur av tí nýtslu, sum útlendskir tónleikarar hava í donskum upptøkuhølum, inntøkur hjá donskum framleiðsluleiðarum, sum arbeiða við útlendskum bólkum og inntøkur úr útlondum til donsk tónleikaútgávufeløg. Býtið ímillum tær tríggjar inntøkukeldurnar í teimum trimum londunum sær soleiðis út í prosentum og tølum (milliónir DKK):

**Mynd 7: Býtið í prosentum og milliónum DKK av útflutninginum í 2002**




Kelda: Analyse af dansk musikeksport 2002, Cowi, Kunststyrelsen

Eins og í øðrum londum er tónleikurin í Norðurlondum í harðari kapping við aðrar undirhaldsvørur sum t.d. sjónbandaspøl og DVD. Harafturat er tónleikakeyp á netinum og ígjøgnum aðrar sølurásir vaksandi mótsett tí í vanligum fløguhandlum.

Hóast størri í øðrum londum, er ólóglig niðurtøka og margfalding eisini er ein stórur trupulleiki í Norðurlondum. Eitt annað rák er, at færri men størri tónleikaketur standa fyri fløgusøluni.

Eftir øllum at døma er tónleikaútflutningurin í Norðurlondum vaksin seinastu árini. Serliga í Svøríki, sum leingi hevur havt ein vøkstur og fingið góða altjóða umrøðu og eksponering. Hóast hini londini; serliga Ísland, Finnland og Noreg; eisini hava havt størri altjóða eksponering, hevur hon ikki rættiliga víst seg aftur í øktum útflutningsinntøkum.

Men vánaliga støðan á altjóða marknaðinum sæst eisini aftur í Norðurlondum og hevur minkað útflutningsvøksturin og enntá steðgað honum í Danmørk. Seinastu kanningarnar frá IFPI vísa, at tann framgongd, sum í seinastuni tykist vera (smb. Kap. 1) á altjóða fløgumarknaðinum, ikki enn sæst aftur í Danmørk, Svøríki og Finnlandi, tí her er sølan minkað við 10 prosentum fyrstu seks mánaðirnar í 2004. Verður hugt at øllum Evropa, so er afturgongdin 5% higartil í 2004, og av evropisku londunum hevur Bretland við einum lítlum vøkstri á 0,6% gjørt afturgongdina minni (kelda: Pladebranchen.NU, 14. oktobur 2004).

## Stuðul til tónleik í Svøríki, Danmørk og Íslandi

Tað er munur á, hvussu londini stuðla mentan, og munur er eisini á, hvat verður roknað sum mentan í ymisku londunum. Mentamálaráðini í londunum umsita ikki somu økir; t.d. er ítrótt ikki við í onkrum landi. Tí mugu samanberingarnar takast við fyrivarni.

**Svøríki**
Svøríki stuðlar list og mentan við 16 milliardum SEK um árið (t.e. 30% av samlaðu nýtsluni á mentanarøkinum; hini 70 prosentini eru privatnýtsla). Av teimum 16 milliardunum ber staturin 47%, og kommunurnar bera 43%. Hini 10 prosentini eru stuðul úr ymiskum økisráðum.

Innan fyri tónleik fær "Svenska Rikskonserter" 65 milliónir SEK í stuðli um árið. Svenska Rikskonserter er ein tjóðartónleikapallur, sum hevur til endamáls at stuðla tónleikaframleiðslu í landspørtum og øðrum smærri landafrøðiligum eindum. Svenska Rikskonserter hevur eisini egið útgávufelag; Caprice Records.

Stovnurin "Länsmusik" hevur virkað síðan 1988. Hann fær 195 milliónir SEK um árið. Svøríki hevur ellivu yrkissymfoniorkestur og kamarorkestur, og hesi fáa tilsamans 85 milliónir SEK í stuðli. Harafturat verða ávikavist 10 og 19 milliónir latnar óheftum tónleikabólkum og fyriskiparum. Tann parturin, ið eitur framleiðsla, útbreiðsla og marknaðarførsla av listarligum og mentanarligum ljóðupptøkum, verður stuðlaður við 10 milliónum SEK. Hóast Svøríki stuðlar mentan og list við, eftir okkara meting, stórum upphæddum, er samlaði stuðulin 'bert' 1.1% av BTÚ.

Á tónleikaráðstevnuni í Norðurlandahúsinum 4. oktobur 2004 varð serligt ljós varpað á tað svenska sermerkið, at tónleikafrálæran í skúlaverkinum í Svøríki er góð og nakað, ið verður raðfest frammarlaga. Fyrimunurin við einum slíkum politikki er ikki bert, at børn og ungdómar verða tilvitað um teirra skapandi evni men eisini, at børn og

ung, ið eru von at lurta eftir tónleiki og hava eina breiða vitan um tónleik, gerast kræsnir áhoyrarar. Hetta mennir tónleikin sum heild.

Svøríki hevur ikki álagt fjølmiðlunum nakra kvotu at spæla svenskan tónleik eftir. Hildið verður, at svenskur tónleikur má vera eins góður sum tann útlendski fyri at verða spældur á útvarps- og sjónvarpsræsunum í Svøríki. Hetta er eisini við til at betra um tónleikadygdina. Tað skerst tó ikki burtur, at har eru aðrar umstøður og størri marknaður enn her heima; serliga um hugsað verður um mentanarliga og málsliga avmarkaða økið, sum Føroyar eru, sammett við Svøríki.

Umframt stuðulin, sum er nevndur omanfyri, er annar stuðul, ið verður latin einstøkum listafólkum; harímillum eisini tónleikarum. Verður samlaði stuðulin til mentan roknaður upp á fólkið, brúkar Svøríki umleið 1.770 krónur fyri hvønn íbúgva um árið.

**Danmørk**
Í 2003 vórðu slakar 13 milliardir brúktar í stuðli til mentan í Danmørk. Landsmyndugleikarnir; t.e. fíggjarlógin og veddingarfæið; komu við 37 prosentum av hesum milliardum, kommunurnar við 59 prosentum, amtini við trimum prosentum og høvuðsstaðarøkið við einum prosenti. Samlaða játtanin frá fíggjarlógini og veddingarfænum er stívliga 3,2 milliardir (lurtaragjald o.t. undantikið) ið verða býttar sum millum annað rakstrarstuðul til 40 statsmentanarstovnar og aðrar statsgrunnar, sum umsita mentanarpeningin; t.d. Statens Kunstfond, Kunstrådet og Det Danske Filmsinstitut. Tónleikur verður stuðlaður við 989 milliónum frá øllum veitarunum. Av hesum lata fíggjarlógin og veddingarfæið 475 milliónir.

Fyri at skunda undir tónleikamenningina hevur danska mentamálaráðið gjørt eina tónleikaætlan fyri 2004-2007. Í hesum tíðarskeiði verða játtaðar tilsamans 101,6 milliónir afturat teimum, sum annars verða játtaðar á fíggjarlógini hvørt ár. Átøkini eru nevnd í virkissætlanini ”Liv i musikken” og innihalda m.a. ein stuðul á 30 milliónir til rútmisk spælistøð, ferðastuðul til tónleikarar upp á 8 milliónir og hartil nýggjar tónleikaútbúgvingar á Musikkonservatoriet; m.a. produsaraútbúgving á kandidatstøði og eina sangskrivaraútbúgving. Harafturat eru ymisk átøk í sambandi við upphavsrætt; m.a. viðvíkjandi meira kunning um upphavsrætt og margfalding.

Vert er at nevna, at stuðulin, ið varð latin rútmiskum spælistøðum í 2004 var 25,7 milliónir, og stuðulin til musikkskúlar var 74,9 milliónir. Tað hevur ikki eydnast at finna uppgerð yvir, hvussu stórur partur av samlaða BTÚ verður latin til mentan í Danmørk, men tað er áhugavert at hyggja at muninum á býtinum ímillum landsins myndugleikar og teir kommunalu myndugleikarnar í Svøríki og Danmørk. Almenna Danmørk brúkar 1.530 kr fyri hvønn íbúgva til mentan um árið, og av hesum fara 140 kr til tónleik.

**Ísland**
Ísland stuðlar list og mentan við sløkum 500 milliónum DKK um árið. Hetta er 21% av upphæddini, sum mentamálaráðið (útbúgving, mentan og gransking) umsitur, og tað er 2,4% av BTÚ. Hesin prosentpartur er stórur, samanborið við onnur lond. Tað verður tó viðmerkt í hesum skjalinum, at hagtølini geva eina skeiva ella ófullfíggjaða mynd av listaliga virkseminum, um ein bert hyggur at almenna stuðlinum, tí nógvur stuðul er tengdur at kommunum og lokalsamfeløgum og hartil eisini privatum

fyritøkum og stovnum. Ísland brúkar runt roknað 1.785 kr til mentan fyri hvønn íbúgva um árið (tá eru kommunurnar ikki tiknar við eins og í Svøríki og Danmørk).

Almennu Føroyar seta góðar 60 milliónir av til alt mentanarøkið; undir hesum ítrótt, kirkjumál, loftmiðlar og annað. Hetta er 1.250 kr fyri hvønn íbúgva um árið.

**Mentanarpolitikkur í Norðurlondum**
Mentanarpolitikkurin í øllum londunum tekur støði í ikki-kommersiellum tónleiki og leggur dent á meiri 'listaligan' tónleik heldur enn ta poppuleru tónleikagreinina. Almenni mentanarpolitikkurin í londunum tekur ikki handilslig atlit, og menningin í tónleikavinnuni fellur ikki nógv væl inn í mentanarpolitikkin, tí hvørki mentanaratlit í sambandi við vinnupolitikkin ella vinnuatlit í sambandi við mentanarpolitikkin verða tikin í nóg stóran mun. Tískil dettur tann meiri breiði, fólksligi tónleikurin ímillum tveir stólar. Hann verður ikki raðfestur frammarlaga í mentanarpolitikkinum, og hinvegin verður hann ikki roknaður sum nóg vinnuligur til at sleppa við í vinnupolitikkin!

Øll fimm norðurlondini hava eitt væl útbygt undirvísingarkervi og nógv tilfeingi til tónleikarar. Harafturat eru komnar nýggjar útbúgvingar og økt skeiðvirksemi í at umsita, selja og marknaðarføra tónleik; serliga í Danmørk, Finnlandi og Svøríki. Annað, ið sermerkir tey flestu londini, er, at tað tónleikaliga og listaliga støðið er høgt, men hetta verður ikki samsvarað við einum eins høgum vinnu- og handilsstøði (Svøríki undantikið). Tað er tørvur á vitan, ítøkiligum royndum og samskipan í vinnuliga og handilsliga partinum av tónleikaheiminum, men hetta er spakuliga um at broytast til tað betra.

Tá ið tað snýr seg um Koda og onnur innkrevjingarfeløg, virka hesi sera væl í øllum fimm londunum. Trupulleikar eru tó við innkrevjing fyri upphavsrættindi í sambandi við nýggjar tónleikamiðlar sum t.d. ringitónar. Hesin partur er ikki loystur í nøkrum landi, og hetta er tískil eitt, ið krevur ábøtur.

## Samandráttur

Samanumtikið kann sigast, at støðan í Norðurlondum vísir, at:

- sølan (fram til ár 2000) og tal av ársverkum í tónleiki hevur verið vaksandi
- ein alsamt størri partur av inntøkunum stavar frá øðrum virksemi enn beinleiðis fløgusølu; m.a. sangskriving, talgildari útbreiðslu og tónleikasjónbondum
- tónleikaliga og listaliga høga støðið ikki er samsvarað við eins høgum støði í handils- og vinnukunnleika (Svøríki undantikið)
- útbúgvingarkervið fyri tónleikarar er væl útbygt, men tann umsitingarligi parturin ikki er eins væl fyri, hóast hann er í menning
- øll londini hava havt vøkstur í tónleikaútflutningsvirðinum
- innkrevjingarfeløgini í øllum londunum virka væl.

# 3. Føroyski tónleikapallurin

**Tónleikur og menniskja**
Í fólkalívsfrøðiligum høpi kann tónleikurin sigast at vera ein eldri og meiri upprunalig birting enn talaða málið. Higartil vita vit ikki um nakað samfelag ella nakra mentan við ongum tónleiki/sangi. Tónlistaligt virksemi er eitt neyðugt amboð hjá tí einstaka í samfelagnum at sýna kenslur, upplivingar og royndir, tí tónlistin er eitt non-verbalt samskiftisamboð at bera fram upplivingar, kenslur og royndir við og gera tær ítøkiligar.

Í barnauppalingini vísir tónleikurin seg eisini at stimbra og ávirka innlæringina í øðrum lærugreinum sum t.d. støddfrøði og máli, samstundis sum tónleikurin skundar undir og ger børn medvitað um síni skapandi evnir. Í einum nútímans samfelag sum okkara er tónleikur eisini ein týðandi partur av mentanarliga virðinum, og øll eiga at hava atgongd til hetta virðið; sum lurtandi ella luttakandi.

Fyri okkum føroyingar hevur sangurin havt alstóran týdning og hevur tað enn; kanska meiri her enn í nógvum øðrum londum um okkara leiðir. Í fleiri øldir hava vit borið mentanararvin víðari frá einum ættarliði til næsta við at syngja, kvøða og siga søgur. Fyrsta ljóðførið innan fyri kirkjugátt, urgan, kom ikki higar fyrr enn í 1830'unum. Bakar Hansen, navnframi bakarin av Borgundarhólmi, sum flutti til Føroya í 1870'unum, sigst vera ein tann fyrsti, sum kom higar við ljóðførum[4], men áðrenn hetta vóru eisini einstakir aðrir, ið høvdu ognað sær og spældu ljóðføri. Bakar Hansen setti veruliga gongd á kórsang og samanspæl í smáum og størri bólkum, og sambært Williami Heinesen dugdi Bakar Hansen at spæla øll ljóðføri, sum vóru til, og eisini tey, sum ikki vóru til.

Men samanborið við onnur lond sum t.d. Danmørk og Ongland er okkara tónleikasøga sera nýggj, og tá ið tosað hevur verið um ljóðføristónleik, hevur hann ikki verið stórur partur av okkara siðvenju. Men í dag fevnir virksemið vítt og er ein týdningarmikil miðil hjá nógvum ungum, sum vilja útliva skapandi evnir og dreymar.

**Spírin**

> *"Ein bólkur í Føroyum er ikki væl umtóktur, tí hann er føroyskur, men tí hann hevur okkurt at bjóða sínum áhoyrarum"* (Richard Ogden, Sosialurin, 8. desembur 2004)

Sum meginregla kann ein siga, at dreymurin hjá einum føroyskum tónleikara líkist dreyminum hjá einum tónleikara í t.d. London. Um ein røkkur dreyminum (ella málunum, ein hevur sett sær) og hvussu ein røkkur dreyminum er tengt at nógvum ymiskum umstøðum: persónsmensku, umhvørvi, vinum, útbúgving, undirstøðukervi, netverki o.s.fr. Innan fyri tónleik er eingin skræddaraseymað uppskrift um, hvussu ein ger dreymin til veruleika ella røkkur teimum málum, sum ein setur sær.

[4] Hetta stendur í álitinum um mentan og list, sum Tórshavnar kommuna læt úr hondum: "Jens Christian Svabo, sum hevði lært at spæla violin, meðan hann las í Keypmannahavn, var fastur spælimaður "på fornemme Bryllupper og Lystigheder i Thorshavn" seinast í 1700-árunum".

At arbeiða miðvíst og hart fram ímóti einum stavnhaldi er avgjørt ein fortreyt. Onkuntíð er tað tilvildin, sum ræður, og hana kann ein ikki rokna við ella satsa upp á. Hetta er kanska serliga galdandi, tá ið ein er komin nakað áleiðis í veruleikagerðini. Tað er ein spurningur um at vera á røttum staði røttu tíð og koma í samband við rætta persónin. Og tað veit ein ikki, fyrr enn tað longu er hent.

Men í tí longu tilgongdini og tíðarskeiðinum, frá tí at spírin er sprottin, gera umstøður seg galdandi, sum kunnu menna ella doyva dreymin (sí Hjárit IV). Umstøðurnar snúgva seg um aðrar innari umstøður, sum samfelagið sum heild ikki kann ávirka; her tosa vit um t.d. heimið, familjuna og vinfólk, sum fyri nógvar tónleikarar geva fyrstu innføringina til tónleik.

Men í einum nútímans samfelagi sum okkara eru eisini aðrar kringumstøður, sum gera seg galdandi. Hesar snúgva seg um ymiskar almennar stovnar sum t.d. fólkaskúla og musikkskúla, har frálæra í tónleiki fer fram. Umstøðurnar snúgva seg eisini um karmarnar, sum ein tónleikari kann mennast og búnast í; eitt nú venjingarhølir, spælistøð og aðrar pallar, har tónleikarin hittir áhoyraran. Ella karmar, ið eru til taks, tá ið tónleikurin verður gøðskaður til eina vøru; eina fløgu.

Tónleikur er bæði ein vøra og ein tænasta. Vøran er tað ítøkiliga, har tónleikur er koyrdur í eitthvørt ljóðílat; eina fløgu, DVD, film e.o.t. Tænastan er framførslan, har tónleikurin er ein uppliving, sum 'bert' kann gøðskast í minninum hjá tí einstaka lurtaranum.

## Tónlistaligt virksemi

Tann tónleikurin, sum vit viðgera í hesum álitinum, umboðar bert ein brotpart av øllum tí tónleikavirkseminum, sum er her á landi. Hóast álitið serliga leggur seg eftir at lýsa, hvussu vit kunnu stuðla undir menningina og professionaliseringina av tí, ið skarar framúr, er neyðugt at staðfesta, at eingin skarar framúr, uttan so at breiddin er til staðar. Tað er úr breiddini, at tað framúrskarandi sprettur.

Tað er við tónleiki eins og við fótbólti. Breiddin má stuðlast og mennast fyri at skapa teir bestu leikararnar. Karmar og umstøður hjá breiddini hava týdning fyri at menna elituna. Ein kann illa hugsa sær eitt landslið uttan eina 1. deild ella eina 1. deild uttan eina unglingadeild, dreingjadeild o.s.fr. Hetta er ein føðiketa við somu eginleikum sum aðrar føðiketur. Hon skal hava gróðrarlíkindi fyri at virka; hon skal hava ein vøll at spæla á. Nevnast kann í hesum sambandi, at í Føroyum eru umleið 21 fótbóltsvallir og 13 ítróttahallir, men einki spælistað til tónleik (sum er gjørt bert við tónleiki fyri eyga) og ógviliga fá venjingarhølir.

**Fólkaskúlin**
Fólkaskúlin er óivað tað fyrsta staðið, har tey flestu koma í samband við eina skipaða frálæru í tónleiki. Tónleikafrálæran í dag í fólkaskúlanum hoyrir undir lærugreinina "handverk og list". Tað stendur hvørjum skúla frítt at velja, hvussu hann skipar hesa frálæru. Hon er fastur táttur í minst fimm ár, ella frá 1. til 7. flokk, við einum tímatali á 25 tímar um vikuna tilsamans fyri øll árini. Skúlin ger sostatt sjálvur av, um hann letur 1. flokk hava frálæru í handverki og list í 4 tímar um vikuna; so eru 16 tímar um vikuna eftir til 2. til 7. flokk. Lærugreinin fevnir um fimm undirgreinar: tónleik,

tilevning, handarbeiði, smíð og heimkunnleika. Eftir 7. flokk er tónleikur valgrein, ið ofta er skipað í eina breyt, sum næmingarnir velja seg inn á.

Stórur dentur hevur altíð verið lagdur á sang í tónleikafrálæruni, men hetta er eitt sindur broytt tey seinnu árini. Fleiri ljóðføri; í flestu førum "rútmisk"; eru tikin við í frálæruna. Í skúlaskipanini verður einki sagt ella álagt skúlunum um sjálva frálæruna. Hetta er lagt í hendurnar á einstaka tónleikalæraranum og hansara førleika og áhuga.

Fleiri tónleikalærarar hava gjørt vart við sína ónøgd um, at tímatalið í tónleikalærugreinini er minkað hesi seinastu árini. Umstøðurnar og útgerðin í skúlunum geva ikki júst íblástur til næmingar og lærarar. Tað er torført at meta um, um frálæran er versnað ella líður undir hesum, tí eingin eftirmeting ella kanning er gjørd. Men leita vit aftur til, hvat sviar halda hevur havt týdning fyri síni góðu úrslit á altjóða tónleikapallinum, so er skúlin nevndur sum ein høvuðsorsøk.

Herfyri stóð áhugaverd grein at lesa í bløðunum. Ein ung lærarinna greiddi frá einum flokki, har hon var flokslærari. Hesin flokkurin varð av øllum hildin at vera ómøgiligur og sera torførur at fáast við. Næmingarnir vóru ikki fakliga væl fyri, og teir vóru ikki serliga fittir hvør við annan. Eftir at hava tosað við teir um støðuna, kom undan kavi, at eitt av stóru ynskjum teirra var at sleppa at spæla tónleik. Loysnin var, at teir sluppu at spæla tónleik í auluni í skúlanum eftir skúlatíð. Hetta var ein av orsakunum til, at flokkurin broyttist bæði fakliga og sosialt til tað betra. Um hesin flokkurin hevði serligar tónlistaligar gávur er torført at siga, men tað er sannlíkt, at næmingarnir ikki hava fingið sín tørv á skapandi tónleikavirksemi nøktaðan innan fyri teir ásettu karmarnar í skúlanum. Eisini kann hugsast, at næmingarnir uttan fyri skúlatíð heldur ikki hava fingið tørvin nøktaðan; kanska osakað av vantandi venjingarhøli ella plássi í Musikkskúlanum. Hetta er sjálvandi gitingar, men tað er skjótt at hugsa, at onkrastaðni í skipanini vantar rásarúm hjá teimum ungu, og at tørvurin sostatt ikki verður nøktaður innan fyri skúlagátt.

**Føroya Musikkskúlaskipan**
Føroya Musikkskúlaskipan varð sett í verk sum ein royndarskúli í 1981. Lógin um Musikkskúlan varð samtykt á vári 1984 og kom í gildi sama árið.

Landsstýrið setur leiðara at samskipa og hava fakliga og námsfrøðiliga ábyrgd av musikkskúlafrálæruni. Lærarar verða settir í skipanini og skulu hava útbúgving frá musikkkonservatorium ella aðra hægri tónleikaútbúgving. Lærararnir starvast ymsastaðni í landinum, og tær kommunur, ið hava musikkskúla, rinda helvtina av læraralønunum. Kommunan setur ein leiðara á staðnum at hava umsitingarliga ábyrgd mótvegis kommununi. Kommunan skipar karmar um undirvísingina við hølum og ljóðførum. Musikkskúlaskipanin rindar ferðing ímillum undirvísingarstøðini og avgreiðir lønarútgjaldingar. Føroya Musikklærarafelag hevur sáttmála við Fíggjarmálaráðið. Sekstan musikkskúlar eru í skipanini, og tøku tímarnir eru býttir út á økini í landinum.

Lógin um Musikkskúlan sigur einki um, hvussu stórt býtið ímillum ta rútmisku og klassisku deildina eigur at vera. Mett verður, at umleið 10% av orkuni í musikkskúlaskipanini verða brúkt beinleiðis til rútmiskan tónleik. Hetta merkir umleið 68 klokkutímar um vikuna og 130 næmingar í øllum Føroyum.

Rútmiskur tónleikur er her at rokna sum frálæra ella samanspæl í gittara, trummusetti og sangi; hóast blásiljóðføri sum saksofon, trompet, trombon og onnur eins væl kunnu metast sum og verða brúkt til rútmiskan tónleik, verður frálæran roknað fyri at vera 'klassiskt' orienterað. Men frálærutilfarið er ofta fólkaløg og blandaður traditionellur tónleikur. Nógv av frálæruni kann ikki beinleiðis setast í bás sum antin klassisk ella rútmisk; her kunnu vit t.d. nevna klaver, hornorkestur, harmoniorkestur og námsfrøðiligt virksemi. Umleið 40% av orkuni verða brúkt til frálæru í klassiskum tónleiki, og 50% kunnu ikki beinleiðis setast í bás men eru eitt bland av ymiskum tónleikasløgum og frálæruhættum.

Í løtuni eru umleið 1.500 næmingar í skipanini. Umleið 3.000 fólk standa í bíðirøð, tí plásstrot er. Tað skal viðmerkjast her, at tað kann meiri enn so koma fyri, at sami persónur stendur á bíðilista til fleiri ljóðføri. Hartil kemur eisini fyri, at næmingar, sum fáa frálæru, standa í bíðirøð til onnur ljóðføri. Ofta eru børnini ikki medvitað um, hvat ljóðføri tey ynskja frálæru í, og tískil verða tey sett á lista til fleiri í senn; eisini fyri at tryggja, at tey á hendan hátt koma fyrr inn í skipanina. Men hóast hetta, kann verða staðfest, at eftirspurningurin eftir ljóðførisfrálæru er nógv størri enn útboðið. Plásstrotið er serliga stórt, tá ið tað snýr seg um klaver.

**Tórshavnar Musikkskúli**

Sum nevnt eru 16 musikkskúlar í skipanini, men Tórshavnar Musikkskúli er nógv tann størsti. Heldur ikki Tórshavnar Musikkskúli hevur nakran orðaðan politikk, sum sigur, hvussu stórur partur av virkseminum skal vera klassiskur, og hvussu stórur partur skal verða rútmiskur. Tað, ið er avgerandi, er heldur hvørjar lærarakreftir eru til taks og harundir hvørji ljóðføri, hesir lærarar kunnu bjóða frálæru í. Leiðslan á Musikkskúlanum metir, at 77% av virkseminum og frálæruni eru knýtt at klassiska partinum. Hini 23 prosentini eru rútmiski parturin. Sum áður nevnt er ikki lætt at býta virksemið so einfalt upp, tí tað eru ymiskir partar, sum kunnu hoyra undir báðar greinar.

Rútmiska deildin í Tórshavnar Musikkskúla heldur til í Skansastovu, og virksemið har hevur eisini fevnt um samanspæl, jamm-sessions og framførslur, har ungdómar hava havt karmar til at hittast og spæla tónleik um kvøldið eisini. Hetta virksemið var í nógv ár tengt at eldsálum sum Brandi Øssursson, men í dag er virksemið í Skansastovu nakað minni. Rútmiska deildin stendur fyri PopTop-tiltakinum, sum er hvørt ár í Grasagarði, har ungir einstaklingar og bólkar sleppa framat at vísa síni kynstur. Kommunan letur Grasagarð vera til taks til hetta tiltakið.

Tað standa 2.714 børn á bíðilistanum hjá Tórshavnar Musikkskúla. Størsta tilgongdin er til frálæru í klaveri, gittara og sangi; tann listin leingist hvønn dag, og bara í klaverfrálæru standa 762 børn (30. novembur 2004) í bíðirøð. Annars er eisini stórur áhugi fyri slagverki og trummum, sum tilsamans 210 børn bíða eftir at sleppa framat. Onnur 75 vilja sleppa at spæla saksofon, og 86 vilja sleppa at spæla keyboard. Hyggja vit at ljóðførunum, sum kunnu bólkast sum rútmisk, standa tilsamans 773 børn í

bíðirøð. Klaver og sangur kann ikki bólkast undir rútmiskan tónleik, hóast hesar tónleikagreinar verða líka nógv brúktar í tí rútmiska sum í tí klassiska.

**Kvøldskúli**
Nógvastaðni kring landið er frálæra í ymiskum ljóðførum ella samanspæli undir kvøldskúlaskipanini. Skipanin er kommunal og verður umframt við luttøkugjaldi fíggjað kommunalt. Í hesum áliti eru tó ikki umstøður til at kanna og fara nærri inn á, hvussu nógv frálæra í rútmiskum tónleiki fer fram undir kvøldskúlaskipanini, tí hesa kunningina er ikki lætt at sleppa til. Verður hugt nærri at tilboðunum undir kvøldskúlaskipanini, sum eru atkomulig á heimasíðum hjá kommununum, sæst, at tað t.d. er frálæra í sangi og klaveri í Leirvíkar Kvøldskúla, klaveri, gittara og bassi í Stranda Kvøldskúla, og sangi og tónleiki (ljóðføri ikki nevnd) í Vágs Kvøldskúla. Tað eru eisini aðrar av teimum størru kommununum, sum bjóða frálæru í rútmiskum ljóðførum.

Tórshavnar Kvøld- og ungdómsskúli (Margarinfabrikkin íroknað) hevur frálæru í gittara, el-gittara, keyboard, trummum/samanspæli og sangi. Nakað av virkseminum gongur fyri seg í Skansastovu, og restin gongur fyri seg á Margarinfabrikkini (sí meira um hetta niðanfyri).

Samanum tikið kann ein siga, at frálæran í kvøldskúlanum er nakað øðrvísi enn frálæran í Musikkskúlanum, tí í Musikkskúlanum skulu lærararnir hava útbúgving og pappír upp á sín førleika at undirvísa í einum ljóðføri. Hesir eru eisini ofta tónleikarar, sum hava lært innan fyri klassiskan tónleik. Lærarunum í kvøldskúlanum nýtist ikki nakra langa tónleikaútbúgving, og tað vísir seg ofta, at hesir eru tónleikarar, sum hava fingist meira við rútmiskan enn klassiskan tónleik. Í so máta kann sigast, at kvøldskúlin nøktar ein tørv, sum Musikkskúlin ikki heilt klárar at taka sær av. Tað er ikki endamálið her at siga, hvør frálæra er betri ella verri; tann í Musikkskúlanum ella kvøldskúlanum; og tær venda sær heldur ikki til sama málbólk. Men tað er tó neyðugt at gera vart við, at hóast grundleggjandi frálæran í báðum førum er hin sama, tá ið tað snýr seg um nótar, hoyrilæru, teknikk og ástøði, so er kanska ein stórur munur, tá ið tað snýr seg um improvisatión. Her hava 'skúlarnir' (les: lærararnir) hvør sín læruhátt og førleika.

## Venjingarumstøður

Uttan fyri skúlagátt eru umstøðurnar meiri óskipaðar og ofta latnar upp í hendurnar á privatpersónum í størri mun enn t.d. kommunum og øðrum myndugleikum. Tað er ikki uttan orsøk, at heitið 'garagebands' (ella kjallarabólkar) hevur fingið fótafesti. Heitið fevnir um bólkar, sum ikki hava annað stað enn eitt bilhús ella ein kjallara hjá foreldrunum at halda til í fyri at betra sín førleika. Men heitið sigur eisini okkurt um, at hesar umstøður ikki avmarka seg til Føroyar, men at tað eisini er vanligt aðrastaðni, at bólkar liva sítt egna lív og eru partar av einari sub-mentan. Hesin aldursbólkur finnur sær ofta ein samleika júst við ikki at laga seg eftir karmum, sum myndugleikarnir skapa.

Margarinfabrikkin í Tórshavn er tó eitt gott dømi um kommunalar karmar, sum geva sub-mentanum og samtíðar tónleikaráki rásarúm. Á Margarinfabrikkini eru 7 venjingarhøli til tónleikabólkar. Har er tó lítil útskifting, tí aloftast hava teir somu 8 bólkarnir atgongd til hølini. Teir gjalda 600 kr um mánaðin í leigu. Hóast

Margarinfabrikkin helst er tað staðið í landinum, sum hevur tær bestu venjingarumstøðurnar, so nøktar hon als ikki tann tørvin, sum er í dag. Tá ið tosað verður við tónleikarar í miðstaðarøkinum, eru venjingarhølir ofta tað, teir sakna mest.

Aðrastaðni í landinum eru fáar kommunur, sum bjóða fram venjingarhølir til tónleikarar. Í Klaksvík hevur kommunan tvey hølir tøk til bólkar at venja í. Annað verður mest brúkt til komandi og farandi ungdómsbólkar, meðan hitt er meiri støðugt og verður leigað einstøkum bólkum. Onnur feløg halda eisini til í húsinum; m.a. heimavirkisfeløg. Í Sandoy hevur ungdómshúsið Virkið verið karmur um alt tónleikavirksemi á Sandi; eisini venjing hjá bólkum, hóast hetta virksemið nú er dottið niðurfyri. Í Vágum eru eingi onnur venjingarhøli enn tey, sum privatpersónar lata í kjallarum. Sama er galdandi í Suðuroy, har einki kommunalt venjingarhøli er til rútmiskar bólkar.

Í Eysturoy er tað tónleikasamtakið Grót, sum seinastu árini hevur myndað so at siga alt skipað tónleikavirksemi í oynni, um ein sær burtur frá sjálvum framførslunum, sum eisini eru aðrastaðni í oynni. Hóast hetta nøktar Grót heldur ikki tørvin, sum er ímillum tey ungu.

Venjingarhølir undir skipaðum umstøðum eru ein kommunal uppgáva, tá ið hugsað verður um hølini og karmarnar annars, men higartil hava sera fáar kommunur í Føroyum tikið hesa ábyrgd á seg. Tónleikur sum eitt ítriv á jøvnum føti við ítróttina verður ikki tikin í fullum álvara, hóast hann hevur eins stóran sosialan týdning fyri ungdómin á bygd og í bý.

Hyggja vit at, hvussu hesi viðurskifti eru skipað aðrastaðni, so sæst millum annað, at í Reykjavík er ein gamal bygningur, kallaður Klink og Bank, sum í løtuni verður nýttur til venjing og konsertir hjá bólkum har um leiðir. Hetta er meiri eitt konsept heldur enn ein bygningur, og tað hevur sín uppruna hjá einum idealisti, sum hevur latið 8 listafólk brúka bygningin til sítt virksemi, til bygningurin verður seldur. Tað var Landsbanki Íslands, sum átti bygningin og seldi hann til ein privatpersón, sum síðan hevur latið dyrnar upp fyri listafólki í býnum.

Í Stokkhólmi í Svøríki hava myndugleikarnir funnið somu loysn; gomlu frystigoymsluna, Fryshuset, sum hevur 39 venjingarhølir til einar 100 bólkar. Bólkarnir gjalda eitt ávíst mánaðargjald fyri atgongd til húsið og ta útgerð, sum er í húsinum. Bólkarnir hava sjálvir útgerð, ljóðføri og annað við. Eitt annað stað eitur Balsta Musikslott. Tað stendur í Eskilstuna. Har eru 70 ymisk venjingarhøli og eisini eini 100 bólkar, sum hava sítt virksemi í bygninginum. Í 1992 varð ein gomul bilhøll í Hultsfred bygd um. Henda høll verður í dag kallað Rock City, og hon er vorðin ein metropolur fyri tónleik, fjølmiðlar og ferðavinnu, og har verður eisini bæði lisið og granskað. Rock City hevur 70 fólk í starvi, og 20 ymisk feløg og fyritøkur hava virksemi og umsiting har. Rock City umsitur fyri 17 milliónir SEK um árið.

Í Danmørk hava tey umframt 'vanlig' venjingarhøli eisini innrættað bingjur, sum verða nýttar til venjing. Inni í bingjunum eru trummur, keyboard, streymur og hiti, og tað kostar 200 kr um mánaðin at leiga bingjuna[5].

## Spælistøð

Í Føroyum eru eingi spælistøð, ongar konserthallir og eingi hús, sum eru bygd við bert tónleiki fyri eyga. Harvið er ikki sagt, at tað ikki eru fleiri støð, sum egna seg til tónleikaframførslur. Vert er her at skilja ímillum tann tónleik, sum verður framførdur fyri eini 'sitandi' áhoyrarafjøld og so tann tónleik, sum t.d. verður spældur í ølklubba, ítróttahøll ella í brúdleypi. Her eru málbólkarnir nakrir aðrir, og heldur enn egin løg ber tónleikurin tí eisini meira á brá av dansitónleiki, undirhaldstónleiki og, sum oftast, cover-løgum.

### Mentanarhús

***Norðurlandahúsið*** er uttan iva tað staðið, sum í sínari 21 ára longu søgu hevur hýst flestu tónleikaframførslum, um ein hugsar um konsertir og ikki dansi- ella undirhaldstónleik. Norðurlandahúsið hevur m.a. í nógv ár á rað verið karmur um tey stóru nøvnini (sum ikki altíð kundu sigast at vera rein djass-nøvn) í Tórshavnar Jazz, Folk & Blues Festival. Til hetta endamálið riggaði húsið væl, tí umstøðurnar eru góðar til eina áhoyrarafjøld, ið er ímillum 350 og 650 fólk.

Húsið hevur eisini verið fastur karmur um finaluna í Prix Føroyar-kappingini, sum er annað hvørt ár. Harvið hýsir tað eisini hesum unga aldursbólki, sum annars næstan ongan góðan eigur. Hinvegin er eitt sindur torførari at skapa gott lag í húsinum, tá ið tað snýr seg um tónleikasløg, sum sambært siðvenju skulu hava eitt sindur av sigarettroyki, glasglinti og teski afturvið fyri at glíða best niðurum. Men her hava teir sokallaðu ølklubbarnir havt ein leiklut, og teir eru fleiri, sum hvørt vikuskifti hýsa bólkum at spæla livandi tónleik.

Norðurlandahúsið er eisini karmur um ta árligu Listastevnu Føroya, og her spælir tónleikurin eisini ein stóran leiklut í skránni. Áhugin at hava tónleikatiltøk í húsinum er størri enn umstøðurnar rúma, men nógv tiltøk fáa atgongd til húsið. Tey, ið ikki koma beinleiðis á skránna við tiltøkum, sum húsið sjálvt skipar fyri og umsitur, kunnu leiga húsið og ta útgerð, sum er í húsinum. Hóast húsið er væl egnað til nógv ymisk tiltøk; heilt frá smáum fyrilestrum til stórar konsertir; so eru avmarkingar soleiðis at skilja, at tað er torført at fáa fólk at koma til eitt tiltak t.d. eitt mánakvøld. Nøkur tiltøk eru betur egnað at vera í miðbýnum.

Hagtølini fyri Norðurlandahúsið vísa, at í 2002 vóru 23% av virkseminum í húsinum tónleikur; t.e. 68 konsertir; og fyri 2003 var tónleikavirksemið 22% av samlaða virkseminum; t.e. 66 konsertir. Tey 8 prosentini av hesum vóru konsertir við útlendskum bólkum ella einstaklingum. Í fjør komu 39% av teimum vitjandi at lurta eftir tónleiki.

---

[5] Ballerup Musikskole hevur tvær bingjur til rútmiskar tónleikabólkar at venja í. Bingjurnar eru bjálvaðar og hava ventilatión, hita og streym. Gjaldið á 200 kr um mánaðin verður nýtt til at halda hølini viðlíka og betra tey. Bólkar kunnu bíleggja bingjurnar á www.ballerupmusikskole.dk.

Allir tónleikararnir, sum vit hava tosað við í sambandi við hetta álitið, hava peikað á ***Mentanarhúsið í Fuglafirði*** sum tað staðið í Føroyum, har bestu umstøðurnar eru. Har verða tónleikararnir væl móttiknir, og har er gott ljós og ljóð (verður í ávísum førum leigað uttanífrá) og góðar umstøður annars. Men tað tykist torført at fáa Mentanarhúsið at bera seg fíggjarliga, hóast tað nú gongur betur enn nakrantíð. Málið er at hava tiltøk hvønn dag, men orkan røkkur ikki til meira enn 3-4 tiltøk um vikuna. Eitt teirra er dansur hvørt leygarkvøld, tí tað vísir seg, at hetta tiltakið kann rinda kostnaðin fyri øll hini. Húsið verður eisini leigað samkomum og fyritøkum, men flestu tiltøkunum skipar húsið sjálvt fyri, og hesi tiltøk snúgva seg aloftast um tónleik. Kappingin um frítíðina hjá kundanum er hørð, og fólk velja ofta at sita heima, tá ið tey hava frí.

***Atlantis í Klaksvík*** kann eisini bólkast undir mentanarhús, tí har eru ymisk tiltøk innan fyri ymiskar listagreinar. Tó verður húsið hildið at vera betur egnað til sjónleik enn tónleik, og tað verður eisini í størri mun brúkt til sjónleik. Hetta kemst eisini av, at í Klaksvík er eitt virkið sjónleikarafelag, sum hevur fleiri sýningar á skránni hvørt ár, og harumframt eigur Klaksvíkar Sjónleikarafelag jú húsið. Í húsinum verða filmar sýndir regluliga, og Atlantis samstarvar við Klipp, filmsfelagið hjá Norðurlandahúsinum, um at sýna filmar fyri filmsáhugaðum málbólki.

***Losjan í Gøtu*** eigur eisini at verða nevnd her, hóast hon ikki júst kemur undir heitið mentanarhús. Men virksemið har tey seinastu árini borgar fyri, at hon hoyrir undir listan við spælistøðum, sum eru mest brúkt her á landi. Tað er tónleikasamtakið Grót, sum hevur nýtt Losjuna til allar tær mongu konsertirnar (einar 30-40) sum tað hevur skipað fyri síðan samtakið varð stovnað í 1998.

**Hallir og bygdarhús**

Ítróttahallirnar byrjaðu sítt 'tónleikavirksemi' í 80'unum. Fyrst og fremst vóru tað ítróttafeløgini, sum skipaðu fyri dansi fyri at fíggja ítróttavirksemið. Hetta er framvegis galdandi, men tó er tónleikavirksemið í hallunum minkað nógv tey seinastu árini. Tað tykist torførari at savna nógv fólk í einari ítróttahøll; tað krevur ofta kendar bólkar, ið spæla ein meiri mainstream-merktan tónleik.

Hallirnar, sum tó enn hava regluligt virksemi, eru Høllin í Kambsdali, Høllin á Hálsi í Havn og Badmintonhøllin í Havn. Árliga nýggjárskonsertin hjá handbóltsfelagnum Kyndli hevur fast pláss í Høllini á Hálsi. Um høgtíðirnar; serliga jólini og páskirnar; verða hallirnar ofta brúktar, tí fólk í størri mun enn annars fylkjast til størri tónleikatiltøk.

Verða kendir útlendskir bólkar bidnir at koma higar, eru hallirnar einastu støðini, ið rúma tað talið av áhoyrarum, sum er neyðugt, fyri at tiltakið skal bera seg fíggjarliga. Men hallirnar eru karmur meiri av neyð enn av ynski. Onnur hús, ið verða brúkt til dansitónleik og veitslur, eru bygdarhúsini (sí mynd 8).

**Klubbar og kaffistovur**

Felags fyri tónleikin í klubbum og á kaffistovum er, at her kemur tónleikurin í aðru røð og er sostatt ein uppliving, sum verður løgd oman á ta vøruna, sum verður seld í húsinum.

Norröna hevur í mong ár eisini bjóðað teimum ferðandi livandi tónleik, og tað munnu vera mangir føroyskir tónleikarar, ið hava spælt umborð í longri ella styttri tíðarskeið. Hetta er helst einasta føroyska staðið, har tónleikarar kunnu vera yrkistónleikarar longur enn bert eitt vikuskifti. Men hóast tað, so er hetta framvegis undirhaldstónleikur, og ein hevur ikki heilt leysar teymar til at spæla egnan tónleik ella annað, ið ikki hóskar øllum teimum ferðandi. Tað sama er galdandi fyri tónleikin, ið verður spældur til brúdleyp og veitslur. Hetta er ein møguleiki at vinna sær eitt sindur av peningi, men tónleikarin má laga seg til tað, ið vertirnir og gestirnir vilja hava.

**Mynd 8: Onnur spælistøð í landinum**




***Uttandura tónleikavirksemið*** er kanska ikki so stórt her sum aðrastaðni, og ein høvuðsorsøk er sjálvandi veðurlagið. Tó eru tveir fastir tættir um árið. Teir eru konsertrøðin ***PopTop*** í Grasagarði og ***Ólavsøkukonsertin*** í kommunuskúlagarðinum í Havn. Her síggja vit burtur frá festivalunum, sum eisini eru uttandura. Fyri bæði tiltøkini er galdandi, at tey venda sær til tey heilt ungu. Tónleikurin er í hásæti, tey ungu koma at lurta, og tónleikurin, ið verður spældur, rúmar fleiri egin løg enn løg hjá øðrum. Ólavsøkukonsertin, sum fyllir 20 ár komandi ár, hevur nú fingið rímiliga fastar karmar at virka undir, um havt verður í huga, at hon í nógv ár varð flutt úr einum staði í annað. Nú er hon fast í kommunuskúlagarðinum. Fyriskipanin er eisini komin upp á hægri støði við fastari samsýning til tónleikararnar, avtalu við KODA, góðkendari streymtalvu, sjúkrastovu, backstage-umstøðum, eftirlitsfólkum, ið duga fyrstuhjálp o.s.fr. Á konsertini í 2004 luttóku 12 bólkar, og vanliga lokkar konsertin

einar 2.000 til 3.000 ungdómar á eina fleiri tímar langa konsert. Tað er felagið FUT, ið skipar fyri.

Samanum tikið er galdandi fyri øll tey støð, hús, hallir og onnur, sum hýsa tónleikinum, at tey meiri ella minni eru tómir karmar. Skal konsert ella annað tiltak vera, er neyðugt at fáa ljós- og ljóðútgerð til vega. Á staðnum er sjáldan servitan ella persónur, sum burturav kann taka sær av at skipa fyri og standa fyri tiltakinum. Tískil eru tað sum oftast tónleikararnir sjálvir, ið standa fyri øllum fyrireikingararbeiðinum. Tó eru Mentanarhúsið í Fuglafirði, Norðurlandahúsið og TB-húsið undantøk. Har er vanligt at hýsa tónleikatiltøkum, og harvið hava tey fingið ein ávísan serkunnleika á økinum.

Í veruleikanum eigur tónleikurin einki stað, sum er til bert fyri tónleikin. Spurningurin er so, um tað er fíggjarligt grundarlag fyri meiri enn einum veruligum spælistaði fyri tónleikin eina, tá ið ein so eisini hugsar um mentanarhúsini, hallirnar og annað, sum kann hýsa tónleikinum.

Hyggja vit aðrastaðni, vísir tað seg ofta, at hóast eitt spælistað ella ein konsertpallur bert er til tónleik, so er virksemið tengt at tónleiki í víðari merking enn 'bert' til konsertir og live-framførslur. Hetta sjálvandi fyri at fjøltátta virksemið og inntøkumøguleikarnar og harvið eisini fyri at spjaða váðan. T.d. hava fleiri hús venjingarhølir til bólkar, og harvið fáa tey eina leiguinntøku. Í húsinum er eisini umsiting hjá feløgum, sum leiga høli. Harumframt eru framleiðsluverkstaðir, soleiðis at skipast kann fyri verkstovum av ymiskum slagi.

Fer ein tónleikabólkur at ferðast í Føroyum fyri at spæla egnan tónleik (t.d. løg av nýggju fløguni) er skjótt at koma runt til øll tey støð, sum eru toliliga egnað til hetta endamál. Aftan á einar 4-5 framførslur er marknaðurin mettaður[6]. Eftir kanska tvey vikuskifti er liðugt at vísa fólki tað, sum hevur tikið fleiri mánaðir at gjørt. Hetta fær nógvar tónleikarar at falla í fátt. Tí hvat er næst á skránni? Hvørjum skulu teir nú stremba eftir? Her er tað, at útheimurin verður áhugaverdur; ikki bert fyri at víðka leikpallin, men eisini fyri at breiða tónleikin út til eina størri fjøld enn ta føroysku.

## Konsertferðir

At fáa konsertferðir í útlondum í lag kann samanberast við at fáa ein stóran kavabólt á rull. Hann er tungur at vika, men tað vísir seg, at tá ið hann fyrst er farin á rull, so gongur væl lættari. Fyrsta stig er sjálvandi at fáa samband við fyriskiparar uttanlands og gera tónleikin, ið ein spælir, kendan millum møgulig feløg og stovnar, sum skipa fyri konsertum, um tað so snýr seg um eitt spælistað ella ein festival.

Tað kann kennast sum eitt sindur av eini forðing at koma frá einum so lítlum og ókendum staði sum Føroyum, tí tað eru óivað fáir fyriskiparar, ið kenna tónleikin her heima og hyggja hendan vegin, tá ið teir leita eftir bólkum til sínar skráir. Hinvegin ger tað ikki mun, hvaðan ein er; bert tónleikurin er góður og hóskar seg til tann málbólk, sum fyriskiparin vendir sær til.

[6] Tó skal viðmerkjast, at útlendsk ferðafólk, sum koma higar um summarið, ofta eru at síggja í áhoyrarafjøldini til konsertir, og hetta hevur góða ávirkan.

> *"Ein sangur, sum hevur verið hitt í einum lítlum landi, kann eisini gerast hitt í nógvum stórum londum".* Richard Ogden, Sosialurin, 8. desembur 2004

Fyri 20 árum síðan var tað rættiliga óvanligt, at føroyskir bólkar fóru út um landoddarnar at spæla. Tó vóru tað bert nakrir einstakir bólkar, ið fóru til grannalond okkara Ísland, Noreg og Danmørk. Tað, ið fekk hesar ferðir í lag, var fyrst og fremst eitthvørt samband, eitt netverk, sum var til staðar frammanundan; antin at onkur limur í einum bólki var t.d. úr Noregi, ella at onkur føroyingur í bólkinum hevði búð aðrastaðni og sostatt hevði eitt netverk í tí landinum. At fáa 'gigs' við hjálp frá einum netverki er einki broytt og framvegis besti hátturin at sleppa framat uttanlands.

Í dag eru Spælimenninir, Yggdrasil, Enekk (ella Kári Sverrisson) og Týr óivað teir bólkar, búsitandi her heima, ið ferðast mest aðrastaðni, um vit síggja burtur frá Teiti Lassen og Eivør Pálsdóttir[7], sum ikki hava fastan bústað í Føroyum og hartil hava sáttmálar við útlendsk plátufeløg og tískil meiri ella minni arbeiða undir øðrum umstøðum enn bólkar og einstaklingar her heima. Hyggja vit t.d. at Týr, so fór bólturin so spakuliga á rull, tá ið bólkurin sum partur av Prix Føroyum í 2001 slapp at spæla á Jellinge Festivalinum í Danmørk. Rættilig gongd kom tó ikki á konsertferðirnar, fyrr enn teir fingu eitt hitt við Orminum Langa í Íslandi í 2002. Lagið varð eisini kosið Ársins Hitt í Íslandi hetta árið. Um summarið 2002 tók Sigrid Dalsgaard við sum umboðskvinna fyri Týr. Hon hevur síðan arbeitt støðugt og miðvíst fyri at skaffa bólkinum fleiri gigs uttanlands. Sigrid hevur m.a. gjørt eitt forrit, sum skrásetur allar persónar, stovnar, fjølmiðlar og øll feløg og onnur, ið bólkurin hevur verið í sambandi við. Hetta forritið er eitt neyðugt amboð hjá teimum fyri at kunna samskifta við síni netverk.

Týr hevur higar til spælt í Íslandi, Danmørk, Noregi, Lettlandi, Russlandi, Finnlandi og Týsklandi, á festivalum sum partur av norðurlendskum átaki (hjá norðurlendska ráðharraráðnum) ella sum eitt eingangs-gig á onkrum spælistaði. Hóast fyriskipararnir biðja Týr koma aftur, hvørja ferð bólkurin spælir, so er hetta rættiliga tungt at arbeiða við; bæði tá ið tað snýr seg um umsiting og fyriskipan. Tað er ójavnt, hvussu nógv fyriskiparin letur fyri luttøkuna. Viðhvørt snýr tað seg bert um 'backline'[8], og so má bólkurin sjálvur gjalda fyri ferðing, farmaflutning, gisting, mat, samsýningar o.s.fr. Aðrastaðni eru tað fyriskipararnir, ið gjalda samsýningina. Restina av kostnaðinum skal bólkurin sjálvur gjalda.

Tað er eingin skræddaraseymað mannagongd á økinum; tað veldst um tað er fyriskiparin, ið setur seg í samband við bólkin, ella um bólkurin sjálvur hevur sett seg í samband við fyriskiparan. Tað veldst eisini um, hvat slag av gig tað snýr seg um, og tað veldst um, hvussu kendur bólkurin er. Skal ein verða borin á lógvum og fáa alt goldið, krevst, at bólkurin er nógv eftirspurdur. Sostatt eru tey í Týr noydd at skaffa sær fígging úr ymiskum ráðum, grunnum og stovnum her heima og aðrastaðni við fyri at fíggja konsertvirksemið í útlondum.

Tey seinastu árini hava fleiri bólkar verið t.d. í Danmørk og Íslandi sum partar av

[7] Hóast Eivør ikki hevur fastan bústað í Føroyum, fer øll umsiting og fyrisiting, eisini peningaliga, ígjøgnum Føroyar og umboð hennara í Føroyum.
[8] Backline er streymur og ljóð og at høvuðskaðalar og hátalarar verða settir upp (umframt trummur og bassforsterkara).

einum størri føroyskum átaki. Í 2002 skipaði Grót saman við Tutli og Hljómalind fyri Fairwaves festivalinum í Íslandi. Hetta fekk sera nógva umtalu í Íslandi, og hugtakið "føroyska bylgjan" tók av álvara dik á seg. Millum luttakararnar vóru Clickhaze, Krit, Kári Sverrisson og Hanus Johansen. Eisini er vert at nevna, at fyrsta vitjan Týrs í Íslandi kom í lag ígjøgnum netverk hjá Gróti/Tutli í Íslandi.

Í 2004 skipaði Norðurlandahúsið fyri einum tiltaki í Vega í Keypmannahavn, og Margarinfabrikkin skipaði fyri einari konsertferð í Íslandi fyri teir bólkar, sum hava dagligt virksemi á Margarinfabrikkini. Eisini hava føroyskir bólkar verið uttanlands og kappast við aðrar. Seinast var tað Makrel, sum tók lut í kapping í Danmørk. Felags fyri hesi tiltøk er, at ein stendur sjálvur fyri meginpartinum av kostnaðinum.

Men hyggur ein longri enn at tí peningaligu síðuni av hesum, so er ein størri langtíðarvinningur av hesum virksemi. Hann kann fáast við at víðka netverkið og samstarvið við spælistøð og fyriskiparar í londunum um okkara leiðir. Hetta fær ringarnar at breiða seg og at gera føroyskan tónleik kendan aðrastaðni. Slíkt hevur stóran týdning; eisini fyri teir bólkar, ið koma aftaná. Virksemið hjá einum einstakum bólki kann sostatt skapa gróðrarlíkindi fyri aðrar bólkar eisini.

## Festivalar og afturvendandi konserttiltøk

Føroyskir bólkar og einstaklingar hava eisini havt ein pall her heima, tá ið tað snýr seg um festivalar (sí Hjárit V). Teir fyrstu av sínum slagi vóru ***Fólkatónleikarastevnan*** og ***Tórshavnar Jazz, Folk & Blues Festival***, sum báðir fóru av barkastokki fyrstu ferð á sumri 1984. Tórshavnar Jazz, Folk & Blues Festival, sum Brandur Øssursson skipaði fyri til fyri tveimum árum síðan, varð eitt árligt afturvendandi tiltak, sum Norðurlandahúsið var høvuðskarmur um. Eitt av høvuðsendamálunum við festivalinum var at fáa góð og kend útlendsk nøvn at koma higar at spæla og skapa íblástur fyri føroyskar tónleikarar og áhoyrarar.

Umstøðurnar hjá festivalinum hava verið eitt sindur misjavnar. Hóast ávísur djasstónleikur eigur sítt rætta heimstað á konsertpalli, so er annað slag av djassi, sum hóskar betur til hølir, har ein serligur stemningur er, og í so máta er Norðurlandahúsið ikki so væl egnað. Hetta var eisini ein orsøk til at roynt var at broyta festivalin og gera hann til eitt miðsavnandi tiltak í býnum við bólkum, ið spældu uttandura, og so annars at brúka spælistøðini í miðbýnum sum støð.

Fyrireikararnir siga, at tað hevur verið torført at fáa fólk at koma at lurta í 2004, og váta veðrið gjørdi eisini sítt til, at nakrar av uttandura konsertunum vórðu avlýstar. Hetta sigur eitt sindur um, hvussu viðbrekin ein slíkur festivalur er, um hann ikki hevur fastar karmar at virka undir og hevur skapt ein vana hjá áhoyrarunum.

Eitt annað, sum sjálvandi ávirkar, er, at hóast fleiri tónleikarar royna seg á djasstónleikaøkinum, eru fá støð og fáir miðlar hjá áhoyrarunum at lurta eftir djasstónleiki her heima, og hetta er so við til at máa støðið undan áhoyrarafjøldini og áhuga hennara fyri júst hesum slagnum av tónleiki. Her er tó broyting komin í, tí í Tórshavn verður skipað fyri jamm-session innan fyri djass hvørt mikukvøld á Manhattan. Hetta fer uttan iva at hava góða ávirkan á festivalin komandi ár.

Sum nakað nýtt hava hesin djassfestivalurin og Summartónar valt at leggja saman og soleiðis draga eina línu komandi ár og harvið brúka vitanina og førleikan hjá hvør øðrum.

Fyri tveimum árum síðan sá eitt nýtt tiltak dagsins ljós. Tað var ***Singer-Songwriter*** kappingin, sum gongur fyri seg í Hafnia Lounge. Kappingin er skipað við nøkrum undanumførum, har finalistarnir verða valdir. Í finaluni kappast teir um at gerast ársins Singer-Songwriter, og hartil um ein vinning, sum er tveir dagar í studio í Útvarpi Føroya. Tað er Hotel Hafnia, sum saman við FUT skipar fyri kappingini, og eisini Heineken og Atlantic Airways stuðla henni.

Kappingin er væl umtókt ímillum áhoyrararnar, og hetta er ein góður pallur hjá einstaklingunum, sum hava hug at royna seg í hesari tónleikagreinini. Fortreytin fyri at luttaka er, at ein skal spæla egin løg (sum heitið eisini ber boð um) og syngja á føroyskum. Vinnarin í 2004 var Rókur Jakobsen.

***Listastevna Føroya*** varð fyriskipað á fyrsta sinni í 2001. Hon er tengd at Norðurlandahúsinum, hóast virksemið og fíggingin eru sjálvstøðugir partar. Eitt av høvuðsendamálunum er at fáa stór útlendsk nøvn higar at framføra, men hetta er eisini ein góður pallur hjá føroyskum tónleikarum og listafólkum annars. Í mun til aðrar stevnur og festivalar, ið eru nevnd í hesum høpi, er Listastevnan ikki bert til tónleik, men fevnir um allar hugsandi listagreinar. Men tónleikurin spælir tó ein stóran leiklut og er kanska tann listagreinin, ið megnar at savna størstu fjøldina. Listastevnan hevur eisini til endamáls at røkka longri út enn til miðstaðarøkið, og fleiri konsertir verða hildnar aðrastaðni; t.d. í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

Tað er tónleikasamtakið Grót í Gøtu, sum skipar fyri ***G! Festivalinum.*** Festivalurin sá dagsins ljós í 2002, tá ið sandurin í Syðrugøtu var karmur um framførslur hjá fyrst og fremst føroyskum tónleikabólkum. Festivalurin hevur fleiri endamálsorðingar, sum m.a. bera boð um, at hann ynskir at gerast týðandi partur, ikki bert av føroyska tónleikapallinum, men eisini tí norðurlendska[9]. Síðan 2002 er festivalurin vaksin í vavi og myndar í dag meginpartin av virkseminum hjá felagnum Gróti. Frá at vera ein føroyskur festivalur eitt summarkvøld, er hann nú eitt heilt vikuskifti og hevur megnað at lokka ferðandi úr øðrum londum higar at lurta eftir bólkunum.

Festivalurin er grundfestur í økinum, har ið skipað verður fyri honum, og fólk í Gøtu hava karmar og høli til taks til tiltakið. Sjálvboðin arbeiðsmegi er eisini partur av myndini, tó at stórir partar av henni koma aðrastaðni enn úr Gøtu. Tónleikaslagið, sum verður framført, er eisini broytt frá at vera meiri smalt til at fevna breitt um

[9] Útvega áhoyrarunum góðan tónleik.
Skapa ein pall har föroyskur eins væl og norðurlendskur og altjóða tónleikur kann vera spældur fyri eini fjölbroyttari áhoyrarafjöld.
At knýta Föroyar upp í tónleikaheimin kring okkum. At fáa bæði tónleikarar og áhoyrarar hendan vegin til tónleikatiltök og at geva föroyskum tónleikalívi íblástur og avbjóðingar, soleiðis at tað framhaldandi kann mennast.
At sýna fram tað besta í föroyskum tónleiki fyri föroyingum eins væl og útlendingum.
At G! Festivalurin skal gerast týdningarmesta stakhending innan fyri rútmiskan tónleik í Föroyum eins væl og ein týðandi og gevandi partur av norðurlendskum tónleikalívi.
G! Festivalurin vil á hendan hátt skunda undir framhaldandi menningina av föroyskum tónleiki.

fólkatónleik, vísusang, gospel o.s.fr.; hetta fyri at spjaða váðan og skapa størri grundarlag fyri einari breiðari áhoyrarafjøld.

Eins og við frammanundan nevndu stevnum er eitt høvuðsendamál hjá G! Festivalinum at fáa útlendsk nøvn higar og harvið skapa samband og geva føroyskum tónleikarum íblástur. Í mun til Listastevnuna hevur G! Festivalurin gjørt sær tað til sítt vørumerki at bjóða privata gisting til luttakandi bólkar og soleiðis geva teimum eina serliga uppliving umframt tað at spæla á Gøtusandi. G! Festivalurin er vaksin í vavi í allar mátar; frá einum umsetningi upp á 50.000 kr í 2002 til 1,8 millión í 2004, og frá eini áhoyrarafjøld undir 1.000 í 2002 til oman fyri 4.000 í 2004.

***Summarfestivalurin*** varð fyriskipaður á fyrsta sinni á sumri í 2004. Vikuskiftið, áðrenn skúlin byrjar aftur, var karmur um hetta stóra tiltakið, sum í høvuðsheitum snýr seg um tónleikaframførslur. Til hetta endamál høvdu fyriskipararnir fyrst og fremst fingið gamlar kenningar í økinum; t.d. Hjarnar og Frændir; at framføra, og hartil eisini einstaklingar sum Guðrun Sólju, Gunnar Mikkelsen, Petsi Tvørfoss, Brand Enni og onnur. Veðurguðarnir vóru við fyriskiparunum, og hetta var sjálvandi ein orsøk til, at fólk allastaðni frá streymaðu til Klaksvíkar. Forsølan gekk stak væl, og selt varð fyri eina millión í atgongumerkjum í forsølu. Viðmerkjast skal eisini, at hesin festivalur hevur lættari atgongd til fjølmiðlarnar. Nakrir av fyriskiparunum eru fjølmiðlafólk, og sostatt verður boðskapurin varpaður út nógva staðni. Eitt fitt yvirskot av fyrsta festivalinum bendir á, at fólk hava tikið væl ímóti festivalinum, og hóast nógvir festivalar verða fyriskipaðir í Føroyum um sama mundið, er grundarlag undir teimum, tá ið ein hugsar um áhoyrarafjøldina.

Spurningurin er tó, hvussu væl hevði gingist uttan tann stóra fíggjarliga stuðulin, ið hesir festivalar mugu dúva uppá á hvørjum ári. Skuldi inntøkan frá atgongumerkjunum borið allan kostnaðin, høvdu tey uttan iva verið munandi dýrari!

**Prix Føroyar**
Prix Føroyar er størsta tónleikatiltakið í Føroyum innan fyri rútmiskan tónleik, og tað hevur verið fyriskipað annaðhvørt ár síðan 1995. Norðurlandahúsið hevur verið karmur um tiltakið soleiðis at skilja, at høvuðsskrivstovan og finalan hava verið í húsinum.

Høvuðsendamálið við prixinum er at geva føroyskum tónleikarum ein pall, har teir kunnu framføra egnar sangir fyri einari fjøld, sum er komin fyrst og fremst fyri at lurta. Tey seinastu árini hava fjølmiðlarnir eisini varpað tiltakið út í hvørja stovu í Føroyum, og á hendan hátt hava luttakandi bólkarnir ta størstu áhoyrarafjøldina, sum ein kann fáa her heima[10]. Í so máta er hetta tann størsta gularótin, sum bólkar og einstaklingar kappast um, og tískil kýta teir seg fyri at koma so langt sum gjørligt í hesi kapping, sum er skipað við undanumførum og finalu.

Einir 30 bólkar luttaka í hvørjum prixi. Nakrir bólkar sleppa ikki við, tí teir ikki lúka tær treytir, sum fyriskipararnir hava sett. Hvør luttakandi bólkur skal framføra egin løg, og mett verður, at okkurt um 150 sangir tilsamans verða smíðaðir til hvørt prixið. Í 2005 eru 24 bólkar, og teir skulu kappast í 4 undanumførum í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Átta teir bestu bólkarnir skulu síðan kappast í einari hálvfinalu á Tvøroyri,

[10] Í ár verður prixið sýnt á netinum ístaðin fyri í sjónvarpinum.

og tríggir teir fremstu skulu so kappast gallakvøldið í Norðurlandahúsinum 23. apríl 2005. Fyriskipararnir hava broytt leistin eitt sindur fyri at fáa fleiri viðurkendar bólkar við, sum annars ikki ynskja at vera við í kapping. Gallakvøldið verða føroyskir bólkar og einstaklingar heiðraðir.

Høvuðsfyriskipararnir eru Norðurlandahúsið, Sjónvarp Føroya, Útvarp Føroya og FUT (Føroya UndirhaldsTónleikarafelag). Tey leggja tiltakið til rættis og hava fíggjarligu ábyrgdina av tí. Stuðul kemur tó eisini aðrastaðni frá; m.a. úr norðurlendskum grunnum og føroyskum fyritøkum.

Fyriskipararnir leggja seg eisini eftir at fáa útlendskar luttakarar, sum í hesum sambandi kunnu nevnast 'keyparar', tí teir eru eina mest bjóðaðir við fyri at geva tiltakinum ein glugga út í heim og harvið luttakandi bólkum ein møguleika at spæla t.d. á einum festivali í Danmørk. Eisini verða einstakir útlendskir fjølmiðlar bodnir at siga frá tiltakinum, so at tað fréttist um tað aðrastaðni enn bara í Føroyum. Høvuðsvinningurin er ein vika í Lundgaard Studios í Danmørk, og hetta er nakað, ið tráað verður eftir hjá bólkum, sum gera egnan tónleik. Aðrir vinningar snúgva seg eina mest um at spæla á ymiskum festivalum í Norðurlondum.

Prix Føroyar hevur givið út tríggjar fløgur í samstarvi við Útvarp Føroya. Hetta eru live-upptøkur av framførslunum hjá bólkunum, sum koma út á fløgu nakrar vikur eftir finaluna. Tað er misjavnt, hvussu nógvar fløgur eru seldar; ta seinastu hevur ikki gingið so væl at selja.

## Fløguútgávur

Allir tónleikarar; bæði her heima og aðrastaðni; droyma um at geva út sína egnu fløgu. Hetta er, ella hevur verið, einasti hátturin at skjalprógva skapandi virksemið og gera tónleikin til eina ítøkiliga vøru, sum verður vigað og mett ímillum fólk. Fløgan er eitt amboð til at vísa umheiminum, hvar tónleikasamleikin hjá tí einstaka er rótfestur. Hon er eitt visittkort, sum sigur okkurt um, hvør ein er og um úrslitið av tí skapandi arbeiðinum, sum er gjørt frammanundan.

Her heima er mannagongdin við at geva út eina fløgu heldur øðrvísi enn aðrastaðni, hóast tað meiri enn so kemur fyri, at einstakir bólkar har geva fløgu út á egnum forlagi. Skalt tú geva út fløgu ígjøgnum eitt plátufelag í øðrum londum, merkir tað, at tú skalt hava ein sáttmála við eitt plátufelag. Sáttmálin kann snúgva seg um mangt ymiskt; alt eftir hvussu nógv plátufelagið trýr upp á viðkomandi bólk ella einstakling. Sáttmálin kann fevna um eina fløgu ella tvær fløgur, og hann sigur eisini okkurt um, hvussu langt tíðarskeið, sáttmálin fevnir um, og hvussu nógvan pening, felagið vil brúka til marknaðarførslu, promotion, konsertferðir, gimmics o.a. Hartil inniheldur sáttmálin eina ørgrynnu av øðrum avgerðum; m.a. um ognarrætt og prosentgjald av møguligum yvirskoti.

> *"Tá ið eitt plátufelag umhugsar at taka ein tónleikara til sín, so spyr tað fyrst, hvussu nógv tað fer at kosta teimum. Tað spyr ikki, hvussu nógvar pengar, tað kann vinna av hesum tónleikara"*. Richard Ogden, Sosialurin, 8. desembur 2004

Tað er sera torført hjá einum ungum óskrivaðum blaði at fáa ein slíkan sáttmála. Tað tekur aloftast fleiri ár at koma framat, og vegurin er tungur og fátæksligur, áðrenn ein kemur inn um høgu gáttina. Tey stóru plátufeløgini aftra seg við at gera sáttmála við nýggjar bólkar og einstaklingar í dag, tí tónleikamarknaðurin er so viðbrekin. Heldur satsa feløgini upp á tað kenda og geva heldur út 'best of' hjá 'gomlum' artistum enn at brúka nógvan pening til at skapa nýggjar.

Men harvið er ikki sagt, at eingir aðrir møguleikar eru. Óheftu plátufeløgini 'indies' hava megnað at fylla tað tómrúmið, sum tey stóru feløgini hava latið eftir seg, og í stóran mun eru tað óheftu feløgini, sum finna nýggj gávurík fólk og 'hjálpa' teimum á veg. Tónleikarar hava eisini við alnetinum fingið ein nýggjan miðil og eina nýggja rás at marknaðarføra og breiða út sín tónleik á. Í dag ber til at leggja einstøk løg út á tónleikaportalar á alnetinum, og tað ber eisini til at selja fløguútgávur til plátufeløg, sum bert eru virkin á alnetinum. Ein má tó ikki síggja burtur frá, at framvegis krevst miðvís marknaðarførsla gjøgnum aðrar miðlar fyri at skapa kunnleika um tónleikin, hóast alnetið verður nýtt til útbreiðslu.

*„99 prosent av tónleikarunum fáa einki altjóða gjøgnumbrot ella hitt í einum landi, og tí skal nógv til fyri at vinna fram".* Richard Ogden, Sosialurin, 8. desembur 2004

Her heima er einki plátufelag, sum tekur ein tónleikara ella bólk heilt undir veingirnar og hevur fullkomna fíggjarliga ábyrgd av einari fløguframleiðslu. Til tað krevst nógvur íløgupeningur, og hann hava føroysku feløgini ikki. Marknaðurin er ikki nóg stórur til at fíggja teirra virksemi, tá ið tað snýr seg um fløgusølu í Føroyum. Ístaðin virka feløgini sum útgávufeløg, ella 'labels', har ein fløga verður breidd út gjøgnum tað netverk og sølulið, sum viðkomandi felag hevur aðrastaðni. Vanliga stendur tónleikarin sostatt meiri ella minni við fullari ábyrgd av kostnaðinum sjálvur, tó so, at plátufeløgini Tutl og 3'arin taka sær av sjálvari framleiðsluni/margfaldingini av master-fløguni og húsanum (sí annars partin um plátufeløg á síðu 37).

Myndin av mannagongdini sær soleiðis út:

**Mynd 9: Fløguframleiðsla**



At framleiða eina fløgu kostar ímillum 30.000 og 700.000 kr her heima. Aðrastaðni kann ein fløguframleiðsla kosta nógv meiri. At tað er so stórt lop ímillum ta bíligastu og dýrastu fløguna kemst av, at tað er sera ymiskt, hvussu nógva tíð ein brúkar í upptøkuhølinum, og hvønn leiguprís hesi hølir krevja. Føroyski tónleikaheimurin er lítil, og tískil kemur ein lættari og bíligari frá nógvum við at kenna onkran, sum hevur ta útgerð, ið einum tørvar. Eisini veldst kostnaðurin um, um talan er um ein einstakling ella bólk, og sjálvandi endurspeglar kostnaðurin í flestu førum eisini ambitiónsstøðið í framleiðsluni; munur er tískil á, um fløgan er ætlað føroyska marknaðinum, ella um ein ætlar at selja hana aðrastaðni; t.d. í sambandi við konsertferðir.

## Upptøkuhølir

Tað ber ikki til við avmarkaða innlitinum í hesum álitinum at nevna tey upptøkuhølir, sum einstaklingar hava ymsastaðni í Føroyum. Tað er annars rættiliga vanligt í dag, at einstakir tónleikarar, ið eisini hava skil fyri ella ynskja at fáa førleika til framleiðslutøkni og mannagongdir, hava ognað sær útgerð sjálvir.

**Útvarpshøllin** verður av flestu tónleikarunum tikin fram um sum tað upptøkuhølið, ið er best, tí útgerðin har er góð, og nýggj útgerð verður keypt, tá ið tað er neyðugt at dagføra tøknina. Hetta er nakað, ið tey privatu feløgini ikki hava orku til, og tískil er vandi altíð fyri, at útgerðin hjá teimum ikki lýkur tey krøv, sum tónleikararnir seta.

Flestu framleiðslufeløgini eru í miðstaðarøkinum, men tað eru tó tvey upptøkuhøli aðrastaðni. **Studio Pegasus** í Klaksvík er annað teirra, og tað hevur heilt fitt av virksemi. Síðan byrjan hevur Pegasus tikið upp einar 15-20 fløgur tilsamans, og útgerðin er júst bygd út. Tær flestu fløgurnar eru tengdar at umhvørvinum í Klaksvík. Komandi ár hevur Studio Pegasus tríggjar nýggjar útgávur á breddanum, og tær snúgva seg um bólkar og einstaklingar úr Klaksvík/Norðuroyggjum.

**REMA** er studio, ið heldur til í Runavík. Virksemið í REMA er eisini tengt at tí tónleikavirksemi, sum er á skálafjarðarleiðini. Fyri einum 20 árum síðan var hetta eitt virkið upptøkuhøli, men í dag er útgávuvirksemið heldur minni, enn tað hevur verið.

**Skýrák** er eitt nýtt studio yviri við Strond í Havn. Fleiri av bólkunum, sum nýliga hava givið út fløgur her heima, hava brúkt hetta studio. Í mun til onnur er fastur framleiðari/ljóðmaður/tøkningur knýttur at staðnum, og hann kann taka sær av sjálvari framleiðsluni. Síðan mars mánaða 2004 eru 7 fløgur tiknar upp umframt tónleik/ljóðmyndir til 5 leikir. Í løtuni verður seinasta hond løgd á eina DVD-útgávu við Teiti Lassen, sum Universal Records hevur umbiðið til 5.1 í Surroundmix. Fleiri fyrispurningar eru komnir úr útlondum, og upptøkuhølið er bílagt 6 mánaðir fram í tíðina.

**JakZac Studio** heldur til í lýsingafyritøkuni Reproz. Fyrsta fløgan hjá JakZac sá dagsins ljós í 1997, og JakZac hevur síðan tá framleitt einar 35 til 40 fløgur. Virksemið er rættiliga regluligt har.

Studio hjá **Kristoffur Mørkøre** er helst tað nýggjasta her heima. Tað heldur til í Tórshavn.

| |
|---|
| *Hvussu er lættast at gerast millióningur? At vera milliardingur og keypa eitt studio!* Ben Malén, á tónleikaráðstevnu í Norðurlandahúsinum, 4. oktobur 2004. |

Endurgevingin omanfyri sigur eitt sindur um, at tað er torført at fáa framleiðslufyritøkur at bera seg fíggjarliga. Síðan telduheimsinnrásina er tað vorðið verri, tí við tí nýggju tøknini og amboðunum, sum hvør telda kann hava í dag, er tað møguligt hjá einstaklingum fyri lítið og lætt at ogna sær tøkni, sum kann framleiða fløgur (master).

Hóast tað eisini her heima eru einstaklingar, ið hava hesa útgerð, síggja vit framvegis nýggj upptøkuhøli stinga seg upp. Hetta bendir eisini á, at útgávuvirksemið (borið saman við íbúgvaratalið) er størri her heima enn aðrastaðni, og møguliga eisini, at føroyskir tónleikarar fara meiri siðbundið til verka, tá ið tað snýr seg um upptøkur og slag av upptøkum.

## Plátu- og útgávufeløg

Her heima hava vit fleiri plátufeløg, men føroysku plátufeløgini gera ikki beinleiðis peningaíløgur í nakran tónleikara ella nakra fløgu. Tey eru meiri at rokna sum 'labels' og útbreiðslufeløg. Tey váða sostatt sjáldan nakran pening. Runt roknað verða einar 40 fløgur givnar út á hvørjum ári í Føroyum. Av hesum eru eisini savnsfløgur og endurútgávur av plátum. Av fløgum við nýggjum tilfari koma 25-30 út um árið. Mest selda fløgan hjá 3'aranum, sum helst er størsti fløguhandil í Føroyum, var savnsfløgan Popp List 3, sum 3'arin og Tutl góvu út. Higar til eru 1.600 eintøk at Popp List 3 seld.

**Tutl**
Tutl er største plátufelag í Føroyum. Í 2003 gav Tutl út 26 fløgur. Av teimum vóru 20 nýggjar útgávur, og hinar 6 vóru plátuendurútgávur. Tilsamans vórðu framleidd 43.065 eintøk í 2003 og 27.926 eintøk í 2004. Tutl er felag hjá tónleikarum. Bólkar, sum geva út, fíggja ofta útgávuna sjálvir, og felagið tekur sær av útbreiðslu, katalogi, heimasíðu, upphavsrætti og øðrum, sum er knýtt at marknaðarførsluni. Tutl hevur eisini, sum einasta plátufelag, samstarvsavtalur við útlendsk útbreiðslufeløg; m.a. í Íslandi; og harafturat selur Tutl fløgur ígjøgnum The Orchard, sum er eitt útbreiðslufelag til fyritøkur, sum bæði selja vanligt og talgilt á alnetinum. Dømi um slíkar eru Amazon og iTunes. Tutl selur umleið 1.000 føroyskar fløgur til útlandið um árið ígjøgnum on-line-søluna á www.tutl.com og umleið 6.000-7.000 ígjøgnum útbreiðslufeløg og í sambandi við konsertferðir í útlondum.

**3'arin**
3'arin gevur út umleið 5 fløgur um árið, men hevur annars útbreiðslusáttmálar við fleiri útgávufeløg; t.d. Landing Duck hjá Edvardi Nyholm Debess, Royal Music of Denmark og Tutl. Tá ið 3'arin fer inn í eina fløguútgávu, tekur hann yvir alla framleiðslu eftir at 'master' og filmurin til húsan eru komin undir land. 3'arin tekur sær sostatt av framleiðsluni, NCB og marknaðarførslu- og søluarbeiði. Tó hevur 3'arin staðið fyri trimum heildarútgávum soleiðis at skilja, at 3'arin hevur goldið allan framleiðslukostnaðin og alla marknaðarførsluna. Onkur av hesum heildarútgávum er gjørd saman við JacZac Studio. Runt roknað hevur 3'arin verið við til at geva út 60 fløgur. Av samlaðu fløgusøluni í handlinum eru umleið 30% føroyskar útgávur.

**Evangeliska Røddin, EVR**

Evangeliska Røddin (EVR) hevur givið út tríggjar fløgur í 2004. EVR er elsta útgávufelag í Føroyum og hevur givið nógvar fløgur út; einar 50-60 tilsamans. EVR tekur sær av øllum útreiðslum, ið standast av at framleiða fløguna, og selur so fløgurnar ígjøgnum fløguhandlar (3'aran, HCW Tórgarð og aðrar handlar) men EVR hevur eisini sjálv goymslu og selur beinleiðis til kundan. Nakrar fløgur selja heilt væl; fleiri túsund eintøk. Ikki allir handlar vilja binda seg at keypa fløgurnar, men hesum er torført at liva eftir og við, tí mvg-rokningar, NCB og annað skal gjaldast beinanvegin ella so hvørt, og tí er avtalan, at tær fløgur, ið ikki verða seldar, skulu latast EVR aftur.

**Landing Duck Records**

Hetta útgávufelagið er rættiliga nýtt og hevur 4 útgávur á baki higartil. Tað er Edvard Nyholm Debess, sum eigur og rekur tað. Fløgusølan gongur fyri seg á alnetinum, á heimasíðu felagsins, men fløgurnar eru eisini at fáa í 3'aranum. Eitt av endamálum felagsins er í størri mun at breiða út og eksponera dygdargóðan og fjølbroyttan føroyskan tónleik. Grundhugsanin er, at um ein fløguverkætlan kostar 150.000 kr, eigur hon at fáa betri sømdir (innan fyri PR, sølu og marknaðarførslu) enn ein framleiðsla, ið kostar 30.000 kr. Felagið tekur sær tó ikki av tí fíggjarliga partinum av sjálvari fløguframleiðsluni, men stendur fyri útbreiðsluni og umsitingini annars.

**Nettovirðið**

Nettovirðið av fløgusøluni er umleið 80-100 kr fyri hvørja fløgu í Føroyum. Útflutningsvirðið er umleið 50-60 kr; tað veldst um innflytaraland. Nettosølan hjá Tutli ígjøgnum The Orchard á alnetinum er umleið 6 USD; t.e. umleið 35 kr. Hvussu stórt nettovirðið er av søluni á alnetinum ella uttanlands, hongur eisini saman við dollaravirðinum. Tá ið Tutl byrjaði at selja í útlondum, var dollaravirðið 12 kr. Í dag er dollarin bara verdur 6 kr.

Kostar ein fløga 200.000 kr at framleiða, er neyðugt at selja 2.500 eintøk, fyri at hon skal bera seg fíggjarliga.

Meginreglan í Føroyum er at prenta í mesta lagi 2.000 eintøk av hvørjari útgávu (at byrja við) tí hetta verður mett at vera tað, ið ein føroysk fløga kann selja á heimamarknaðinum. Ofta verða fyrst 1.000 eintøk prentað, og síðan verður uppafturprentað eftir eftirspurningi. Tað eru bert ein ella tvær fløgur um árið, sum selja fleiri enn 2.000 eintøk. Hvussu stórt upplagið er, veldst eisini um, um bólkurin fer konsertferð, tí tá verða fløgur tiknar við at selja. Útlendsku fløgurnar selja sjáldan meira enn 1.000 eintøk, og tað verður hildið at vera góð søla, um tær selja 500 eintøk. Samanum tikið kann sigast, at fleiri av føroysku útgávunum hava eina longri livitíð enn tær útlendsku; væl at merkja, um lurtarunum og útvarpinum dámar tær. Men sera nógvar føroyskar fløgur koma út beint áðrenn jól og verða púra gloymdar eftir jól og tískil sjáldan at hoyra aftur. Útlendsku fløgurnar eru ofta við í ávísum átøkum hjá plátufeløgunum. Hetta ger, at tær 'livna' uppaftur og harvið fáa eina longri livitíð.

## Feløg

Tað eru heilt nógv feløg, sum røkja ymisk tónleikaáhugamál (sí Hjárit VI). Fleiri av teimum eru sprottin úr einum ávísum øki; t.d. Grót í Gøtu ella Mentón í Havn; hóast teirra virksemið breiðir seg út um egið øki. Onnur eru meiri yvirskipað og røkja áhugamálini hjá tónleikarum um alt landið. Felags fyri øll feløgini er, at tey eru áhugafeløg og ikki yrkisfeløg. Arbeiðsmegin er ofta sjálvboðin og inntøkurnar ongar ella avmarkaðar til einstakar verkætlanir.

Undir regnskjólssamtakinum LISA hoyrir eitt annað regnskjólssamtak fyri tónleik, nevnliga **Føroya Tónleikarafelag**. Endamál felagsins er vegna tey 4 undirfeløgini at samráðast og gera avtalur við allar tónleikanýtarar/fyrireikarar og annars virka til frama fyri áhugamál limanna. Tey fýra undirfeløgini eru FUT (Føroya UndirhaldsTónleikarafelag) Føroya Fólkatónleikarafelag, Føroya Jazztónleikarafelag og Yrkisfelag Klassiska Tónleikara. Eitt annað felag er Felagið Føroysk Tónaskøld, sum umboðar ein breiðan skara av føroyskum tónasmiðum bæði í klassiska og rútmiska tónleikaheiminum.

Umframt sítt vanliga útgávuvirksemi er felagið Tutl eitt virkið felag í sambandi við at marknaðarføra teir bólkar, sum felagið umboðar ígjøgnum fløguútgávurnar. Tað vóru tónleikarar og tónaskøld, sum í 1977 stovnaðu felagið, ið hevur havt nógv ymiskt felags virksemi síðan. Felagið hevur m.a. ognað sær ein tour-bil, sum limirnir kunnu brúka á konsertferð bæði her heima og uttanlands.

Tað er sera ymiskt, hvussu virkin feløgini eru. Fleiri teirra er sprottin úr einum ráki í tíðini og hava tikið sær av tiltøkum og virksemi, sum síðan er komið í eina fasta legu. Onnur eru meiri ella minni dottin niðurfyri. Tónleikarar hava víst á tørvin á at fáa meira lív og gjøgnumskygni aftur í hesi feløgini; t.d FUT og Føroya Tónleikarafelag; tí teirra tilverurættur er framvegis til staðar, hóast virksemið kann tykjast lítið. Betri er at kveikja nýtt lív í okkurt gamalt, enn at royna at fáa lív í okkurt, sum ikki er til!

## Marknaðarførsla

*"Tað er, sum Elton John segði: Harðari, eg arbeiði, hepnari verði eg".*
Richard Ogden, Sosialurin, 8. desembur 2004

Tað munnu vera sera fáir tónleikarar, ið koma langt í tónleikaheiminum uttan at hava lagt nógv stríð og nógva orku í arbeiðið. Tá ið tað snýr seg um at marknaðarføra ein bólk ella tónleikin, er hetta ofta ein partur av arbeiðinum, sum aðrir persónar ella aðrar fyritøkur taka sær av, tí marknaðarførsla er ein partur av tí undirstøðukervi, sum er í tónleikavinnuni í flest øðrum londum. Tó skal sigast, at áðrenn ein kemur so langt, sum at kunna keypa sær hesa tænastu frá øðrum, hevur bólkurin ella einstaklingurin kanska longu brúkt bæði nógva tíð og orku fyri at náa hesum støði. Tað er ofta hesin sølu- og lýsingaparturin av vinnuni, sum haltar hjá tónleikarunum. Og tískil eru einstaklingar sum t.d. umboðsfólk og feløg komin inn og hava nøktað hendan tørvin á servitan og førleika.

Men soleiðis er ikki her heima. Hesin parturin av vinnuni er næstan ikki til. Í øllum førum er einki felag, sum tekur sær av marknaðarførslu burturav. Men eitt slag av

umboðan fer sjálvandi fram í plátufeløgunum her heima, tá ið tey t.d. eru á sølustevnu og øðrum sølufremjandi tiltøkum uttanlands. Hesi seinastu fáu árini eru eisini komnir nakrir einstaklingar, ið umboða føroyskar tónleikarar og bólkar. Fyri flestu teirra er hetta nakað, ið teir gera umframt 'vanliga' starvið, og arbeiðið snýr seg meiri um idealismu enn um peningaligan áhuga og vinning. Henda gongdin vísir eisini, at tá ið føroyskir tónleikarar royna at koma fram í øðrum londum, tørvar teimum eisini, at virksemið verður umsitið meiri professionelt.

Umframt at duga væl at samráðast við onnur, at duga at práta við fólk og at duga at selja tónleikabólkin og tónleikin, er netverk eitt tað týdningarmesta, ein fær við í skjáttuna, tá ið ein samstarvar við ein umboðsmann. Ígjøgnum ein umboðsmann fært tú ella keypir tú tær atgongd til allar teir persónar, ið viðkomandi hevur samband og samskifti við. Hetta hevur alstóran týdning, tí hóast professionalismu eru persónligu sambondini og persónligu viðmælini tað, ið selur best. Sambondini snúgva seg um starvsfólk í fjølmiðlaheiminum, útvarpsvertir, fólk í plátu- og útgávufeløgum, útbreiðslufeløg, booking-feløg o.s.fr., og tess hægri uppi í valdsstiganum, tey eru, jú størri er møguleikin fyri at fáa ein boðskap á rætta stað, har avgerðirnar verða tiknar. Í so máta eru tað óivað fleiri umboðsfólk her heima, sum mugu byrja á berum, tá ið tað snýr seg um netverk uttanlands, tí hetta er nýtt beiti fyri tey.

Tá ið tað snýr seg um marknaðarførslu her heima, er sjálvandi styttri millum seljara og keypara, og samfelagið er so mikið lítið, at tað er lætt at fáa atgongd til heimildarpersónar. Harvið er ikki sagt, at tað er lætt at sleppa fram at miðlunum, sum kunnu varpa tónleikin ella boðskapin um tónleikin út. Taka vit eitt dømi um ein bólk, ið júst hevur givið út nýggja fløgu, so skal tónleikurin fram í fjølmiðlunum fyri at skapa áhuga hjá keyparunum og møguligu áhoyrarunum fyri eini konsertferð ella framførslu.

**Bløðini**

Bløðini taka væl ímóti t.d. einum tíðindaskrivi, sum greiðir frá fløguni og øllum upplýsingum í sambandi við fløguna. Vendir ein sær til okkurt ávíst tíðindafólk, so ber tað ofta væl til á hendan hátt at fáa viðkomandi at skriva eina grein. Hinvegin er tað verri statt við ummælarum og greinum, sum viðgera og fara í dýpdina við tilfarinum, og hetta er av sonnum ein trotvøra. Vit gera neyvan ov nógv av, tá ið vit siga, at tónleikurin ikki eigur nakran góðan, tá ið hugsað verður um teigapláss, ið regluliga verður sett av til tónleik og annað mentanarligt tilfar. Harvið er ikki sagt, at tað ikki kemur fyri, men tað tykist at vera meiri av tilvild og tengt at, hvør persónur á blaðnum hevur áhuga fyri tónleiki júst tá. Tey ummæli, sum verða skrivað um fløgur ella framførslur í bløðunum, bera eisini í flestu førum á brá av persónligum meiningum og sertokka heldur enn tónlistaligum tulkingum. Tað tykist heldur ikki vera nóg nógv orka til at gera uppleitandi og málrættað arbeiði, tí í flestu førum er tað hann, ið hevur okkurt at selja; t.e. tónleikarin; sum vendir sær til bløðini og ikki øvugt.

> *Teitur Lassen brúkti nógva tíð á bókasavninum í Holstebro, har hann lænti fløgur við ymiskum tónleikarum, sum hann ongantíð hevði hoyrt (um) í Føroyum. Tað kendist fyri hann, sum ein nýggj verð læt seg upp, og hann fann sítt slag av tónleiki har. Í so máta eru Føroyar avmarkaðar, tí tað, ið ein hoyrir av tónleiki, er bert ein brotpartur av øllum tí, sum er.* Samrøða við Teit, 17. novembur 2004.

**Útvarp Føroya**

Útvarpið er her, eins og aðrastaðni, besti miðil at gera vart við eina nýggja fløgu og at fáa fólk áhugað í at ogna sær fløguna. Men fyri nógvar tónleikarar tykist Útvarp Føroya at vera ein miðil, har ið tilvildin ræður; eisini tá ið tað snýr seg um, hvør er vertur í tónleikasendingum. Útvarp Føroya hevur ikki nakran orðaðan politikk, sum t.d. sigur, hvussu nógvan føroyskan tónleik, varpið eigur at spæla í mun til útlendskan tónleik. Útvarpið hevur heldur ikki nakrar fastar mannagongdir hesum viðvíkjandi, og aftur her er úrslitið, at tilvildin ræður, og at slagið av tónleiki veldst um sertokkan hjá vertinum.

Í nøkur ár stóð Útvarp Føroya fyri nøkrum sokallaðum Útvarpsfløgum. Fleiri føroyskir tónleikarar sluppu fram at upptøkuhølum útvarpsins at royna seg við m.a. barnasangum, sum vóru arrangeraðir til fløgurnar. Fløgurnar vóru sera væl dámdar; og tær seldu sera væl; summar yvir 3.000 eintøk.

Tað er torført at bera eyga við tónleikasendingar (Rót & Rútma og Partita undantiknar) sum viðgera og fara í dýpdina við einum ávísum slagi av tónleiki. Her verður hugsað um sløg av tónleiki, sum ikki eru so atkomilig annars hjá áhoyrarunum. Í stóran mun er tann 'trygga loysnin' vald; hetta við at lata fólk sleppa at ynskja sær tað, teimum dámar, heldur enn at læra tey at lurta eftir onkrum nýggjum og ókendum.

Í einum so lítlum landi sum okkara við einum avmarkaðum marknaði hevur tað alstóran týdning, at fjølmiðlarnir varpa út tað, ið rørist í tónleikaheiminum her á landi, og hetta má sigast at vera ein skylda hjá Útvarpi Føroya. Eisini er tað skjótt at hugsa, at almenna skyldan hjá Útvarpi Føroya ikki bert snýr seg um at spæla tónleik men eisini at viðgera hann og fara meiri í dýpdina við honum. Tað eigur tí í hesum viðfangi at verða nevnt, at vetrarhálvuna 2004/2005 hava tvær sendingar verið á skránni, sum viðgera føroyskan tónleik og varpa ljós á nýggjar útgávur. Hetta eru sendingarnar Rokkstovan við Rasmusi Rasmussen og Kultura, sum Leif Láadal og Høgni Djurhuus skipa fyri. Harumframt hevur live-tónleikur verið at hoyrt í sendingini hjá Suna Merkistein og Kára Sólstein seinnapartar fríggjadag.

Spurnartekin kann verða sett við, hvussu ein kann loysa trupulleikan við lítla lutvísa partinum av samlaðu sendiflatuni, sum í løtuni verður brúktur til føroyskan tónleik. Tað er ymiskt, hvussu grannalondini hava valt at loysa hendan trupulleika. Í grannalondum okkara; t.d. Íslandi og Svøríki; er eingin kvotuskipan, sum ásetur, hvussu stórur partur skal vera tjóðartónleikur. Svøríki hevur ta áskoðan, at svenskur tónleikur skal vera eins góður og tann útlendski fyri at sleppa framat, og hetta halda sviar vera mennandi fyri svenskar tónleikarar. Í Íslandi hava út- og sjónvarpsræsurnar ta rættiliga sterku og kanska eisini stoltu siðvenjuna at spæla íslendskan tónleik, hóast eingin kvota er. Eisini hava íslendingar fleiri privatar útvarpsræsir, og onkur teirra hevur valt at hava tað sum sítt sereyðkenni at spæla íslendskan tónleik. Í Fraklandi hava tey valt eina meiri protektionistiska loysn, og tað sama er galdandi fyri Kanada. Bæði londini hava ásett rættiliga høgar kvotur fyri, hvussu nógvan tjóðartónleik loftmiðlarnir skulu spæla.

### Aðrar útvarpsræsur

Umframt Útvarp Føroya er ***Rás2***, sum júst hevur havt 5 ára føðingardag. Stórur partur av tíðini hjá Rás2 verður nýtt til tónleik. ***Lindin*** er ein andalig rás og er sostatt ein góður miðil til teir einstaklingar og bólkar, ið spæla andaligan tónleik. ***Televarpið*** er einasti miðil í Føroyum, sum hevur lagt seg eftir at spæla føroyskan tónleik burturav.

### Sjónvarp Føroya

Í talvuni frá Koda, sum vísir, hvussu nógvur føroyskur tónleikur verður spældur í Sjónvarpi Føroya, sæst, at hesin partur er minni enn 2%. Tað kann sjálvandi undra mong, at so lítil partur er føroyskur, men heldur ikki har er nakar orðaður politikkur á økinum. Harvið er ikki sagt, at Sjónvarp Føroya als ikki brúkar orku til tónleik. Tað er ein av høvuðsfyriskiparunum og stuðlunum í Prix Føroyum. Men annars møtir sjónvarpið bert hendinga ferð upp til tónleikatiltøk, og flestu fyriskipararnir ella tónleikararnir, sum tosað hevur verið við í sambandi við hetta álitið, hava víst á vantandi áhugan og viljan hjá sjónvarpinum at vera til staðar og skjalprógva tað, sum rørist í tónleikaheiminum. At skjalprógva samtíðina er væl eitt av endamálunum við einum almennum føroyskum loftmiðli. Av sendingum, sum sjónvarpið sjálvt ger, er tað bert Mentanartíðindi, sum ber fram tíðindi og hevur samrøður, sum snúgva seg um tónleik; hetta tó í kapping við allar hinar listagreinarnar.

Báðir teir almennu loftmiðlarnir, Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya, hava eina almenna tænastuskyldu, og í so máta hava teir bæði møguleika og skyldu at hugsa víðari enn at geva fjøldini tað, sum fjøldin heldur, at hon vil hava. Hetta mótvegis einari privatari rás, sum í nógv størri mun er bundin av, hvat lurtarin/hyggjarin vil hava. Útvarpið og sjónvarpið kundu lagt seg meiri eftir at gjørt sendingar, sum aðrastaðni verða kallaðar ‘edutainment’; altso undirhald við ávísum lærdómi og uppaling í innihaldinum (hartil eisini sendingar, sum raka smalari málbólkar). Men hetta krevur, at hugburðurin broytist, og at ein orðaður politikkur ella ein innanhýsis reglugerð/mannagongd verður tikin í nýtslu. Hvussu verður nú, ið stovnarnir báðir eru lagdir saman, kann ein bert gita um, men eyðsæð er, at hetta er ein kærkomin møguleiki at umskipa, umhugsa og umgreina Public Service-uppgávurnar hjá stovninum; serstakliga hvat ið tónleikinum viðvíkir.

### Alnetið sum sýnisgluggi

Alnetið er vorðið sera týðandi partur av marknaðarførsluni hjá tónleikabólkum og einstaklingum. Eisini her heima hava flestu bólkarnir, ið vilja sleppa víða við sínum tónleiki, egna heimasíðu við tilfari um bólkin. Summir hava eisini ljóðfílar á síðuni, soleiðis at ein kann fáa eina smakkroynd av tónleikinum. Tað er torført at koma sær framat aðrastaðni, um ein ikki hevur hendan sýnisgluggan at vísa á. Fyrimunurin er sjálvandi, at her hava føroyingar, sum annars eru rættiliga avbyrgdir frá øðrum hentleikum og sambondum úti í heimi, eina eins stóra eksponering, um ein bert dugir at brúka hana. Í øðrum londum eru tónleikaportalar, sum fyri tónleikarar í landinum eru ein lýsingagluggi og hartil eisini eitt portur hjá útlendskum áhugaðum at kaga inn um og síggja, hvat ið landið hevur at bjóða á tónleikaøkinum. Dømi um slíkar portalar eru íslendsku www.tonlist.is og www.musik.is, sum á ymiskan hátt hava tikið alt tónleikavirksemið í Íslandi undir veingirnar. Her kann ein lurta eftir íslendskum (og útlendskum) fløguútgávum og fáa kunning um tónleikarar, feløg, útgerð, konsertir o.s.fr.

Í Føroyum hava vit eisini ein portal, www.pop.fo, sum eisini er eitt samstarv ímillum Sosialin (sum stendur fyri at skriva tíðindi) og Føroya Tele (sum hevur tann tøkniliga partin um hendi). Umframt tíðindi er eisini eitt forum, har ymisk evni koma á kjakbreddan. Í stóran mun eru tað tey somu fólkini, sum koma fram við sínum meiningum; spurningurin er so, um nakar nýtir hesar meiningar til nakað. Her verður hugsað um tann kritikk, sum viðhvørt kemur undan kavi um tiltøk, útgávur og so framvegis. Ein trotvøra á hesari síðu, um ein skal lýsa hana sum ein portal og sýnisglugga hjá føroyskum bólkum, er møguleikin at hoyra tónleik og fáa meira kunning um bólkar, fyriskiparar o.s.fr. Hartil verður síðan ikki dagførd regluliga og er bert á føroyskum.

Tá ið tað snýr seg um at marknaðarføra føroyskan tónleik á alnetinum, er tað óivað heldur heimasíðan hjá Tutli, www.tutl.com, sum hóskar betur, tí hon hevur ljóðfílar, og hartil er hon eisini á enskum, sum jú er ein fortreyt fyri, at áhugaðir útlendingar skilja, hvat er at lesa um tónleikin og bólkarnar. Prix Føroyar hevur eisini eina heimasíðu, www.prix.fo, og í sambandi við at tiltakið er broytt til Atlantic Music Event er ætlanin at nýta hesa síðu til PR-fremjandi endamál. Veljast kann ímillum føroyskt, enskt og danskt, men enn vantar at leggja enskan og danskan tekst á (tó at nakað er komið). Meiningin er tó, at meðan prixið er, skal vera gjørligt at taka ljóðfílar niður av alnetinum og soleiðis hoyra tað feskasta, sum finst á føroyska tónleikapallinum. Eisini ber til at lurta eftir skeringunum á Popp List-fløguni beinleiðis á netinum á www.popplist.fo, og hetta kann eisini roknast sum eitt slag av marknaðarførslu fyri teir bólkar og einstaklingar, sum eru á fløguni.

Nakrir bólkar nýta eisini alnetið at 'shoppa út' á. Hetta skal skiljast soleiðis, at demo-løg verða send til t.d. útgávufelag ella portal á netinum. Fyri fleiri bólkar og einstaklingar er ein heimasíða eisini ein háttur at koma beinleiðis í samband við fjepparan uttan mun til, hvar ið hann býr. Á heimasíðuni hjá Brandi Enni, www.brandur.com, hevur verið møguligt at samskift við Brand, og hetta var væl umtókt ímillum ungu fjeppararnar. Hóast Brandur ongantíð hevur framført í USA, hevur hann 500 fjeppara har og eisini ein fjeppara-bólk, sum hevur gjørt egna heimasíðu, http://get-me-to/brandur. Hetta sigur eitt sindur um, hvussu máttmikil hesin miðil kann vera.

**Bøkur**
Í 2001 og 2002 komu áhugaverdar tónleikabøkur, sum Studio Pegasus gav út. Hetta vóru afturlítandi bøkur, sum greiða frá tí, ið er farið fram á føroyska tónleikapallinum, og í so máta eru tær fyrst og fremst eitt skjalprógv. Hinvegin kunnu hesar bøkur eisini metast sum ein annar/nýggjur sýnisgluggi hjá føroyskum tónleikarum, og hetta hevur týdning fyri viðurkenningina og sjálvsvirðið hjá tónleikarunum, sum eru nevndir í bókini. Hugsast kann, at orka ikki hevur verið at geva fleiri bøkur út av hesum slagi, og tískil kom eingin bók út í 2003. Men leisturin í bókunum kundi væl verið brúktur til heimasíðu/portal, sum seinni varð bygd út við ljóð- og myndafílum.

## Inntøkumøguleikar

Hyggja vit meiri alment at tónleikavinnuni sum ein inntøkukelda, er virðisøkingin stór, frá tí at eitt hugskot til ein sang verður til í hugaheiminum hjá einum sangskrivara, til sangurin verður hoyrdur á fløgu, á eini konsert, í útvarpi ella

sjónvarpi, ella á alnetinum (sí rundingar á Mynd 10). Í hesi longu røð eru eisini nógvir aktørar (sí fýrkantar á Mynd 10) sum hvør sær spæla ein týdningarmiklan leiklut fyri at framleiða ta endaligu vøruna. Tilgongdin kann lýsast nakað soleiðis:

**Mynd 10: Meirvirðisketan**




Kelda: (Power, D. "Behind the Music", Profiting from Sound: A system approach to the dynamics of the Nordic Music Industry, March 2003, Nordic Industrial Fund)

Tónleikavinnan hevur tríggjar útflutningsinntøkumøguleikar: Hon kann selja eina vøru, selja eina tænastu ella fáa gjøld fyri upphavsrætt (royalties).

1. **Vøran:** Hetta snýr seg um endaligu vøruna; t.e. okkurt ítøkiligt. Vøran fevnir um annað enn 'bert' fløguna. Við í hagtølunum um tónleikavøruna hoyrir 'ljóðupptøkuútgáva' (eisini DVD og sjónbond) endurframleiðsla av ljóðbondum, framleiðsla av óinnspældum miðlum, framleiðsla av ljóðførum, heilsøla við innspældum og óinnspældum fløgum, DVD, sjónbondum o.ø. og plátuhandlar og ljóðførishandlar.

2. **Tænastan:** Hetta snýr seg um alla eftirgerðina av tónleikinum. Meiri ítøkiligar eru fimm ymiskar tænastur, ið inntøkur stava frá; t.d. lisensinntøkur frá útlondum til donsk plátufeløg. Fleiri av størru plátufeløgunum við deildum í øðrum londum útflyta ikki fløgur um landamørk, men gjalda ístaðin ein lisens (royalties) til ta deildina, sum hevur sáttmála við tónleikaran. Framleiðslan og útbreiðslan verða so framd í tí landinum, har tónleikurin skal seljast. Tænastan fevnir eisini um inntøkur, sum t.d. tónleikarar fáa fyri sína framførslu í útlondum, og um tær inntøkur, sum t.d. studio ella framleiðarar fáa frá útlendskum tónleikarum. Harumframt fevna tænastur eisini um inntøkur frá útlondum, sum t.d. útgávufeløg fáa.

3. **Royalties:** Hetta er gjaldið, sum upphavsrættarhavarin; t.e. sangskrivarin, tekstskrivarin ella framførarin; fær frá viðurkendum innkrevjingarfeløgum sum t.d. Koda og Gramex.

---

[c] Tónaskald, sangskrivari, framførari, sangari
[d] Umboðsmaður, framleiðari, upptøkumaður, tøkningur, plátufelag, útgávufelag
[e] Heilsøla, útbreiðari, alnet-útbreiðari, plátuhandlar
[f] Umboðsfólk, marknaðarførslufólk, stylistar, sniðgevar (húsin) myndatakarar, sakførarar, feløg (fak, collective, almenn)

**Koda** røkir upphavsrættin hjá tónaskøldum, sangskrivarum og tónleikaútgevarum, og krevur inn pening teirra vegna, tá ið teirra tónleikur verður spældur alment. Koda tekur sær sostatt av framførslurættindunum. Hartil hevur Koda samstarv við líknandi innkrevjingarfeløg alla staðni í heiminum, soleiðis at peningur verður kravdur inn, tá ið tónleikurin hjá limunum verður spældur í øðrum londum. Við samstarvsavtalunum hjá Koda-feløgunum eru tónleikarættindini hjá limunum tryggjað í 140 londum ígjøgnum 70 ymisk feløg.

**NCB** (Nordisk Copyright Bureau) røkir mekaniska upphavsrættin til tónleikaverk vegna tónaskøld, tekstskøld og útgávufeløg. Mekaniski upphavsrætturin fevnir um rættin til at spæla inn tónleik, framleiða eindir og breiða út eindir. NCB hevur sostatt ábyrgd av at krevja pening inn til sangskrivarar, tekstskøld o.o., tá ið teirra verk verða spæld inn og breidd út í útlondum.

**Gramex** røkir áhugamálini hjá útinnandi tónleikarum og framleiðarum og krevur inn pening fyri almennar framførslur í Danmørk. Gramex røkir eisini upphavsrættin uttan fyri Danmørk og krevur sostatt pening inn fyri framførslur, sum danskir (og føroyskir og grønlendskir) tónleikarar hava í øðrum londum.

**Mynd 11: Inntøkur úr útlondum**

| Ár | KODA | NCB | Gramex |
|---|---|---|---|
| 2000 | 20.300.000 | 12.328.377 | 1.653.098 |
| 2001 | 22.300.000 | 15.039.818 | 1.958.941 |
| 2002 | 25.800.000 | 12.926.436 | 2.116.382 |

Kelda: Analyse af dansk musikeksport, januar 2004, COWI

Sum tað sæst í tølunum, hevur tað verið ein vøkstur í inntøkunum hjá øllum feløgunum uttan NCB, sum hevði eina afturgongd í 2002. Inntøkurnar hjá NCB eru nær tengdar at fløgusøluni, og sostatt vísa tølini eisini kreppuna í fløgusøluni, sum tey flestu londini uppliva í løtuni.

**Her heima**

Hyggja vit nærri at, hvørjar inntøkumøguleikar tónleikararnir hava her heima, eru teir rættiliga avmarkaðir samanborið við onnur lond. Her á landi kann ein ikki rokna við at fáa nakrar inntøkur frá t.d. einum plátusáttmála, tí slíkir eru ikki vanligir. Ein kann heldur ikki vera vísur í at fáa eitt yvirskot av einari fløguútgávu, tí fyri yvirhøvur at kunna bera seg fíggjarliga skal hon vanliga selja ímillum 1.500 og 2.000 eintøk; alt eftir, hvussu nógv framleiðslan hevur kostað.

Fyri 15 árum síðan gav Terji Rasmussen út fløguna Terji og Føstufressar. Hetta er ein tann mest selda fløgan yvirhøvur í Føroyum, og hon varð eisini kosin aldarinnar fløga um aldaskiftið. Fløgan hevur higartil selt eini 6.000 eintøk, og hon varð givin út á egnum forlagi. Fyri at fíggja útgávuna noyddist Terji at taka eitt bankalán, og í 13 ár hevur hann goldið 2.000 kr um mánaðin í rentu og avdráttum fyri hetta lán. Hetta sigur ikki so lítið um avmarkingarnar á føroyska marknaðinum, har heldur einki vinnuligt plátufelag er. So galið er tað kanska ikki nú, tí tað er vorðið alsamt meiri vanligt at søkja um stuðul til útgávurnar, og hóast neyvan nakar fær stuðul til allan kostnaðin, so er stuðulin við til at tálma útreiðslurnar.

**Samsýningar**
Flestu tónleikarar droyma um at hava tónleik sum yrki, og ein av fáu inntøkukeldunum hjá nógvum er tann lønin, teir fáa við at spæla til dans ella á veitslum, konsertum og festivalum. Henda inntøkukelda er tó avmarkað, tí tað bert eru boð eftir live-tónleiki um vikuskiftið og okkurt hendinga miðvikukvøld. Hartil er eingin meginregla um, hvat tónleikararnir fáa í samsýning; tað er upp til einstaka tónleikaran ella bólkin at samráðast við spælistaðið um samsýning. Tónleikararnir hava ikki nakað yrkisfelag, sum kann arbeiða fyri at fáa eina minstuløn og onnur slík viðurskifti í rættlag. Nú er tó ein ávís broyting komin í, tí tónleikarar tykjast meiri medvitaðir um virðið í sínum arbeiði, og tað er komið fyri, at teir hava boykottað ávíst spælistað, sum ikki samsýnir teimum virðiliga. Eisini hava nakrir bólkar fingið sær umboðsmann, sum kanska betur megnar at avtala eina størri samsýning. T.d. letur Café Natúr 500 kr fyri kvøldið, og tað ger ikki mun, hvør ið spælir, og hvussu nógv spæla; so eru fleiri í bólkinum, kann tað gerast smábýtt. Havast skal eisini í huga, at hetta eru B-inntøkur, sum skattur skal gjaldast av. Nettovirðið verður tí neyvan ovurstórt!

Nakrir tónleikarar eru rættiliga eftirspurdir til at spæla, syngja ella framleiða á fløgum hjá øðrum. Hetta er sjálvandi eisini nakað, ið teir (eiga at!) fáa samsýning fyri, men tá ið avtornar, og allar aðrar meiri 'fastar' útreiðslur eru goldnar, eru tað ofta tónleikararnir sjálvir, ið eru við sviðusoð og ikki fáa nakað fyri sítt arbeiði.

Sum sangskrivari, útgevari og tónleikaframførari eigur tónleikarin her heima eisini at fáa gjald fyri upphavsrætt, um tað so er fyri ein sang, eina fløgu ella framførslu. Men reglurnar fyri útgjald eru nakað øðrvísi her heima, og útgjaldið fellur ikki altíð beinleiðis aftur til tónleikaran.

## Upphavsrættur í Føroyum

Endamálið við upphavsrættarlógini er at tryggja einkarættin hjá øllum upphavsrættarhavarum og harvið røkja áhugamál teirra, men lógin skal eisini tryggja, at til ber hjá øðrum at brúka vardu verkini. Upphavsrættarlógin er sostatt eisini eitt amboð til at veita eitt nú tónleikarum gjald fyri, at verk teirra verða brúkt. Tí verða í summum londum gjørd ávís tiltøk, fyri at heimliga tónleikalívið verður stuðlað mest møguligt ígjøgnum upphavsrættaravgjøldini; eitt nú við kvotum fyri hvussu nógvur útlendskur tónleikur kann verða spældur í útvarpum, ella har tað ein dag um árið bert verður spældur tónleikur úr egnum landi.

Føroyskir tónleikarar, sangskrivarar, tekstskrivarar og aðrir upphavsrættarhavarar eru umboðaðir av donsku upphavsrættarfeløgunum Koda og Gramex og norðurlendska NCB. Hetta samstarv snýr seg í høvuðsheitum um, at føroyskir fjølmiðlar, stovnar og fyritøkur, sum spæla tónleik fyri almenninginum ella sínum viðskiftafólki, rinda ávíst gjald fyri hesa tænastu til Koda og Gramex. NCB fær ávíst gjald fyri hvørja einstaka føroyska fløgu, ið verður framleidd og givin út. Gjaldið til Koda verður roknað út við støði í fráboðanum frá t.d. Útvarpi Føroya um hvat og hvussu nógvur tónleikur verður spældur. Hetta er galdandi fyri bæði føroyskan og útlendskan tónleik. Føroyskir upphavsrættarhavarar (t.e. bert teir, ið eru limir í Koda og hava meldað verk síni til Koda) fáa síðan ávíst gjald fyri tað.

Í Koda vóru í juli 2004 næstan 600 føroyskir limir/upphavsrættarhavarar.

**Mynd 12: Útgjald frá Koda til føroyskar limir**

| 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 |
|---|---|---|---|---|
| 358.073 kr | 328.854 kr | 598.149 kr | 483.972 kr | 583.882 kr |

Kelda: Koda's Nyhedsbrev til færøske medlemmer, juli 2004

Gjøldini frá Koda til føroyskar upphavsrættarhavarar hava verið eitt sindur óstøðug, men samanum tikið kann sigast, at tað hevur verið ein stórur vøkstur í sýnda tíðarskeiði. Serliga frá 2000 til 2001, tá ið útgjaldið hækkaði meira enn 250.000 kr.

Koda fekk 1,9 millión kr úr Føroyum í 2003. Av hesum rindaði Útvarp Føroya 710.000 kr og Sjónvarp Føroya 505.000 kr. Restina rindaðu hini útvørpini í Føroyum. Koda hevur eisini avtalur við Norðurlandahúsið og Summartónar Festivalin eins og við 120 matstovur, handlar, fyritøkur o.t. Fyri stuttum hevur Koda eisini gjørt avtalu við Smyril Line.

Reglurnar fyri Gramex eru øðrvísi í Føroyum enn í Danmørk, tí her verður peningurin ikki goldin beinleiðis til tónleikararnar men til tvey feløg ístaðin. Tey eru Framleiðslufelagið (vegna framleiðararnar) og Føroya Tónleikarafelag (vegna tónleikararnar). Grundgevingin er tann, at útgjøldini eru ov smá til at tað umsitingarliga loysir seg at gjalda beinleiðis til tónleikaran. Ístaðin er avtala gjørd við Útvarp Føroya, Sjónvarp Føroya og onnur útvørp um, at Gramex runt roknað rindar aftur til Føroya helvtina av tí, sum hesi hava goldið Gramex. Sostatt fer eingin fráboðan fram, tí sagt verður, at Útvarp Føroya ikki sær seg ført fyri at boða frá. Í 2003 vóru 117.303 kr goldnar til hvørt felag; t.e. 234.606 kr tilsamans; og í 2002 vóru 112.848 kr goldnar (kelda: samrøða við Gramex, 8. oktobur 2004).

Útvarp Føroya, Sjónvarp Føroya og aðrir stovnar og aðrar fyritøkur, sum hava avtalu við Koda, hava skyldu at boða frá, hvussu nógv útvarpað tíð fer til tónleik og hartil, hvussu býtið er ímillum føroyskan, danskan og annan útlendskan tónleik.

**Mynd 13: Útvarp Føroya**

| | 2000 | 2000 | 2001 | 2001 | 2002 | 2002 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Upphavsrættarhavari** | **Tónleikatíð** | **Prosent** | **Tónleikatíð** | **Prosent** | **Tónleikatíð** | **Prosent** |
| **Føroyskur** | 17.906 | 14,83 | 16.258 | 12,95 | 14.681 | 13,64 |
| **Danskur** | 16.476 | 13,64 | 15.245 | 12,12 | 16.863 | 17,36 |
| **Onnur lond** | 86.373 | 71,53 | 94.234 | 74,93 | 74.249 | 69,00 |
| **Samlað** | 120.755 | 100,00 | 125.764 | 100,00 | 107.613 | 100,00 |

Kelda: Koda's Nyhedsbrev til færøske medlemmer, juli 2004

**Mynd 14: Sjónvarp Føroya**

| | 2000 | 2000 | 2001 | 2001 | 2002 | 2002 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Upphavsrættarhavari** | **Tónleikatíð** | **Prosent** | **Tónleikatíð** | **Prosent** | **Tónleikatíð** | **Prosent** |
| **Føroyskur** | 1.435 | 4,09 | 987 | 3,40 | 549 | 1,49 |
| **Danskur** | 5.251 | 14,97 | 3.902 | 13,44 | 6.780 | 18,42 |
| **Onnur lond** | 28.396 | 80,94 | 24.139 | 83,16 | 29.478 | 80,09 |
| **Samlað** | 35.082 | 100,00 | 29.028 | 100,00 | 36.807 | 100,00 |

Kelda: Koda's Nyhedsbrev til færøske medlemmer, juli 2004

Tað eigur at verða nevnt, at samanborið við onnur lond fáa Føroyar størri part aftur av tí penganøgd, sum vit gjalda. Hesin partur kundi verið enn størri, um loftmiðlarnir spældu meira føroyskan tónleik, og um føroyskir bólkar og einstaklingar høvdu fleiri framførslur uttanlands. Eisini má okkurt gerast, fyri at fáa føroyskar tónleikarar at boða frá sínum løgum og framførslum, soleiðis at teir ikki missa hendan inntøkumøguleikan.

Í grannalondunum er ávíst avgjald lagt á kostnaðin av tómum fløgum. Hetta gjaldið fellur aftur til upphavsrættarhavaran, tí sum kunnugt verða tómar fløgur nýttar til at brenna tilfar hjá upphavsrættarhavaranum á, og við einum gjaldi verður so endurgjald latið upphavsrættarhavaranum. Lógin er eisini galdandi í Føroyum, men sum er verður hon ikki handhevjað á Toll- og skattstovuni.

Í samgonguskjalinum hjá landsstýrinum er ásett, at upphavsrætturin hjá listafólki skal fáast í rættlag. Samsvarandi hesum arbeiðir Mentamálaráðið við at skipa økið við føroyskari lóg.

## Fíggjarligur stuðul

Tá ið hugsað verður um alt tónleikavirksemið, sum er her á landi hóast vánaligar umstøður og fíggjarlig viðurskifti, so er vert at kanna, hvaðan fíggingin til virksemið kemur. Tað koma runt roknað 40 fløgur út um árið í Føroyum, og hesar kosta ímillum 30.000 og 700.000 kr at framleiða. Hartil eru fleiri árligir festivalar og tiltøk við heilt stórum kostnaðarætlanum; ofta um hálva millión og heilt upp í tvær milliónir. Tað eru tó fáir festivalar, sum samsýna føroysku bólkunum og einstaklingunum. So ein kann siga, at høvuðsparturin av stuðlinum/fíggingini fer til at keypa tænastur av ymiskum slagi. Høvuðsveitararnir ella stuðlarnir eru landið (Mentamálaráðið og Vinnuframagrunnurin) Norðurlandahúsið, Nordisk Kulturfond, Nomus, Mentanargrunnur Landsins, ávísir føroyskir grunnar (t.d. Gramex, Fjølrit og hartil Landspeningur frá KODA til Føroyar, sum er 170.000 kr um árið) føroysku peningastovnarnir, kommunurnar og annars privatar fyritøkur.

### Mentamálaráðið

Mentamálaráðið umsitur fleiri stuðulsjáttanir á løgtingsfíggjarlógini til skapandi og útinnandi list og mentanarlív annars. Á fíggjarlógini fyri 2005 eru umleið 5 milliónir krónur til stuðul til alskyns endamál innan fyri mentan og list. Her verður sæð burtur frá teimum játtanum, sum lista- og mentanarstovnar umsita (Tjóðpallur Føroya, Mentanargrunnur Landsins, Norðurlandahúsið, Listasavn Føroya og Musikkskúlaskipanin).

Tað er rættiliga ymiskt, hvussu nógv av hesum fer til beinleiðis tónleikavirksemi. Av kontuni "Tónleikur og sangur" fáa nøkur tónleikameginfeløg árligan rakstrarstuðul; eitt nú Føroya Symfoniorkestur og Kórsamband Føroya; og í 2005 er játtanin til hetta endamál 850.000 kr. Staðfestast kann, at sum er fær einki felag ella meginfelag innan fyri rútmiskan tónleik rakstrarstuðul.

Í høvuðsheitum er stuðulin úr Mentamálaráðnum verkætlanarstuðul, ið er til einstøk tiltøk og tíðaravmarkaðar verkætlanir sum til dømis framsýningar, konsertir, konsertferðir og ráðstevnur. Stuðulin verður latin av kontu nevnd "Stuðul til onnur endamál", sum í 2005 er 1,079 millión kr. Mentamálaráðið hevur í mong ár ikki latið stuðul til fløguútgávur. Festivalar sum Listastevnan, G! Festivalurin og djassfestivalurin hava verið stuðlaðir á hvørjum ári; tó sum verkætlanir og ikki við fastari játtan.

Mentamálaráðið umsitur part av sonevnda veddingarfænum, sum verður nýttur til tiltøk fyri børn og ung; undir hesum er tónleikavirksemi fyri sama bólk. Seinnu árini hevur heildarjáttanin verið umleið 1,3 milliónir kr. Eitt nú hevur tónleikavirksemið á Margarinfabrikkini fingið stuðul av veddingarfænum. Harumframt hava ungdómskór og ungir tónleikabólkar fingið stuðul til eitt nú konsertferðir.

Tað er torført at siga nakað um, hvussu stórur partur av samlaða stuðlinum úr Mentamálaráðnum fer til rútmiskan tónleik burturav; veddingarpeningurin íroknaður. Tað er greitt, at upphæddirnar eru avmarkaðar, og at rútmiski tónleikurin er í kapping við annan tónleik eins væl og allar aðrar listagreinir og mentanarvirksemi annars. Tølini fyri stuðul til rútmiskan tónleik kunnu tí vera ójøvn frá einum ári til annað. Hinvegin er eisini greitt, at stuðulin úr Mentamálaráðnum í allar flestu førum er eitt ískoyti, sum ikki einsamalt kann halda eini verkætlan ella einum tiltaki uppi.

**Mentanargrunnur Landsins**
Ein alsamt vaksandi partur av stuðlinum, sum verður latin úr Mentanargrunni Landsins, verður latin til tónleik. Tey seinastu árini er talið av umsóknum til fløguútgávur hækkað munandi og harvið eisini tann stuðulin, ið verður latin til hetta virksemið. Tað, ið verður latið til fløguútgávur, er tó rættiliga smábýtt og rindar bert ein lítlan prosentpart av samlaða kostnaðinum. Tey hagtøl, ið eru tøk á heimasíðu grunsins, vísa ein støðugan vøkstur í stuðlinum til tónleikavirksemi.

**Mynd 15: Stuðul úr Mentanargrunni Landsins**

| | Tónleikur/dansur | Starvslønir |
|---|---|---|
| **2000** | 564.000 | 629.646 |
| **2001** | 389.000 | 1.483.730 |
| **2002** | 615.000 | 1.721.836 |

(kelda: www.mentanargrunnur.fo, 5. januar 2005)

Tølini siga einki um býtið ímillum tey ymisku tónleikasløgini; um tað er klassiskt, rútmiskt, kór ella hornorkestur; og heldur ikki um virksemið snýr seg um eina konsert, konsertferð, fløguútgávu ella annað tílíkt. Tað er eisini vert at nevna, at tað stendur tónleikarum í boði, eins og øllum øðrum listafólkum, at søkja starvsløn frá grunninum, og sostatt fer eisini ein ávísur partur av játtan grunsins til at løna

tónleikarum fyri ávíst virksemi. Tølini fyri starvslønirnar siga tó einki um, hvussu nógvir tónleikarar eru løntir av hesi játtan.

**Føroysku peningastovnarnir**
Føroysku peningastovnarnir (Føroya Banki, Føroya Sparikassi, Norðoya Sparikassi, og Suðuroyar Sparikassi) lata slaka millión í stuðli tilsamans um árið til tónleik. Onkur stuðul er beinleiðis, og annar stuðul er óbeinleiðis; t.d. fløgukeyp. Stuðulin er ikki býttur upp í tónleikasløg (popp, klassiskt o.s.fr.) ella tónleikavirksemi (fløgur, konsertir, konsertferðir o.a.). Tað eru tó nógvar umsóknir, sum ikki sleppa ígjøgnum nálareygað. Ein peningastovnur heldur, at umleið 10% av øllum umsóknunum, ið koma inn, verða játtaðar. Hetta sigur so mikið sum, at tað eru onnur 90%, sum mugu leita aðrar leiðir fyri at fíggja virksemið; kanska enntá inn aftur í peningastovnin fyri at fáa lán ella kassakreditt.

Peningastovnarnir tykjast meiri medvitaðir um, hvat slag av verkætlanum, teir vilja stuðla og harvið stuðla, so at tað munar. Grunnarnir hava hinvegin so breiðan stuðulspolitikk, at teir mugu gera øllum til vildar, og tískil verður stuðulin smábýttur. Tað er ikki so sjáldsamt longur at síggja teir stóru peningastovnarnar vera høvuðsstuðlar til tónleikatiltøk; eitt nú til Listastevnuna og Prix Føroyar. Onkrir peningastovnar hava beinleiðis gávugrunn ella stuðulsgrunn, har ein ávís upphædd er til taks hvørt ár og tískil ikki fer beinleiðis av rakstrinum annars. Aðrir taka stuðulin beinleiðis av rakstrarjáttanini. Á tann hátt hyggja teir kanska neyvari at, hvør verkætlan verður stuðlað.

**Norðurlandahúsið**
Hildið verður, at umleið ein millión kr av játtanini verða nýttar til at fremja tónleikatiltøk í Norðurlandahúsinum (Listastevnan er ikki við í hesi upphædd). Henda upphædd ger ikki mun á tónleikasløgum; heldur ikki um føroysk ella útlendsk nøvn eru á skránni. Okkurt um ein triðingur av upphæddini kemur aftur í inntøkum frá m.a. atgongumerkjum. Upphæddin skiftir eitt sindur frá ári til annað; pluss ella minus nakrar hundrað túsund; tí hon veldst um virksemið og tær verkætlanir, sum søkja stuðul ella vilja sleppa í Norðurlandahúsið.

Tað er eingin orðaður politikur um, hvussu nógv hvør listagrein skal stuðlast ella hvussu nógv tiltøk, hvør listagrein kann hava í húsinum. Men leiðslan hevur nakrar leiðreglur at halda seg til, tá ið virksemið verður lagt til rættis. Mett verður, at umleið 200.000 til 300.000 kr av milliónini fara til útlendskar tónleikabólkar og einstaklingar, sum hava framførslur í húsinum. Umframt hetta fara eisini aðrar 200.000 til konsertferðir hjá føroyskum bólkum og einstaklingum í onnur lond.

**Nordisk Kulturfond og Nomus**
Føroyskir stovnar, fyriskiparar, tónleikabólkar og einstaklingar kunnu søkja pening úr norðurlendsku grunnunum á jøvnum føti við hinar norðurlendsku tjóðirnar. Føroyar verða roknaðar sum útjaðaraøki (saman við Íslandi, Grønland, Norðurkolli, Eystur-Finnlandi og Suður-Danmørk) ið hevur serligan tørv, og á tann hátt er vælvild sýnd mótvegis føroyskum umsøkjarum. Allar umsóknir mugu kortini lúka tær treytir, ið verða settar. Fyri tónleikin eru tað serstakliga Nomus og Nordisk Kulturfond, ið eru viðkomandi. Nomus stuðlar bíleggingar av tónlistaverkum og konsertferðir og festivalar. Nordisk Kulturfond stuðlar eisini konsertferðum og festivalum eins og konsertum/framførslum. Treytin er, at tvey (um tað snýr seg um bílegging av

tónlistaverkum) ella trý norðurlendsk lond eru umboðað í verkætlanini. Samlaða myndin fyri stuðul til føroyskar bólkar, einstaklingar, festivalar og annað tónleikavirksemi sær soleiðis út:

**Mynd 16: Stuðul úr norðurlendsku grunnunum (DKK)**

| Grunnur / Ár | 2002 | 2003 | 2004 |
|---|---|---|---|
| Nomus | 137.000 | 90.000 | 187.000 |
| Nordisk Kulturfond | 0 | 700.000 | 325.000 |
| Tilsamans | 137.000 | 790.000 | 502.000 |

(kelda: www.norden.org, 17/11-04)

Tølini siga einki um, hvat slag av tónleiki verður stuðlað, men verður hugt nærri at tølunum á heimasíðuni, eru tað afturvendandi festivalar sum G! Festivalurin, Tórshavnar Jazz, Folk og Blues Festival, Listastevnan og Summartónar, sum ganga aftur. Verður roknað upp á prosentpartin av rútmiskum tónleiki mótvegis klassiskum, so vísir tað seg, at í miðal 44% av stuðlinum fara til rútmiskan tónleik. Viðmerkjast skal tó, at her er Listastevnan ikki tikin við í 'rútmiska' partin, tí tað er torført at staðfesta, hvat slag av tónleiki knýtir seg at henni (um yvirhøvur tónleikur, tí hetta er jú tvørlistarlig stevna).

**Tórshavnar býráð**

Tórshavnar býráð hevur fýra ymiskar høvuðsgreinar, tá ið tað snýr seg um stuðul til tónleik. Tórshavnar Musikkskúli er kommunalur, og ein partur av honum (virksemið í Skansastovu) er rútmisk deild. Játtanin fyri 2005 er vaksin í mun til 2004. Tórshavnar Kvøld- og ungdómsskúli er eisini kommunalur, og har eru eisini lærarar, ið verða løntir av býráðnum, til frálæru í rútmiskum ljóðførum. Eisini eru tónleikafeløg/bólkar, ið fáa fastan stuðul frá býráðnum, tí mett verður, at tey eru partar av býarmyndini og virðismikil fyri býin. Hesi eru t.d. GHM og Havnar Hornorkestur.

Sum seinasta grein av stuðli er kontan, Mentanarstuðul, sum árliga er umleið 425.000 kr tilsamans. Harav verður umleið helvtin brúkt til tónleik. Runt roknað stuðlar Tórshavnar kommuna sostatt tónleikaverkætlanum og útgávum við 200.000 kr árliga. Tann tónleikur, ið verður stuðlaður av hesari kontu, er ikki bert rútmiskur men eisini klassiskur (umframt kórsang og annað). Fløguútgávur verða vanliga stuðlaðar á tann hátt, at 10-15 eintøk verða keypt. Ein onnur konta, "Listadagar í Tórshavn", stuðlar eisini tónleiki. Av henni hevur Tórshavnar Jazz, Folk & Blues Festival fingið umleið 50.000 kr árliga. Ólavsøkukonsertin hevur eisini verið stuðlað árliga við einum 15.000 kr, umframt at býráðið hevur goldið rokningar fyri t.d. upprudding í kommunuskúlagarðinum. Listastevnan hevur eisini fingið ein árligan stuðul á 230.000 kr frá býráðnum.

Í álitinum "Havnin – livandi, kveikjandi, skapandi", sum kommunan læt skriva í 2000, varð mælt til, at fleiri venjingarhølir eiga at fáast til vega. Hetta er ein tørvur, ið býráðið fer at gera okkurt við komandi tíðina. Harumframt stendur spælistað ovarlaga á breddanum, tí tað vantar í býnum. Tórshavnar býráð hevur júst fingið handað álit um hølisviðurskiftini hjá Tórshavnar Musikkskúla. Í tí verður m.a. mælt til, at ein nýggjur musikkskúli/borgarabygningur verður bygdur á Skálatrøð.

**Vinnuframagrunnurin**
Vinnuframagrunnurin er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur sambært løgtingslóg nr. 81/2001 til endamáls at styrkja og fjøltátta føroyskt vinnulív og at menna burðardyggar føroyskar fyritøkur. Grunnurin virkar m.a. við at játta vinnufyritøkum stuðul til menningarverkætlanir sambært stuðulsskipanum, sum landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur góðkent. Grunnurin veitir hvørki rakstrarstuðul ella stuðul til íløgur.

Sum er stuðlar grunnurin tónleikafyritøkum eftir somu reglum sum øðrum fyritøkum. Við verandi stuðulsskipanum merkir hetta, at einasti stuðul, sum kann veitast tónleikafyritøkum, er til sølufremjandi tiltøk uttanlands. Stuðul hevur verið veittur fyritøkum; t.d. tónleikaforløgum, ið fara á messu; og til verkætlanir at marknaðarføra ávísar tónleikabólkar uttanlands.

Í sambandi við at marknaðarføra tónleikabólkar setur grunnurin m.a. tær treytir, at mál og útlit skulu vera, at lønandi vinna spyrst burtur úr verkætlanini, og at umsøkjarin hevur førleika at fremja verkætlanina. Vanliga verður stuðulin tí ikki veittur beinleiðis til tónleikabólkin men til fyritøku, sum stendur fyri verkætlanini. Einki forðar tó fyri at játta stuðul beinleiðis til tónleikabólkin, um hesin verður rikin sum fyritøka og kann vísa á, at førleiki at fremja verkætlanina í øllum liðum er til staðar.

Vinnuframagrunnurin játtar vanliga 50% í studningi av útreiðslum til verkætlanir. Írestandi upphæddina má umsøkjarin sjálvur rinda ella fáa til vega frá privatum stuðlum. Verður annar almennur stuðul veittur, veitir Vinnuframagrunnurin samsvarandi minni enn 50%.

Umframt at játta stuðul til fyritøkur kann Vinnuframagrunnurin fíggja vinnuframaátøk av meiri almennum slagi. Dømi um tílíkt átak er verkætlanin, sum hevur gjørt hetta álitið. Vinnuframaátøk verða sum høvuðsregla fyriskipað á vinnuframastovni hjá landinum.

Í miðal hevur grunnurin tey seinastu trý árini játtað slaka ½ millión kr til tónleikaverkætlanir av ymiskum slagi.

**Hagtøl fyri ársverk**
Tað er ógjørligt at siga fyri vist, hvussu nógvir tónleikarar eru í Føroyum, tí eingi hagtøl eru. Hartil skal ein hava í huga, at tað kanska eru nakrir fáir tónleikarar, ið kunnu sigast at vera yrkistónleikarar, men tað eru fleiri, sum kanska brúka hvørt vikuskifti at spæla tónleik men hava høvuðsinntøku frá øðrum starvi. Og so eru kanska aftur aðrir, sum fegnir vilja vera tónleikarar, men ikki hava venjingarhøli ella pall. Nógvir av ungu tónleikarunum eru lesandi við miðnámsskúlar ella hægri lærustovnar, og teir nýta alla frítíðina til tónleik.

Sambært telefonbókini, sum er einasta kelda (um ikki serliga eftirfarandi) eru tað 24 fólk, ið hava við tónleik at gera, antin sum tónleikarar, tónleikalærarar, tónaskøld ella fyriskiparar. Av hesum er umleið 1/3 tónleikarar, ið kunnu sigast at vera viðkomandi fyri hetta álit; v.ø.o. er teirra tónleikur av rútmiskum slagi. Umframt hesar eru aðrir, sum onkursvegna ikki eru skrásettir í bókini. Runt roknað eru kanska um 20 fólk, ið

burturav starvast sum tónleikarar (og tá eru ikki tey íroknað, sum hava starv sum tónleikalærarar).

Umframt hesi tølini, sum ikki kunnu sigast at vera serliga eftirfarandi, sæst tónleikur ikki í nakrari hagtalsskipan her heima. Men tað er vert at leggja sær í geyma, at 30 bólkar hava meldað seg til Prix Føroyar í 2005. Hetta ber boð um stórt virkisfýsni og góðan skapanarhug ímillum føroyskar tónleikarar, tí tey løg, ið verða spæld, skulu vera egin løg. Stóra talið av bólkum ber eisini boð um, at tað eru fleiri ungdómar; kanska einir 100; ið sera fegnir vilja fara tónleikavegin, men av teimum eru ivaleyst fáir, ið megna at gera tónleikin til sína yrkisleið her heima. Umstøðurnar, sum tær eru í løtuni, tala ikki júst fyri at gera tónleikin til ta inntøku, sum skal tryggja tónleikarunum breyð á borðið. Mett verður, at eini 150 nýggj løg verða gjørd til hvørt prix. Meginparturin av teimum fær sjálvandi eina stokkuta livitíð, men onnur hava kanska stórt potentiali.

## Samandráttur

Samanumtikið kann sigast um føroyska tónleikapallin, at

- tónleikafrálæran í fólkaskúlanum er minkað
- rútmiski parturin í Musikkskúlaskipanini er umleið 20% av samlaða virkseminum
- fáar kommunur veita venjingarhøli til ungdóm sín, og venjingarviðurskiftini eru sum heild vánalig
- hóast tað eru fleiri støð; góð og minni góð; har ein kann spæla live-tónleik, so er einki spælistað, sum er gjørt við bert tónleiki fyri eyga
- alsamt fleiri bólkar fara út um landoddarnar á konsertferð ella festivalar
- møguleikarnir hjá føroyskum bólkum at spæla fyri stórum fjøldum her heima er vaksandi í samsvari við, at fleiri festivalar verða fyriskipaðir
- fløgumarknaðurin er vaksandi her heima. Tað er léttari at geva fløgu út í Føroyum enn aðrastaðni, men umsitingarliga og peningaliga meiri krevjandi fyri tónleikararnar/útgevararnar
- einki plátufelag við vágafúsum íløgum er
- lítil orka verður nýtt til marknaðarførslu uttanlands
- loftmiðlarnir ikki hava nakran orðaðan tónleikapolitikk. Við einum orðaðum politikki kundu teir røkt sínar almennu tænastuskyldur betur
- alnetið er ein týdningarmikil sýnisgluggi fyri føroyskar tónleikarar, men enn vantar ein miðsavnandi portalur, sum kann savna alt undir einum regnskjóli
- tónleikararnir hava einki yrkisfelag, sum kann røkja teirra áhugamál; m.a. tá ið tað snýr seg um lønar- og skattaviðurskifti
- gjaldið frá upphavsrættarfeløgunum kundi verið munandi størri, um føroyskir tónleikarar boðaðu betur frá, og um loftmiðlarnir spældu meira føroyskan tónleik, og um føroyskir tónleikarar spældu meira uttanlands
- stuðulin til tónleikavirksemi úr almennum stovnum og grunnum og privatum peningastovnum (privatar fyritøkur og kommunur undantiknar) uttan mun til, um tað er klassiskt ella rútmiskt, liggur væl oman fyri 6 milliónir kr um árið
- ógjørligt at siga nakað um fíggjarliga týdningin av tónleikavinnuni og tónleikavirkseminum, tá ið eingi hagtøl eru.

# 4. SWOT

| Styrki | Veikleikar |
|---|---|
| • Tónlistarligi skapanarhugurin er stórur<br>• Okkara sterka sangtraditión hevur góða ávirkan á dugnaskapin at gera løg<br>• Unga ættarliðið av tónleikarum hevur eitt stórt ynski um at koma út við sínum tónleiki; heimurin er teirra leikpallur<br>• Tónleikarin hevur lætta atgongd til studio, fløguútgávur, fjølmiðlar o.a.<br>• Tað er lætt hjá einum talenti at koma fram<br>• Føroyar eru eksotiskar og forvitnisligar í tónleikahøpi<br>• Føroysku flutningsfeløgini eru sinnað at lætta um flutning/ferðing | • Stóri skapanar- og virkishugurin rúmast ikki í verandi karmum<br>• Vinnuliga undirstøðukervið og tænasturnar (umboðsfólk o.s.fr.) eru nærum ikki til<br>• Føroyski marknaðurin er avmarkaður<br>• Kunnleikin um vinnuliga bygnaðin á øðrum marknaðum er avmarkaður<br>• Netverkið og sambondini til útheimin eru ikki nóg gevandi<br>• Føroyar eru ókendar og hava ikki nakað tónleika-image úti í heimi<br>• Ov fá altjóða lyklafólk úr vinnuni eru á festivalum<br>• Tað er dýrt at fara konsertferð<br>• Fjølmiðlarnir hava ongan politikk viðvíkjandi føroyskum tónleiki |

| Møguleikar | Hóttanir |
|---|---|
| • Politiski viljin at menna karmarnar fyri tónleikin er til staðar<br>• Eitt hitt í Føroyum kann eisini verða eitt hitt aðrastaðni<br>• Tað ger ikki mun, um sangurin er føroyskur; bara hann er góður<br>• Ein góður sangur livir longur enn ein góður artistur<br>• Á alnetinum eru Føroyar eins stórar og onnur lond<br>• Sum einstaklingar virka føroyingar undir somu treytum og við somu møguleikum sum onnur<br>• Menniskjaliga tilfeingið er ein støðug rávøra | • Altjóða tónleikavinnan er í einum aldudali<br>• Tað er sera torført hjá óskrivaðum bløðum at sleppa fram at stóru útgávufeløgunum<br>• At vit skapa loysnir, sum eru 'out-of-date' aðrastaðni (t.d. leggja høvuðsdent á fløguútgávur, hóast rákið gongur ímóti fløguni sum tónleikaílati)<br>• Í tilgongdini til eina yrkisleið er tað nærum ógjørligt at búgva her heima |

# 5. Niðurstøða

> *"Hvat kostar tað at fáa ein tosk upp á land av Føroya Banka og at flyta hann út? Og hvat kostar ein tónleikari at flyta út?"* Samrøða við Terja Rasmussen, tónleikara, 4. januar 2005

Tørvurin at sleppa at spæla tónleik her heima er ómetaliga stórur; óivað størri enn aðrastaðni. Kanska er tað tíðin, vit liva í. Kanska er tað náttúran, vit liva við. Ella kanska er tað íblásturin frá okkara mest framkomnu tónleikarum, sum smittar onnur. Uttan mun til orsakirnar, kunnu vit bert staðfesta, at tónlistaligi skapanarhugurin bylgist í nógvum.

Tað eru runt roknað 4.000 børn og ungdómar, ið læra ella vilja læra at spæla ljóðføri. Fleiri enn 30 bólkar vilja sleppa framat við egnum tilfari til Prix Føroyar-kappingina. Fleiri einstaklingar vilja kappast um at gerast Ársins songrødd ella Singer-songwriter. Og so eru tað onnur, ið hava sítt dagliga yrki í tónleikinum; nøkur sum yrkisleikarar og onnur sum tónleikalærarar ella fyriskiparar. Og so uppaftur onnur, ið eru komin eitt vet longri út í heim við sínum tónleiki og síggja allan heimin sum sín leikpall.

Fleiri enn 40 fløgur verða givnar út á hvørjum ári. Tær allarflestu eru við bólkum, ið smíða og spæla egin løg. Í ljósu summarmánaðunum eru 6 ymiskir festivalar, sum allir bjóða fram konsertir við føroyskum luttakarum og útlendskum bólkum og einstaklingum, ið aloftast eru kendir. Á hendan hátt breiða ringarnir seg spakuliga, og netverkið og sambandið ímillum føroyskar og útlendskar tónleikarar gerst betri.

Til alt hetta virksemið lata grunnar og almennir og privatir stovnar runt roknað 6 milliónir kr um árið[12]. Við alnetinum hevur ein og hvør, ið hevur hegni og áræði, eitt ótrúliga gott amboð til at fáa sín boðskap út og marknaðarføra sín tónleik. Føroyar eru eins stórar og onnur lond á alnetinum, og landafrøðiliga avbyrgingin hevur als ongan týdning í so máta.

Men hvat varð av heimsstjørnuni?

Tað er eingin bók, sum til fulnar kann greiða frá, hvussu ein tónleikari kann gera sín dreym um at liva av tónleikinum til veruleika. Vit hava onga leiðbeiningarhandbók, sum kann vísa tónleikaranum, hvussu hann kann koma frá A til B á longu leiðini úr venjingarhølinum í ommusa kjallara til umbidna luttøku á Roskildefestivalinum ella plátusáttmála við Universal. Heldur eingin uppskriftsbók er til almennar myndugleikar um, hvørjir karmar og hvørji átøk skapa neyðugu gróðrarlíkindini fyri einari møguligari heimsstjørnu.

Tónleikaheimurin er fjøltáttaður og fjøltýddur, tí hann er settur saman av so nógvum ymiskum tilfari. Menniskjaliga tilfeingið er høvuðsrávøran, ið ikki kann góðskast og stýrast sum aðrar rávørur. Vinnan, sum umsitur tilfeingið, er eins og vinnur flest. Hon

[12] Talið er roknað út eftir tí stuðli, sum árliga verður latin úr Nordisk Kulturfond, Nomus, Norðurlandahúsinum, føroysku peningastovnunum, Mentamálaráðnum, Mentanargrunni Landsins, Vinnuframagrunninum og Gramex/Fjølriti.

hevur ávísa skipan og ávíst undirstøðukervi til vørur, tænastur og peningastreym, og hon er ávirkað av skiftandi gjaldføri, prísviðurskiftum og ynskjum um lønsemi. Men hon er eisini nógv stýrd av persónligum sambondum og netverkum, har ið persónsmenskur hava avgerandi týdning. Tónleikur er eisini eitt viðbreki hugtak í sjálvum sær, tí tónleikur talar til øll, men sigur ikki øllum tað sama. Kræsnir gómar duga ikki bert at siga, hvat vín er gott; teir duga eisini at siga, hvønn tónleik teimum dámar. Og innan fyri tónleik halda øll seg hava kræsnar gómar.

Avbjóðingin at røkka málinum liggur fyrst og fremst hjá tónleikaranum sjálvum. Tað eru nøkur, ið trívast væl við avbjóðingini og ikki falla í fátt av forðingunum á vegnum. Onnur velja sær annað lívsstarv, tá ið ein tíð er fráliðin. Summi berjast í mótvindinum; onnur venda við. Tey, sum vit í dag kunnu rópa stjørnur, eru ikki borin á lógvum. Tey hava bara onkursvegna neyðuga blandið av góðum evnum, treiskni, sjálvsvirði, arbeiðshugi og persónsmensku saman við tí vetinum av hepni og tilvild, sum skal til[13].

Eingin kemur higar at leita og banka upp á dyrnar, fyrr enn vit sjálv hava bankað upp á dyr og onkur teirra er gloppað.

Størstu avbjóðingina hevur tó politiski myndugleikin, sum onkursvegna ikki kann renna undan øllum skapanarhuginum og tónleikavirkseminum, sum er her heima. Ein verður noyddur at hugsa um tey nógvu í breiddini fyri at fáa ágóðan av teimum fáu í hæddini. Hvussu politiski myndugleikin tekur við avbjóðingini veldst um, hvørji mál hann setur sær. Avbjóðingin liggur eisini í at finna javnvágina ímillum at blanda seg uppí og blanda seg uttanum. Tónleikurin/tónleikarin trívist væl í andstøðu við umheimin, men hann má samstundis hava virðing, stuðul og karmar, fyri at honum skal vera lív lagað.

Uttan bygnað og politisk stevnumið leggja vit alt í hendurnar á einstøkum eldsálum og tilvildini. Eldsálir kunnu slokna undir trongum korum, og tilvildini kunnu vit ikki rokna við ella gera íløgur í. Við einum bygnaði eru karmarnir støðugir og áhaldandi, samstundis sum rúm er fyri eldsálunum, ið veruliga skulu til at skapa menning og trivnað.

[13] Kennir ein søguna um The Beatles, so veit ein, at vegur teirra til stjørnuhimmalin var langur og lítið glæsiligur. Teir spældu undir vánaligum umstøðum og fyri næstan ongan pening í fleiri ár. Men tað var júst í hesum árunum, at lunnarnir vórðu lagdir undir tað góða samanspælið og tað serliga sambandið og stemningin ímillum teir fýra. Hetta gjørdi, at teir vóru nakað meira enn so nógvir aðrir bólkar.

# 6. Møguligar tilráðingar

Frammanfyri hava vit roynt at lýst umstøðurnar hjá føroyskum tónleiki og tónleikarum. Gongdin og umstøðurnar í altjóða og norðurlendskari tónleikavinnu eru eisini viðgjørdar, og víst er á, hvussu okkara næstu grannar royna at menna tónleikavirksemið í sínum londum; vinnuliga og yvirhøvur.

Á kjaktorgum, á fundum, í fjølmiðlum og í beinleiðis samrøðum hava vit fingið fram sjónarmið um verandi umstøður her heima, og hvat ið tónleikarar, bólkar, útgávufeløg, fyriskiparar og mong onnur tónleikastarvandi í Føroyum halda vera neyðugar karmar, skulu vit veruliga menna vinnuligan tónleik her á landi.

Í viðgerð okkara hava vit roynt at hugt at, hvussu grannar okkara stuðla menning í tónleikavirkseminum, og hvussu stuðulsskipanir og samtøk teirra hava roynst. Vit hava síðan roynt at hugsað um líknandi skipanir hjá okkum. Hesar eru lýstar niðanfyri.

Flestu av hesum uppskotnu skipanum hava tó tann veikleika, at neyðugt er við væl meira peningi enn higartil hevur verið latin tónleikinum. Tá ið tað snýr seg um landskassastøddir, eru vit ikki serliga kappingarfør. Tað hevði munað væl, um stuðulin í Føroyum fyri hvønn íbúgva kom upp á sama støði sum í grannalondum okkara, men vit mugu onkursvegna skipa okkara nýtslu soleiðis, at tað, vit gera, veruliga munar.

Flestu útlendsku skipanirnar, sum eru nýttar sum fyrimynd, byggja í grannalondum okkara á samstarv ímillum felagsskapir innan fyri tónleikin, og tær eru stuðlaðar av privatum og kommunalum stovnum. Í summum førum skeiða eisini landsmyndugleikar og landsstovnar eitt sindur til. Her hjá okkum tykist samstarvið ímillum felagsskapir ikki at vera so dygt, og tí verður ofta leitað til almennar myndugleikar eftir stuðli. Tað er væl hugsandi, at nógv meiri hevði spurst burturúr, um stuðulsskipanir vórðu fyriskipaðar í egnu felagsskapum tónleikaranna, heldur enn at almennir myndugleikar gera tað.

# 7. Tilráðingar

## Ferðabrúgv

| | |
|---|---|
| Hvat? | Grunnur, sum hevur til endamáls at stuðla ferðing og flutning hjá føroyskum tónleikarum, ið hava fingið boðið at framføra á spælistaði ella festivali í øðrum landi/londum. |
| Hví? | Skjótt er hjá føroyskum tónleikabólkum at koma runt á øll spælistøð í Føroyum við nýggjum tónleiki. Uttan nýggjar avbjóðingar verður menningin avmarkað. Føroyar eru avbyrgdar frá øðrum tónleikastøðum, og kostnaðarmikið er at fara til hesi. Flestu fyriskiparar í øðrum londum gjalda ikki ferðakostnaðin, og tískil mugu føroyskir tónleikarar sjálvir gjalda ferða- og flutningskostnað. Innbjóðing at spæla á áhuga-verdum staði er góð avbjóðing og er partur av royndini at koma út í heim við føroyskum tónleiki. |
| Hvør? | Samstarv ímillum føroysku flutningsfeløgini Atlantic Airways og Smyril Line og møguliga onkran annan grunn, sum kann veita stuðul; og harumframt felagsskapir hjá tónleikarum. Umsitingin kann verða løgd til virkandi grunn. |
| Hvussu? | Krav skal vera til umsøkjaran, at hann hevur skjalprógv; t.e. innbjóðing frá fyriskipara; um ferðina. Eru onnur krøv veldst um, hvør peningaligi veitarin er (t.d. er tað eitt krav í Íslandi, at bólkurin skal hava tikið lut á Iceland Airwaves, har Reykjavíkar býur er ein av høvuðsstuðlunum). Viðgerðin av umsóknum má vera leypandi og skjót. |
| Hvussu nógv? | Samlaði stuðulin til Loftbrú í Íslandi er ein sløk millión. Mett verður tí, at um vit vilja veita samsvarandi stuðul, eigur grunnurin av hava eina árliga játtan upp á 400.000 kr. Peningurin kundi verið fingin við t.d. 100.000 kr í avsláttri frá ávikavist Atlantic Airways og Smyril Line, og 50.000 kr frá feløgum hjá tónleikarum (FUT, Gramex, Framleiðslugrunninum, Føroya Tónleikarafelagi o.s.fr.). Restin kann so koma frá kommunum og øðrum grunni. |
| Nær? | 2005 |
| Íblástur | **Loftbrú** verður umsitið av Icelandair, STEF (upphavsrættarfelagið) og FÍH (Félag íslendskra hljómlistarmanna) og Reykjavíkurborg. STEF og FÍH hava bundið seg til at lata tríggjar milliónir ÍSK árliga (257.000 DKK). Reykjavíkurborg letur 2,5 milliónir ÍSK árliga (214.000 DKK) og Icelandair hevur bundið seg til at lata avsláttur, ferðaseðlar og annað, ið hevur árligt virði á 5,5 milliónir ÍSK (t.e. 470.000 DKK) |
| Viðmerkingar | Ávísur stuðul verður longu veittur. Spurningurin er, um semja kann fáast um meiri samskipaðan stuðul, har serlig krøv verða sett umsøkjarum. |

## Faroe Islands Music Information Centre, MIC

| | |
|---|---|
| Hvat? | Ein stovnur/eitt felag við altjóða heiti, sum vendir sær úteftir men eisini er miðsavnandi fyri føroyska tónleikavinnu. |
| Hví? | Føroyar hava brúk fyri einum sýnisglugga út í heim og umboðum í altjóða netverkum og sølustevnum fyri at menna møguleikarnar hjá føroyskum tónleikarum/tónleiki at koma longri út. Samstundis er stórur tørvur á einum miðsavnandi regnskjólssamtaki, sum hevur til endamáls at savna vitan og upplýsingar til og um føroyskar tónleikarar og veita kunning um m.a. marknaðarførslu. Føroysk útgávufeløg hava tikið lut á Midem, men enn hevur eingin miðsavnað føroysk luttøka verið á tónleikaframsýningum úti í heimi. Eisini er neyðugt at fáa samstarv í lag við onnur feløg/aðrar stovnar í Norðurlondum fyri at fáa eitt størri netverk. Hetta kundi t.d. verið at fingið samstarv í lag við ta umboðsskrivstovuna, sum Ísland ætlar at lata upp í London. |
| Hvør? | Eitt miðsavnað ynski um og trýst fyri at fáa eitt slíkt felag eigur at koma frá tónleikarunum og feløgum teirra. Umsitingin kundi verið hjá LISA ella hildið til á almennum stovni (Ferðaráðnum ella Menningarstovuni) og harvið fingið atgongd til ta servitan, sum hesi longu hava um marknaðarførslu úteftir og útflutning. Norðurlandahúsið er annar viðkomandi stovnur, sum hevur sýnt áhuga at hýsa slíkari umsiting. |
| Hvussu? | Seta í starv fólk, sum hevur neyðuga kunnleikan og førleikan til at umboða og gera sølufremjandi arbeiði fyri føroyskan tónleik. Hann skal savna føroysku tónleikavinnuna, soleiðis at hon fer at standa saman og kenna ábyrgd. Uppgávan er eisini at savna og hava ábyrgd av hagtølum fyri føroysku tónleikavinnuna. |
| Hvussu nógv? | Tilsamans eigur ein millión at verða játtað hesum felagi til rakstur og starvsfólk. |
| Nær? | Fyrireikingararbeiðið eigur at byrja í 2005 við tí fyri eyga at stovna felagið fyrst í 2006. Fyrsta átak kundi t.d. verið Midem 2006. |
| Íblástur | www.exms.se<br>**ExMS** was formed in June 1993 by the major bodies within the music industry, i.e. IFPI and SOM (record companies), SAMI (musicians and artists) and STIM/Svensk Musik (composers and publishers). These are also the organisations, which finance the everyday activities.<br>Mission statement: ExMS was formed with the aim of initiating, assisting and facilitating the promotion and marketing of Swedish, popular music worldwide.<br><br>ExMS works at an industry level and co-ordinates efforts for a two-way communication with the international market-place. In practice, this means that we encourage and co-ordinate Swedish participation in international trade fairs, seminars, festivals and other activities for the promotion of Swedish music around the world. We keep the international music industry informed about what's going on in Sweden and the industry here up-to-date about the various opportunities for exposure and export.<br><br>ExMS seeks financing and sponsoring of the joint efforts being made for the export of Swedish music. |

## Tónleikaportalur

| | |
|---|---|
| Hvat? | Ein tónleikaportalur, sum virkar sum sýnisgluggi fyri føroyskan tónleik við sølu- og marknaðarførslufremjandi endamáli. |
| Hví? | Alnetið er eitt kærkomið amboð hjá einum landi, sum landafrøðiliga er avbyrgt. Á alnetinum er okkara lítla land eins stórt og hevur eins stórar møguleikar og øll onnur. Alnetið verður meira og meira brúkt í altjóða marknaðarførslu og tónleikasølu. Vit eiga ikki at standa aftanfyri, men brúka hetta amboð til fulnar. Í dag er lætt at leggja ljóðfílar út á netið, og bólkar og einstaklingar hava við einum portali ein góðan miðil at breiða út sín tónleik við. Sum er hava Tutl og Landing Duck heimasíður á enskum, sum bjóða føroyskan tónleik á alnetinum og hava tíðindi um føroyskan tónleik. Eisini eru aðrar viðkomandi heimasíður; t.d. hjá Prix Føroyum og Popp List. |
| Hvør? | Hetta eigur at vera partur av virkseminum hjá Faroe Islands Music Centre, tí tað felagið er miðsavnandi og umboðar alla ta føroysku tónleikavinnuna. Í byrjanini kostar ein slíkur portalur nógv, tí hann skal sniðgevast og hava røttu forritini. Almennu myndugleikarnir mugu sostatt stuðla. Annars eiga allir brúkarar at kenna ábyrgd av, at portalurin er dagførdur og verður brúktur til rætta endamálið. |
| Hvussu? | Starvsfólkið í Faroe Islands Music Centre skal umsita og dagføra portalin í samstarvi við onnur feløg, einstaklingar o.s.fr., sum eru partar av portalinum. T.d nyttar ikki at hava ein portal, um tíðindaskriv ikki verða send út til eitt viðkomandi netverk. Portalurin kann eisini sjóða saman onnur tónleikasløg; t.d. klassiskan tónleik. Á portalinum skulu yvirlit, myndir og leinkjur vera til tónleikabólkar, einstaklingar, útbreiðarar, plátufeløg, festivalar, studio, venjingarhølir o.s.fr. |
| Hvussu nógv? | Stórt fyrireikingararbeiði er longu gjørt við www.tutl.com, www.landingduck.com, www.prix.fo og www.popplist.fo, so kostnaðurin verður neyvan so stórur, um neyðuga samstarvið og felagsfatanin av, at allur føroyskur tónleikur kann fáa okkurt burtur úr hesum, vinnur frama. Harumframt kann portalurin fáa inntøkur; m.a. við brúkaragjaldi og lýsingum, sum vanligt er aðrastaðni. |
| Nær? | Fyrireikingararbeiðið eigur at byrja í 2005 við tí fyri eyga at lata portalin upp í 2006 (í sambandi við møguliga luttøku á Midem 2006). |
| Íblástur | www.musik.is<br>www.tonlist.is<br>www.musik.dk |

## Tónleikadagur

| | |
|---|---|
| Hvat? | Ein dag um árið eigur ljós at verða varpað á tónleik allastaðni í Føroyum. |
| Hví? | Tað hevur týdning fyri eina slíka vinnu, sum mong framvegis rokna sum frítíðarítriv ella avleiðing av ungdomsdølskni, at jaligt ljós verður varpað á hana. Fólk á hvørjum tanga eiga at fáa lut í og lata seg smitta av spæligleðini. Taka tónleikararnir slíkt í álvara, fara onnur eisini at gera tað. |
| Hvør? | Føroysku tónleikafeløgini saman við skúlaverkinum, Musikkskúlaskipanini og Strandfaraskipum Landsins. Fjølmiðlarnir eiga eisini at vera við í tiltakinum og varpa út tónleikin. |
| Hvussu? | Tónleikurin eigur at ljóma úti á skúlunum og á gøtunum alla staðni. T.d. kundu skúlarnir havt eina evnisviku og soleiðis fyrireika eina ávísa bundna uppgávu saman við næmingunum. Tónleikadagin koma yrkistónleikarar so út og 'hjálpa' til, og saman fara øll út at 'framføra' fyri almenninginum. Eftir tónleikadagin kundi t.d. ein nevnd valt ársins tónleikastað, har best/mest undirtøka var í lokalsamfelagnum (íblástur: Årets popstad í Svøríki). |
| Hvussu nógv? | Hetta eigur ikki at kosta nakað, men skal síggjast sum eitt tiltak, ið er til frama fyri tónleikin. Strandfaraskip Landsins og Bygdaleiðir kundu latið ókeypis ferðing til tónleikararnar. Øll høli og arbeiðsmegi eiga at vera sjálvboðin og ókeypis. |
| Nær? | Eitt árligt afturvendandi tiltak ein ávísan dag. |
| Íblástur | Spil Dansk Dag og Trax Festival<br>Årets popstad, Ekilstuna í Svøríki |

## Venjingarhølir

| | |
|---|---|
| Hvat? | Venjingarhølir. |
| Hví? | Allastaðni í Føroyum er stórur tørvur á venjingarhølum. Venjingarhølini eru bestu klekingarstøð fyri tónleikarar, tí har sleppa teir at skapa og mennast, uttan at onnur blanda seg serliga nógv uppí. Eru fleiri venjingarhølir á einum staði, fáa bólkarnir eisini stóran ágóða av og íblástur frá hvør øðrum. |
| Hvør? | Kommunurnar. Hartil eiga tónleikafelagsskapirnir at arbeiða miðvíst í sínum øki fyri at fáa hesi viðurskifti í lag, eins og t.d. ítróttafeløg gera tað, tá ið tað snýr seg um hallir og vallir. |
| Hvussu? | Hyggja eftir verandi hølum, ið kunnu nýtast til endamálið. Stendur skúlin t.d. tómur partar av degnum? Er onkur gamal bygningur, ið kann gerast í stand til endamálið? Tað, ið krevst, er streymur, hiti og pláss til ljóðførini. |
| Hvussu nógv? | Tónleikararnir gjalda vanliga fyri at leiga venjingarhølir, og hetta eigur partvís at rinda kostnaðin. Kommunan kundi t.d. stuðla við reingerð og annars umsitið hølini. Umsitingin, ella leigan av hølunum, kundi eisini verið skipað á kunningarstovunum, sum eru ymsastaðni í landinum. |
| Nær? | 2005. |
| Íblástur | Kling og Bank, Reykjavík<br>www.balstamusikslott.se<br>www.eskilstuna.se<br>www.rockcity.se<br>www.hultsfred.se |

# Spælistað

| | |
|---|---|
| Hvat? | Spælistað í miðstaðarøkinum, gjørt burturav til tónleikarakstur. |
| Hví? | Vit eiga at skapa neyðugar karmar her heima til tónleikarar, sum ynskja at hava sítt yrki og virki her. At spæla live-tónleik har tónleikarin hittir áhoyraran (kanska sín størsta krittikara!) er sera mennandi og eitt, ið er høvuðsdrívmegin hjá flestu tónleikarunum. Ein kann sammeta tað við at hava eina rúgvu av listamálarum men ongan Listaskála ella Lítluvík. Tað hongur ikki saman! |
| Hvør? | Tórshavnar kommuna. |
| Hvussu? | Hyggja eftir verandi hølum, ið kunnu nýtast til endamálið. Ella enn betri: Hugsa størri, betur og nýtt, soleiðis at staðið kann brúkast til at fáa útlendskar bólkar higar; t.d. at gera upptøkur, um hetta slagið av tónleikavirksemi verður koyrt inn undir raksturin. Hevði kommunan eitt veruligt spælistað, kundi væl hugsast, at samstarv og skifting varð ímillum kommununa og útlendsku vinakommunurnar; t.d. Aberdeen. Eitt spælistað krevur eitt umhvørvi og má spretta burtur úr tónleikavirkseminum, sum er í økinum. Hesar fortreytir tykjast vera til staðar í Tórshavn. |
| Hvussu nógv? | Kostnaðurin veldst um tað snýr seg um umbygging av verandi hølum ella nýbygging. Men umframt tað, ið húsið kostar at byggja ella umvæla, má allarhelst ein ávísur rakstrarstuðul til fyri at fíggja virksemið. Hinvegin er tað ynskiligt og best, at húsið verður rikið undir vinnuligum karmum og fortreytum.<br>* sí fíggjarligu karmarnar fyri spælistaðið Voxhall, Århus. |
| Nær? | 2005 |
| Íblástur | Kling og Bank, Reykjavík<br>www.balstamusikslott.se<br>www.eskilstuna.se<br>www.rockcity.se<br>www.hultsfred.se<br>www.lemontree.com |

*Fíggjarætlanin fyri spælistað í Århus, sum eitur Voxhall, sær soleiðis út (2002):

| Inntøkur: | | Útreiðslur: | |
|---|---|---|---|
| Atgongumerkjasøla: | 1.740.000 kr. | Samsýningar: | 2.000.000 kr. |
| Umsetningur av sølu av drykkivørum: | 1.290.000 kr. | Lønir, starvsfólk: | 2.100.000 kr. |
| Kommunalur stuðul: | 1.450.000 kr. | Rakstrarútreiðslur: | 1.000.000 kr. |
| Landskassastuðul: | 1.450.000 kr. | Fastar útreiðslur, viðlíkahald o.a. | 500.000 kr. |
| Stuðlar: | 120.000 kr. | | |
| Yvirskot fyri 2002: | 450.000 kr. | | |

Tað eru umleið 40 starvsfólk (harav nøkur sjálvboðin) knýtt at staðnum. Fimm teirra eru í føstum starvi, og restin er tímalønt. Spælistaðið hevur gjørt íløgur fyri yvir tvær milliónir kr til ljóð og aðra ½ millión til ljósútgerð. Ímillum 30.000 og 50.000 fólk brúka staðið um árið, og hesi eru ímillum 18 og 35 ára gomlu. Repertoire er 1/3 lokalir tónleikarar, 1/3 'nationalir' tónleikarar og 1/3 útlendskir tónleikarar. Staðið skipar fyri umleið 160 konsertum árliga. Umleið 250 fólk vitja hvørja konsert. Hetta er helvtin av plássmarkinum, ið er 500 fólk, fyri hvørja konsert.

## Felagið "Durur"

| | |
|---|---|
| Hvat? | Felag, sum hevur til endamáls at bjóða fram livandi tónleik og verkætlanir í skúlum. |
| Hví? | Besti háttur at geva børnum íblástur og skapa virðing er at lata tey uppliva (yrkis)tónleikarar í skúlastovuni ella á tónleikapallinum. At fáa okkurt nýtt inn um skúlagátt skapar áhuga í sjálvum sær, men tað ger tey eisini tilvitað um tónleik sum ein skapandi førleika. Tað hevur eisini týdning fyri tónleikaran at hava aðrar 'framførslupallar' og áhoyrarar enn á vanligu, kvøldligu spælistøðunum. Hetta snýr seg eisini um eina uppalandi frálæru og medvit um tónleik, tónleikasøgu, ástøði o.s.fr. |
| Hvør? | Felagið kann t.d. vera skipað undir Føroya Musikkskúlaskipan, har ein persónur situr og samskipar ymisku tiltøkini og tilboðini til skúlarnar. Virksemið kundi eisini komið undir virksemið hjá Konsertfelagnum. Eisini kundi tað verið skipað í samstarvi við Landsmiðstøðina (sum m.a. hevur til endamáls at veita skúlum tilfar) soleiðis at tað er námsfrøðiliga væl lagt til rættis og viðgjørt. Tað hevur jú týdning, at frálæran er løgd til rættis við støðinum hjá næmingunum í huga. |
| Hvussu? | Felagið fær uppskot frá musikkskúlalærarum, tónleikabólkum og einstaklingum um eina verkætlan. Verkætlanin kann so bjóðast út til skúlarnar, sum gera av, hvør verkætlan hóskar júst til teirra frálæru. Tær ymisku verkætlanirnar kundu verið lýstar á heimasíðu hjá Føroya Musikkskúlaskipan og/ella Landsmiðstøðini. Øll tónleikasløg eiga at sleppa framat. |
| Hvussu nógv? | Luttakandi tónleikarar eiga at verða samsýndir í slíkan mun, at áhugi er fyri hesum. Verður tosað um ávísa tímaløn, skal samsýning og stuðul eisini latast fyri fyrireikingararbeiði og ferðing. |
| Nær? | Fyrireikingararbeiði í 2005; setast á stovn komandi skúlaár. |
| Íblástur | Ísland, Tónlist fyri alla: http://listir.is/tfa<br>Danmørk, Levende musik i skolen: www.lms.dk |

## Vinnuframastuðul

| | |
|---|---|
| Hvat? | Stuðul burturav ætlaður at hjálpa føroyskum útgávufeløgum at "selja" føroyskan tónleik, tónleikarar og tónleikabólkar á altjóða tónleika-pallinum. |
| Hví? | Virksemið hjá føroyskum útgávufeløgum er sum heild avmarkað til at vera "labels" og útbreiðslufeløg. Tað er langt ímillum, at tey gera peningaligar íløgur í nakran tónleikara ella bólk. Vegurin hjá evnaligum tónleikarum og bólkum at koma longri fram, er tí oftast at royna sjálvir at fara út. Í sjálvum sær er hetta ikki ein vánalig leið, tí tað styrkir málvísið og áræðið. Hinvegin verða tað útlendsk útgávufeløg, sum taka teir til sín og fáa ágóðan. Góðar og ringar royndir verða ikki savnaðar í Føroyum at nýta hjá øðrum, sum vilja út. Vit sakna sostatt eitt útgávufelag ella samtak ímillum verandi útgávu-feløg. Hetta felag/samtak kann hava orku og fíggjarligar møguleikar at gera bindandi sáttmála við teir gávuríkastu tónleikararnar og bólkarnar, beinanvegin teir vísa serligan førleika og vilja gera nakað veruligt burtur úr tónleiki, og síðan kann tað skapa teimum frægastu umstøður og avbjóðingar at koma víðari. |
| Hvør? | Útgávufelagið kann vera eitt av teimum verandi, sum velur hesa leið, ella tað kann vera eitt nýtt felag, sum verandi feløg stovna saman. |
| Hvussu? | Saman við tónleikara/bólki leggur útgávufelagið eina heildarætlan um menningarleiðina hjá honum og hjálpir honum at gera royndir og fáa sær ta útbúgving/avbjóðing, sum partarnir semjast um er neyðug. Útgávufelagið leitar sær annan stuðul til ætlaðu leiðina frameftir og søkir Vinnuframagrunnin um stuðul, ið kann verða upp til tað sama, sum útgávufelagið við øðrum stuðli vil seta í. Stuðul kann verða játtaður í pørtum, og úrslitið kann so hvørt verða eftirmett. |
| Hvussu nógv? | Vinnuframagrunnurin veitir sum er um hálva millión um árið í stuðli til "útgávufeløg". Henda upphædd eigur at verða hækkað, og hesin stuðul eigur ikki at detta burtur. Til "nýggja" útgávufelagið eigur í minsta lagi sama upphædd at verða sett av. |
| Nær? | Neyvan verður eitt slíkt útgávufelag stovnað fyribils, og eitt av verandi feløgum fer valla fyrsta dagin at leggja so nógva orku í at víðka sítt virksemi út um tað, sum higartil hevur verið gjørt. Royndirnar higartil við Teiti, Eivør, Týr, Lenu og Niclasi og øðrum eiga kortini at skunda undir, at slíkt felag verður stovnað í næstum. |
| Íblástur | Góðu royndirnar higartil hjá Vinnuframagrunninum. |

## Aðrar tilráðingar:

- Menna Rútmisku deild Musikkskúlans (samstarv við kommunurnar)
    - Hetta hevur kanska serligan týdning í Vágum, Sandoy, Suðuroy og Norðuroyggjum.
    - Tørvur er á hølum fyri at kunna savna virksemið og hava samanspæl við bólkum o.s.fr.
- Stovna eitt yrkisfelag fyri tónleikarar; helst við í støði í verandi felagi. Hetta felag átti at samstarva við MMR og annan almennan myndugleika fyri at fáa skattaviðurskiftir, mvg og annað í rættlag. Tónleikararnir og feløg teirra eiga sjálv at taka stig til hetta.
- Skipast skal fyri sangskrivaralegu fyri føroyskar og útlendskar sangskrivarar við endamálinum at skapa netverk og íblástur fyri føroyskar sangskrivarar. Luttakaragjald átti at goldið meginpartin av kostnaðinum. Útvarp Føroya kundi verið við og gjørt sendingar og/ella fløgu við sangum frá leguni. Á hendan hátt kundi nýggja Útvarp Føroya latið dyrnar upp fyri skeiðvirksemi ella verkstovum í t.d. tøkni innan fyri tónleikaframleiðslu.
- Í byrjanini kundi hugsast, at t.d. tørvurin á venjingarhøli varð (lutvíst) nøktaður við einari flytførari bingju, sum kundi brúkast alla staðni í landinum. Varð íløga gjørd í eina bingju (eins og í Danmørk) við hentleikum og útgerð, sum tørvur er á, kundi hugsast, at hon ferðaðist úr bygd í bygd, og at ábyrgdin at leiga hana eisini ferðaðist saman við henni (t.d. til tær 16 deildirnar í Musikkskúlaskipanini, kunningarstovurnar o.s.fr.). Soleiðis fekk ein lættari eina fatan av tørvinum ymsastaðni í landinum og kundi eisini sett orð á ein eftirspurning, sum kommunurnar so áttu at tikið ábyrgdina av frameftir.

# 8. Almenni leikluturin

**Mentamálaráðið**
Innan fyri tónleikamenning síggja vit leiklutin hjá Mentamálaráðnum (MMR) sum tann at skapa lógarligar og fíggjarligar karmar fyri tónleikaundirvísing í sínari heild og at geva teimum stovnum og fyrisitingum, sum ráðið varðar av, so góð gróðrarlíkindi sum gjørligt. Hetta verið seg skúlaverkinum og Musikkskúlaskipanini og so eisini teimum feløgum, sum av røttum standa á fíggjarlóg Mentamálaráðsins við einari fastari árligari játtan. MMR eigur harumframt at vera tann proaktivi parturin í føroyskum mentanarpolitikki, sum stingur út í kortið og setur átøk í verk út frá einari miðvísari strategi og visjón. Sum er hevur MMR aðrar kontur, sum tónleikaverkætlanir og tiltøk kunnu søkja stuðul av. Hendan reaktiva leiklutin hevur Mentanargrunnur Landsins eisini, og tí er vert at umhugsa at endurmeta leiklutin hjá MMR í mun til Mentanargrunn Landsins og í mun til tey tiltøk og verkætlanir, ráðið eigur at stuðla. Fyri at kunna virka betur í breiddini og hava neyðugu fíggjarligu og umsitingarligu orkuna til tess er vert at umhugsa eina endurmeting av leiklutinum hjá MMR í mun til Mentanargrunn Landsins og í mun til tey tiltøk og tær verkætlanir, ráðið eigur at stuðla. Fremsta uppgávan hjá MMR er sostatt at menna undirkervið og menniskjaliga tilfeingið, sum er her á landi, og geva næmingum og øðrum, sum eru innan fyri teirra almennu umsiting, møguleikar at menna og fáa størri medvit um síni skapanarevni.

**Kommunurnar og vinnan**
Kommunurnar røkja ymisk sløg av virksemi og áhugamálum, sum borgararnir í teirra øki hava í felag. Við øðrum orðum hava kommunurnar ábyrgdina av at skapa trivnað fyri borgararnar. Hetta snýr seg millum annað um at skapa karmar fyri tað frítíðarvirksemið og tey ítriv, sum borgararnir hava tørv á. Á hendan hátt eru uppgávurnar hjá Mentamálaráðnum og kommununum eitt sindur samsvarandi, tó so at MMR hevur yvirskipaðu ábyrgdina av øllum Føroyum, og at kommunurnar røkja trivnaðin og menningina hjá borgarunum heima í lokalsamfelagi sínum. Mest eyðsýnda uppgávan, sum flestu kommunurnar hava tikið á seg, er at skapa neyðugar karmar fyri ítróttina, og sostatt eru í flestu kommunum bæði fótbóltsvallir og ítróttahallir umframt svimjihallir í ávísum kommunum. Ítróttin hevur nøkur sterk feløg, umframt at hon (kanska tí at karmarnir eru til staðar) er atdráttarmikil mótvegis eini størri fjøld av luttakarum, samanborið við tónleik. Tónleikavirksemið tykist ikki so væl skipað, og tískil er trýstið á kommunalu myndugleikarnar frá hesum borgaraskara ikki so stórt. Innan fyri tónleikamenning eigur kommunali myndugleikin sostatt at skapa meiri ítøkiligar karmar fyri tónlistaliga virksemið í økinum. Virksemið snýr seg um venjingarhølir, spælistøð og tónleikatiltøk; til dømis konsertir og festivalar í økinum, sum geva tónleikarunum ein almennan pall at framføra á. Men uppgávuna at skapa karmar og trivnað úti í kommununum eigur vinnan í økinum í nógv størri mun enn nú at loysa. Ynskiligt er, at vinnan eisini sær ein fyrimun við trivnaði og tekur ábyrgd av at skapa trivnað fyri síni viðskiftafólk og sostatt fer at brúka tilfeingið í vinnuligum høpi.

**Vinnuframagrunnurin**
Vinnuframagrunnurin (VFG) virkar í hæddini og stuðlar ávísum verkætlanum, ið onkursvegna eru tengdar at vinnuligum útlitum uttan fyri Føroyar. Sostatt kann ein siga, at VFG stuðlar úrslitið av tí, sum MMR og kommunurnar og heimliga vinnan hava taðað og gøðskað við sínum karmum. Tey átøk, ið VFG tekur lut í, lýta úteftir og

skapa neyðugu fortreytirnar fyri teir bólkar og einstaklingar, sum eru eftirspurdir í tónleikavinnuni aðrastaðni. Fyri at fáa stuðul skal helvtin av kostnaðinum fáast til vega, og sostatt krevst, at privata vinnulívið hevur sýnt verkætlanini áhuga og stuðul.

Hesir ymisku leiklutirnir kunnu síggjast í mun til ta longu tilgongdina frá tí, at ein tónleikaspíri sprettur og fram til, at hesin spírin hevur tónleik sum sína yrkisleið. Eisini sýnir myndin, at ein sannlík burturúrskiljing fer fram í tilgongdini, soleiðis at talið av teimum, ið veruliga gera tónleikin til sín vinnuveg, er avmarkað. Brotastrikurnar á myndini vísa, at ábyrgdin og uppgávurnar stundum umskarast soleiðis, at tað ikki ber til at nýta hesa myndina sum fýra kubbar, ið hvíla oman á hvør øðrum. Hetta er sostatt ikki ein pyramida eins og hon hjá Maslow, har ið niðasti kubbin er fortreytin fyri tí næsta o.s.fr.

**Mynd 17: Almenni leikluturin í tónleikamenningini**



**Yvirlit yvir greinar, lýsingar og kjak í sambandi við tónleikaráðstevnu 4. oktobur 2004**

**Áðrenn:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sosialurin: | 25/9/04 | What does it take? | tíðindaskriv | heilsíða |
| Vikublaðið: | 28/9/04 | - | - | heilsíða |
| Dimma: | - | - | - | heilsíða |
| ÚF: | 21/9/04 | - | tíðindastubbi kl. 18.30 | |
| ÚF: | 29/9/04 | - | Góðan Morgun Føroyar | kl. 08.10 |
| ÚF: | 29/9/04 | tilmelding | lýsing, NLH | 12:20 & 18.30 |
| ÚF: | 30/9/04 | tilmelding | lýsing, verkætlan | - |
| Rás 2 | - | What does it take? | tíðindastubbi | |
| Pop.fo | 22/9-1/10 | tilmelding | lýsing, verkætlan | bannari/flash |
| Pop.fo | 22/9 | kunning | tíðindaskriv | tíðindi |
| Vinnuhúsið | 21/9-1/10 | tilmelding & skrá | online, verkætlan | á 'heima' |
| NLH | - | kunning & skrá | tíðindaskriv | á 'heima' |
| Sosialurin | 02/10/04 | Hvat skal til? | viðm. Karl Anton Klein | heilsíða |
| Sosialurin | 01/10/04 | What does it take? | tíðindi, prát | teigur |

**Aftaná:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sosialurin | 05/10/04 | Setið eitt tónleikavinnuráð | grein, Elin Hentze | heilsíða |
| - | - | Fokus á tónleikavinnu | grein, Bjarni Djurholm | heilsíða |
| SVF | 05/10/04 | Týr, Marknaðarførsla | Dagur og Vika, U.Arge | 19.00 |
| SVF | 08/10/04 | Tónleikaráðstevna | Mentanartíðindi | 20.00 |
| Pop.fo | 10/10/04 | Hvussu var fyrilesturin? | kjak | 5 viðm. |
| Dimma | 23/10/04 | Skulu fáa føroyskan tónl. | prát v/Høgna Zach. | heilsíða |
| Dimma | 05/11/04 | Ein síðuvegur handan ... | prát v/Høgna Zach. | heilsíða |

# Yvirlit yvir samrøður við lyklapersónar:

**Tónleikarar**
Tróndur Enni, tónleikari, tónleikalærari - Suðuroy
Jón Tyril, tónleikari, fyriskipari, Grót - Eysturoy
Hans Ravnsfjall, tónleikari - Vágar
Steintór Rasmussen, fyriskipari, manager - Norðuroyggjar
Ólavur Enni Elisson, tónleikari - Sandoy
Terji Rasmussen, tónleikari - Nólsoy
Kim Hansen, tónleikari - Streymoy
Rógvi á Rógvu, tónleikari - Streymoy
Arnold Ludvig, tónleikari - Streymoy
Ári Rouch, tónleikari - Streymoy
Teitur Lassen, tónleikari - London

**Fyrisiting, umsiting**
Sigrid Dalsgaard - umboðskvinna, Týr
Anna Iachino- umboðskvinna, fyriskipari
Sólarn Solmunde - leiðari, Mentanarhúsið í Fuglafirði
Høgni Zachariassen - leiðari, 3-arin
Kristian Blak- leiðari, Tutl
Jákup Simonsen, deildarleiðari, mentan - Tórshavnar kommuna
Edvard Nyholm Debess, tónleikari - Landing Duck
Ove Olsen, tónleikadeildin- Útvarp Føroya
Ivan Niclasen, mentanardeildin - Sjónvarp Føroya
Gissur Patursson - Vinnuframagrunnurin
Helga Hjörvar - Norðurlandahúsið

**Onnur:**
Jóan Petur Hentze, Mentamálaráðið
Fróði Vestergaard, Prix Føroyar
Niclas Johannesen, tónleikari
Heðin Ziska Davidsen, Mentón
Sigvør Laksá, manager hjá Eivør
Martin Mouritsen, Føroya Musikkskúlaskipan
Bo Isholm, Tórshavnar Musikkskúli
Føroya Banki
Føroya Sparikassi
Norðoya Sparikassi
Suðuroyar Sparikassi
Mentanargrunnur Landsins
Klaksvíkar kommuna
Lárus Johannesson, 12 Tónar, Ísland
Nína, Kling og Bank, Ísland
Thurið Baxter, Stef, Ísland
Ása Kolka Haraldsdóttir, Reykjavíkurborg
Laufey Ólafsdóttir, Fræðslumiðstøð Reykjavíkur
Ben Malén, Air Chrysalis, Svøríki
Christer Lundblad, Export Music Sweden/Stim
Gunnar Madsen, Rosa, Danmørk
Koda
Gramex
Nordisk Copyright Bureau
Kulturministeriet, Jan O. Poulsen, fuldmægtig



1877 - Edison made the first recording of a human voice ("Mary had a little lamb") on the first tinfoil cylinder phonograph Dec. 6 (the word "Halloo" may have been recorded in July on an early paper model derived from his 1876 telegraph repeater) and filed for an American patent Dec. 24. John Kruesi built this first practical machine Dec. 1-6 from a sketch given to him by Edison that was made Nov. 29



1887 - A third type of phonograph was invented by Emile Berliner; he was granted patent 372,786 for a "Gramophone" using a non-wax disc photo-engraved with a lateral-cut groove. 1888 - Emile Berliner demonstrated an improved early gramophone May 16 at the Franklin Institute using a flat 7-inch disk with lateral-cut grooves on one side only, hand-cranked at 30 rpm with 2-min. capacity; Berliner was the first to mass-produce hard rubber vulcanite copies from a zinc master disk.




1926 - Vitaphone Co. signed a contract April 20 with AT&T to develop sound pictures using the electrical recording system of Western Electric, using 16-inch acetate-coated shellac discs at the new recording speed of 33 1/3 rpm in synch with film reel by electric motors;



Philips cassette diagram for the system introduced in 1965 that used 1/8-in. tape with 4-tracks running at 1-7/8 ips, allowing 30 or 45 minutes of stereo music per side. Philips cassette was 1/4 the size of the Fidelipac or Lear cartridge, making possible small battery-powered versatile players that could be carried anywhere. Mercury was one of the first record companies to offer a selection of 26 albums on the Philips cassette at a price of $5.95 each.



1979 - Sony introduced the TPS-L2 Walkman portable audio cassette player, inaugurating a new era of personal music listening; the Sony family of portable personal music players would grow to include over 500 models, from the original pocket-sized 14-oz Walkman to the D-88 Pocket DiscMan of 1988



1980 - The Philips/Sony compact disc standard was finalized. The Philips development began in 1969 with efforts by Dutch physicists Klaas Compaan and Piet KrThe Philips/Sony collaboration ended in 1981 and each company released its own products based on the 1980 standard. The Sony CDP-101 compact disc player was introduced in Tokyo Oct. 1, 1982, in Europe in the fall of 1982, and in the U.S. in the spring of 1983amer to record video images in holographic form on disc.



October 23, 2001, Apple introduced iPod, a breakthrough MP3 music player that packs up to 1,000 CD-quality songs into an ultra-portable, 6.5 ounce design that fits in your pocket. iPod combines a major advance in portable music device design with Apple's legendary ease of use and Auto-Sync, which automatically downloads all your iTunes songs and playlists into your iPod, and keeps them up to date whenever you plug your iPod into your Mac.

**Hjárit IV**



útland,
festivalur,
konsert, gigs,
útvarp
sjónvarp
Prix
Føroyar
fløgu-
útgáva
studio,
demo
sangskriving, egin
løg, samleiki
G! Festivalurin
Summarfestival-
urin
Listastevnan
Djassfestivalur
ítrótta-
tiltøk
ólavsøku-
konsert
skúla-
konsert
bygdastevnur
konsert, almenn tiltøk
PopTop
brúdleyp,
privat tiltøk
kjallarar
skúli
venjing,
høli
bilhús
frítíðarskúli
samanspæl
sjónvarp
telda
musikkskúli
sjálvlæra
frálæra
vinir
vinir,
familja
fløgur
fólkaskúlin
ljóðføri/rødd
spíri
Heim
Umhvørvi
Familja
Vinir
Arvur
Íblástur

**Hjárit V**

# ÚTLANDIÐ



## Hjárit VI



LISA, Listafólkasamband Føroya
Rútmiskur tónleikur
Klassiskur tónleikur
Føroya Tónleikarafelag
Pætursastova, 100 Tórshavn
tel. 31 48 15 / Kristian Blak
Endamál felagsins er vegna tey 4 undirfeløgini at samráðast um og gera avtalur við allar tónleika-nýtarar/fyrireikarar og annars virka til frama fyri áhugamál limanna.
Áhugafelag
Limatal: 240
Føroya UndirhaldsTónleikarafelag
Postrúm 2142, 165 Argjum
tel. 22 77 00 / Kaj Johannesen
Yrkisfelag klassiska tónleikara
Børkugøtu 21, 100 Tórshavn
tel. 31 18 18 / Martin Mouritsen
Føroya Jazztónleikarafelag
Djóna í G. gøtu, 100 Tórshavn
tel. 21 84 03 / E. N. Debess
Føroya Fólkatónleikarafelag,
Reynagøtu 12, 100 Tórshavn
tel. 31 48 15 / Kristian Blak
Yrkisfelag
MenTón,
Tórshavn,
Heðin Z. Davidsen
Grót, Gøtu,
Jón/ Kristfríð Tyril
Felagið Føroysk Tónaskøld
Reynagøtu 12, 100 Tórshavn
tel. 31 48 15 / Kári Bæk
Limatal: 33
Musikklærarafelagið
Form.: Sunleif Rasmussen
Havnar Jazzfelag,
Rógvi á Rógvu
ART, Áhugafelag
Rokk Tónleikaranna,
Karl Anton Klein
Konsertfelagið
Form.: Monica Strauss
Suðuroyar
Tónleikafelag,
Anfinn Leo
Felagið Tónaungdómur,
Studentaskúlin í Hoydølum
Føroya Sanglærarafelag
Form.: Zacharias Sørensen
Kórsamband Føroya
Form.: Ólavur Hátún
Felagið 700,
Klaksvík
Tónasjón,
Kári Sverrisson
Adore Music,
Keldan
Tutl,
Kristian Blak

# TÓNLEIKAHEIMURIN

Hjárit VII




Kelda: Performing Right Society, PRS Music Universe Poster, www.prs.co.uk/members

# Keldulisti


**Bøkur og Ritgerðir**

COWI: *"Analyse af dansk musikeksport 2002*", Kunststyrelsen / Musikcentret, januar 2004

*"Cultural Policy and funding for the arts"*, www.culturalpolicies.net, Council of Europe, oktobur 2003

Forss, Kim: "*The Export of the Swedish Music Industry*", Export Music Sweden, 2002

Fræðslumiðstøð Reykjavíkur*: "Tilløgur um fyrirkomulag tónlistaruppeldis í grunnskólum Reykjavíkur"*, oktobur 2003

Hollis Publishing: "*International Showcase, The Music Business Guide*", 2004

Kulturministeriet: "*Liv i musikken*", Kulturministeriets Musikhandlingsplan 2004-2007

Kunststyrelsen: Årsrapport 2003, mars 2004

Passman, Donald S.: "*All you need to know about the music business*", Penguin Books, 2001

Power, Dominic: "*Behind the Music*", Nordic Industrial Fund, mars 2003

Statens Musikråd: "*Musikkens amatører bør behandles professionelt*", rapport om amatørmusiklivets vilkår i Danmark, 2002

Studio Pegasus: "*Tónleikur 2002*", Hestprent, 2002

The Ministry of Education, Science and Culture in Iceland: "*Culture*" http://bella.mrn.stjr.is/utgafur/enskan.pdf, januar 2002

Tónmiðill Íslands: "Hvað er Tónlist fyrir alla?", www.listir.is/tfa, 2004

Tórshavnar kommuna: "*Havnin, livandi, kveikjandi, skapandi*", Álit um mentan og list í Tórshavnar kommunu, 2000

**Greinar og tíðarrit:**

Børsen: "*Bedste eksporthjælp er penge til markedsføring*", Britta Lysheim, 14. desembur 2004

Børsen: "*Kristen musik sælger stort i USA*", Doug Cameron, 16. novembur 2004

Dimmalætting: "*Gávuríkur bólkur manglar pengar til fløguútgávu*", Heini Gaard, 18. januar 2005

Dimmalætting: "*Líka børn leika best*", Uni L. Hansen, 9. desembur 2004

Dimmalætting: "*Fara at stovan nýtt tónleikaráð*", Jákup Bogi Joensen, 18. novembur 2004

Dimmalætting: "*Ein síðuvegur handan leiktjøldini*", Jákup Bogi Joensen, 5. novembur 2004

Dimmalætting: "*Skulu fáa føroyskan tónleik til vinnuveg*", Jákup Bogi Joensen, 23. oktobur 2004

Dimmalætting: "*Føroyingur selur tónleik til onnur*", Finnur Jensen, 23. august 2004

Dimmalætting: “*Sony Records áhugað í Eivør*”, Finnur Jensen, 11. februar 2004
Jyllands-Posten: “*Flot startskud for dansk musik*”, Peter Schollert, 4. novembur 2004
“KODAs nationale midler på Færøerne”, KODAs Nyhedsbrev til færøske medlemmer, juli 2004
Morgunblaðið: “*Spennandi rannsóknir á menningu og tónlist*”, Bergthóra Jónsdóttir, desembur 2004
Nordic Sound: “*Music accross borders*”, Mik Aidt, 1. mars 2004
Sosialurin: “*Tú mást brenna fyri tónleikinum*”, Eyðun Klakstein, 8. desembur 2004
Sosialurin: “*Bara apukattar spæla tónleik*”, Dagfinn Olsen, 8. desembur 2004
Sosialurin: “*Prix Føroyar í nýggjum hami*”, Solby Eliasen, 8. desembur 2004
Sosialurin: “*Føroyingar kunnu eisini*”, Eyðun Klakstein, 8. desembur 2004
Sosialurin: “*Stórur vági við íløgum í tónleik*”, Eyðun Klakstein, 8. desembur 2004
Sosialurin: “*Føroyskir tónleikarar taka kjansin í nýggja heiminum*”, Dagfinn Olsen, 8. desembur 2004
Sosialurin: “*Lena kann koma langt*”, Eyðun Klakstein, 3. desembur 2004
Sosialurin: “*McCartney umboð arbeiðir fyri Lenu”*, Eyðun Klakstein, 2. desembur 2004
Sosialurin: “*Spæligleðin skal dríva verkið*”, Áki Bertholdsen, 5. novembur 2004
Sosialurin: “*Tónleikurin fyllir næstan alt*”, Eydna Skaale, 7. mei 2004
Sosialurin: *“Teitur fær viðurkenning í USA”*, 24. januar 2004
Sosialurin: *“Yvirdosis av C-vitaminum – vegna grein hjá John Johannessen”*, 8. januar 2004
The Economist: “*Music's brighter future*”, Special Report, 30. oktobur 2004
The Guardian: “*House Music”*, 12. august 2004

**Greinar av netinum:**

***“**Behind the online music”*, www.cnn.com, 20. august 2004
“*British Government on Song To Back Music Industry*”, Paul Majendie, Reuters, oktobur, 2004
*“Celestial Jukebox*”, www.americanoutlook.org, januar-februar 2001
*“Christer Lundblad, Managing Director of Export Music Sweden*”, www.musicjournal.org, septembur 2001
“*Dansk musik i fokus på Popkomm*”, Musikerens e-nyt, nr. 16, septembur 2004
“*Dansk musik mest populært*”, Musikerens e-nyt, nr. 1. januar 2005
*“Downloads fuel music recovery”*, www.bbc.co.uk, 25. mei 2004
*“En foreløbig kulmination og nye perspektiver for dansk musikeksport*”, www.rosa.org, juni 2004

"*Facing the Music*", www.newyorkmetro.com, juni 2002

*"George Michael shuns music industry"*, www.bbc.co.uk, 11. mars 2004

*"Global Entertainment and Media Outlook" a preview"*, PriceWaterHouseCoopers, www.pwc.com, septembur 2004

*"How the internet will make the record labels evaporate*", http://world.std.com/~swmcd/steven/stories/labels.html, august 2000

*"IFPI publishes definite statistics yearbook on global music market*", www.ifpi.org, septembur 2004

*"It's the future, baby. How CD Baby helps indie musicians with digital distribution",* www.futureofmusic.org, Kristin Thomas, 8. oktobur 2003

"*Konserttilbud til de mindre byer*", Musikerens e-nyt, nr. 15, august 2004

*"Lidt positive toner fra pladebranchen*", Musikerens e-nyt, nr. 18, oktobur 2004

"*Lovlig fildeling på vej*", Musikerens e-nyt, nr. 20, novembur 2004

*"Lovløsheden hærger*", www.infomedia.dk, desembur 2004

*"Music Export Denmark starter d. 1. januar 2005*", www.rosa.org, desembur 2004

"*Music pirate sales hit record 1.1 billion discs but CD trade slows",* www.ifpi.org, juli 2004

"*Musikere uden pladekontrakt sælger godt*", Musikerens e-nyt, nr. 19, novembur 2004

*"Overall Music Sales Declining Among Teens – And Their Parents*", www.mi2n.com, 2. oktobur 2004

*"Pop Music Industry Takes Sweden by Storm*", www.ABBAmail, mei 2003

"*Preliminary findings from a web survey of musicians and songwriters*", Pew Internet Project, www.pewinternet.org, mei 2004

*"Record Industry is banking on the big names*", Guardian Unlimited, www.guardian.co.uk, 2. oktobur 2003

"*Rock agains the clock*", Guardian Unlimited, www.guardian.co.uk, apríl 2004

*"Salgsfremgang på verdensplan*", Finn Stalschmidt, www.pladebranchen.nu, 14. oktobur 2004

"*Sebastian er pirat: Alle gør det*", www.infomedia.dk, desembur 2004

*"Spil dansk dag*", Musikerens e-nyt, nr. 16, septembur 2004

*"Støtte fordeles til flere spillesteder*", Musikerens e-nyt, nr. 17, oktobur 2004

*"Where to download music legally*", Guardian Unlimited, www.guardian.co.uk, septembur 2004

"*Why are Music Sales Falling?",* www.celebrityaccess.com, juni 2003

HitQuarters: www.hitquarters.com :

"*Artists need to understand where exactly they fit into the media spectrum*", 19. oktobur 2004

*"We're looking to indentify talent that's under the radar of the majors"*, 13. oktobur 2004

*"The best way to find the next artist is to be in contact with somebody who is affiliated with talent, be it a producer or manager"*, 13. oktobur 2004

*"Great singers are great singers no matter how they're packaged"*, 23. septembur 2004

*"Unsigned artists should know what A&R people work at the labels and know the difference between them"*, 8. septembur 2004

"*If you spend your whole life reading books about the business, you'll never get anywhere*", 31. august 2004

*"Artists should be completely baked and ready to go"*, 3. august 2004

*"Major labels are looking at indies like me to help them find their acts"*, 19. juli 2004

*"A new period is beginning in which the independent labels will play a very important role"*, 7. juli 2004

*"We've successfully proved that artists can self-release on the same scale as a major"*, 21. juni 2004

*"Many bands want a deal right away, but they often forget to develop themselves enough"*, 15. juni 2004

*"It's not the A&Rs that artists have to convince, the A&Rs will follow the signs"*, 5. apríl 2004

**Heimasíður:**

| | |
|---|---|
| www.ifpi.org | International Federation of the Phonographic Industry |
| www.culturalpolicies.net | Council of Europe |
| www.kum.dk | Kulturministeriet |
| www.calq.gouv.qc.ca | Conseil des arts et des lettres Québec |
| www.mmr.fo | Mentamálaráðið |
| www.mentanargrunnur.fo | Mentanargrunnur Landsins |
| www.fmr.fo | Fíggjarmálaráðið |
| www.vmr.fo | Vinnumálaráðið |
| www.torshavn.fo | Tórshavnar kommuna |
| www.musikkskulin.fo | Musikkskúlaskipanin |
| www.mono.dk | Spælistað, venjingarhøli, Danmørk |
| www.ballerupmusikskole.dk | Bingju-venjingarhølir, Danmørk |

| | |
|---|---|
| www.fryshuset.se | Venjingarhøli, spælistað, Svøríki |
| www.replokalen.se | Heimasíða fyri tónleikarar, Svøríki |
| www.balstamusikslott.se | Balsta Musik Slott í Svøríki |
| www.eskilstuna.se | Eskilstuna kommuna í Svøríki |
| www.rockcity.se | Rockcity, Hultsfred, Svøríki |
| www.hultsfred.se | Hultsfred kommuna í Svøríki |
| www.lemontree.org | Lemon Tree, spælistað í Aberdeen |
| www.accessallareas.se | Showcase, Svøríki |
| www.icelandairwaves.com | Iceland Airwaves |
| www.exms.se | Export Music Sweden |
| www.musik.is | Tónleikaportalur, Ísland |
| www.tonlist.is | Tónleikaportalur, Ísland |
| www.12tonar.is | Plátufelagið, 12Tónar, Ísland |
| www.nasa.is | Spælistað í Reykjavík |
| www.visitreykjavik.is | Ferðavinnuportalur (við lista við t.d. spælistøðum) |
| www.messe-berlin.de | Popkomm, tónleikasølustevna |
| www.music.dk | Tónleikaportalur, Danmørk |
| www.ncb.dk | Nordic Copyright Bureau |
| www.infomedia.dk | Danskt blaðsavn/net-søla |
| www.nlh.fo | Norðurlandahúsið |
| www.listastevnan.com | Listastevna Føroya |
| www.summarfestivalur.fo | Summarfestivalurin |
| www.lisa.fo | Listafólkasamband Føroya |
| www.tutl.com | Plátufelagið Tutl |
| www.hafnia.fo | Hafnia / Singer-Songwriter kapping |
| www.gfestival.com | G! Festivalurin og Felagið Grót |
| www.prix.fo | Prix Føroyar |
| www.nummar.fo | |
| www.pop.fo | |

**Annað:**

What is PRS?, a Guide to the Performing Right Society

**Aðrar viðkomandi tónleikaheimasíður:**

**Fyri tónleikarar:**

www.garageband.com

www.cdbaby.com

www.itunes.com

www.taxi.com

www.hitquarters.com

www.broadjam.com

www.musicianseekmusician.com

www.songquarter.com

www.theorchard.com

www.tonlist.is

www.musictank.co.uk

www.okayplayer.com

www.iuma.com

**Til tónleik (ið loyvt er at taka niður av netinum):**

www.cdnow.com

www.napster.com

www.MP3.com

www.rhapsody.com

www.emusic.com

www.peoplesound.com

www.amazon.com

www.walmart.com

www.artistdirect.com

www.epitonic.com

www.insound.com

www.bignoisenow.com

www.mycokemusic.com

www.mperia.com

www.playlouder.com

www.streetsonline.co.uk

www.trax2burn.com

www.vitaminic.com

www.ubl.com

www.imusic.com

www.soundbuzz.com

www.downloadmusicmart.com